# Aðalfundur

## 2024



# Innihaldsyvirlit

Tú alfagra land mítt 3
Starvsnevnd, starvsfólk og umboðsting 4
Sersambondini 5
Menningarsambond og nevndaryvirlit 6
Forsetafrágreiðingin hjá ÍSF 2023 7
Býtið, grafar 18
Umboðstingið 19
Starvsnevndin 19

**SERSAMBOND:**
Badmintonsamband Føroya 20
Bogaskjótisamband Føroya 22
Borðtennissamband Føroya 24
Flogbóltssamband Føroya 26
Fótbóltssamband Føroya 28
Frælsur Ítróttur Føroya 30
Føroya Fimleikasamband 32
Hondbóltssamband Føroya 34
Judo Føroyar 36
Kurvabóltur í Føroyum 38
Parasport Føroyar 40
Ríðisamband Føroya 42
Róðrarsamband Føroya 44
Sersambandið fyri Súkkling og Triathlon 46
Skjótisamband Føroya 48
Svimjisamband Føroya 50

**MENNINGARSAMBOND:**
Billardsamband Føroya 52
Boksisamband Føroya 54
Dartsamband Føroya 56
Golfsamband Føroya 58
Klintrisamband Føroya 60
Seyðahundasamband Føroya 62
Føroya Styrkisamband 64
Taekwondosamband Føroya 66
Tennissamband Føroya 68

Ársroknskapur hjá ÍSF 71

**MYNDIR:**
Gilli Brend í Hoyvík
Ólavur Fredriksen
Gilli Brend í Hoyvík
Ann-Mari B. Mouritsen
Sverri Egholm
Finnur Justinussen

**UPPSETING / SNIÐGEVING:**
Loysnir

**TEKSTUR:**
Eydna Skaale

**RÆTTLESTUR:**
Leivur Frederiksen

# Aðalfundur

## Ársfrágreiðing 2023

### Tú alfagra land mítt

**1.** Tú alfagra land mítt, mín dýrasta ogn!
á vetri so randhvítt, á sumri við logn,
tú tekur meg at tær so tætt í tín favn.
Tit oyggjar so mætar, Guð signi tað navn,
sum menn tykkum gávu, tá teir tykkum sóu.
Ja, Guð signi Føroyar, mítt land!

**2.** Hin roðin, sum skínur á sumri í líð,
hin ódnin, sum týnir mangt lív vetrartíð,
og myrkrið, sum fjalir mær bjartasta mál,
og ljósið, sum spælir mær sigur í sál:
alt streingir, ið tóna, sum vága og vóna,
at eg verji Føroyar, mítt land.

**3.** Eg nígi tí niður í bøn til tín, Guð:
Hin heilagi friður mær falli í lut!
Lat sál mína tváa sær í tíni dýrd!
So torir hon vága – av Gudi væl skírd –
at bera tað merkið, sum eyðkennir verkið,
ið varðveitir Føroyar, mítt land!

# Starvsnevnd, starvsfólk og umboðsting



Elin H. Joensen,
Forseti



Magnus Tausen,
Varaforseti



Kerstin Laksáfoss,
Nevndarlimur

## Starvsnevnd

Elin H. Joensen,
Forseti

Magnus Tausen,
Varaforseti

Kerstin Laksáfoss,
Nevndarlimur

John Kjær,
Nevndarlimur

Anna Maria Toftegaard
Nevndarlimur

Hávard Vatnhamar
Nevndarlimur (Íðkaranevndin)

## Starvsfólk

Petur Mittún,
Aðalskrivari

Andras Nolsøe,
Ítrótta- og ungdómsráðgevi

Katrin á Neystabø,
Strategi og skúlaleikir

Finnbjørg Nattestad,
Skrivstovuólk



Anna Maria Toftegaard,
Nevndarlimur



John Kjær,
Nevndarlimur



Hávard Vatnhamar,
Nevndarlimur (Íðkaranevndin)



Katrin Jacobsen,
Badmintonsamband Føroya



Fróði Heri Poulsen
Bogaskjótisamband Føroya



Fróði Fríðason Jensen,
Borðtennissamband Føroya



Pól Esper Hansen,
Føroya Fimleikasamband



Peter Holm,
Flogbóltsamband Føroya



Christian F. Andreasen,
Fótbóltssamband Føroya



Sølvi Reinert Hansen,
Frælsur Ítróttur Føroya



Gunn Ellefsen,
Hondbóltssamband Føroya



Sofus Johannesen,
Judo Føroyar



John N. Thomsen,
Kurvabóltur í Føroyum



Petur Elias Petersen,
Parasport Føroyar



Brandur í Dali,
Ríðisamband Føroya



Annika V. Dalsgarð,
Róðrarsamband Føroya



Esmar Joensen,
Skjótisamband Føroya



Arnfinnur Helmsdal,
Sersambandið fyri Súkkling og Triathlon



Rókur í Jákupsstovu,
Svimjisamband Føroya



Ingi Samuelsen,
Umboð fyri Menningarsambond

# Sersambondini

## Badmintonsamband Føroya
Katrin Jacobsen, forfólk
Mariann Øster, næstforfólk
Gunnar Gregoriussen, nevndarlimur
Sofía Olsen, nevndarlimur/aðalskrivari
Johnny í Grótinum, nevndarlimur

## Bogaskjótisamband Føroya
Fróði Heri Poulsen, forfólk
Ingolf S. Olsen, skrivari
Jógvan Niclasen, næstforfólk
Hans Petur Højgaard, nevndarlimur
Hans Bogi Ellefsen, tiltakslimur

## Borðtennissamband Føroya
Fróði Fríðason Jensen, forfólk
Elinborg C. Mortensen, næstforfólk
Teitur Haraldsen Albinus, kassameistari
Pætur Albinus, skrivari

## Flogbóltssamband Føroya
Peter Holm, forfólk
Guðrun Joensen, næstforfólk
Jóhan á Mýruni, nevndarlimur

## Fótbóltssamband Føroya
Christian F. Andreasen, forseti
Róin Schrøter, varaforseti
Anja Rein, nevndarlimur
Maria J. Joensen, nevndarlimur
Heri á Rógvi, nevndarlimur
Fríðin Ziskason, nevndarlimur
Rúni Herup Olsen, nevndarlimur

## Frælsur Ítróttur Føroya
Sølvi Reinert Hansen, forfólk
Peter Jensen, skrivari
Karin kirke Petersen, kassameistari
Heini Gregersen, nevndarlimur

## Føroya Fimleikasamband
Pól Esper Hansen, forfólk
Heri Lamhauge, næstforfólk, amboðssamskipari
Elin Michelsen, samskipari, estetiskt
Rúna Olsen, samskipari, breiddarfimleikur
Malan Mikkelsen, samskipari, Fimleikafagnaður og galla

## Hondbóltssamband Føroya
Gunn Ellefsen, forfólk
Jógvan Emil Nielsen, næstforfólk
Heini Ellingsgaard, nevndarlimur
Durita Thomsen, nevndarlimur
Kristian Østergaard, nevndarlimur
Høgni Vilhelmsen, varalimur
Birgir Kass, varalimur

## Judo Føroyar
Sofus Debes Johannesen, forfólk
Kristianna Solberg á Túgvu, næstforfólk
Petur Sigurð Johannesen, skrivari
Silja Johannesen, nevndarlimur
Andrias Sumberg, nevndarlimur
Anna Saloma Steinberg, tiltakslimur
Bárður Hentze Lenvig, tiltakslimur

## Kurvabóltsamband Føroya
John Norðbúð Thomsen, forfólk
Anna Petersen, skrivari
Sára Isfeldt, kassameistari
Sølvi Olsen á Skúr, nevndarlimur
Magnus Jakobsen, nevndarlimur

## Parasport Føroyar
Petur Elias Petersen, forfólk
Tóra Norðgerð, næstforfólk
Hans Karl Højgaard, skrivari
Anna Gaardlykke, nevndarlimur

## Ríðisamband Føroya
Brandur í Dali, forfólk
Zacharias R. Jacobsen, næstforfólk
Valborg Laksafoss, nevndarlimur
Poula Tornby, tiltakslimur

## Róðrarsamband Føroya
Annika Vilhelmsen Dalsgarð, forfólk
Elsa Magnussen, næstforfólk
Petur Hansen, skrivari
Hugo Skorastein, nevndarlimur

## Sersambandið fyri Súkkling og Triathlon
Arnfinnur Helmsdal, forfólk
Lena Hallgren, næstforfólk og kassameistari
Ken Nolsøe, nevndarlimur

### Skjótisamband Føroya
Esmar Joensen, forfólk
Finn Ludvig, nevndarlimur
Jónstein Johannesen, nevndarlimur
Jógvan Egholm, nevndarlimur
Tórur Fløtt, nevndarlimur

### Svimjisamband Føroya
Rókur í Jákupsstovu, forfólk
Johan Martin Thorsteinsson, næstforfólk
Gunnvá Thomsen, skrivari
Sabina Poulsen, nevndarlimur
Dann Hjelm, nevndarlimur
Hálvdan Rúni Gaardbo, tiltakslimur
Signhild Joensen, íðkaraumboð

# Menningarsambondini

### Billardsamband Føroya
Markus L. Olsen, forfólk

### Boksisamband Føroya
Martin Meng, forfólk

### Dartsamband Føroya
Annfinn A. Hjaltalin, forfólk

### Golfsamband Føroya
Ingi Samuelsen, forfólk

### Klintrisamband Føroya
Absalon Eysturoy, forfólk

### Seyðahundasamband Føroya
Tummas Jacobsen, forfólk

### Føroya Styrkisamband
Heini Hátún, forfólk

### Taekwondosamband Føroya
Noomi Kunoy Heradóttir, forfólk

### Tennissamband Føroya
Stefan í Skorini, forfólk

# Nevndaryvirlit

### Olympiska nevnd Føroya
Elin H. Joensen, forseti
Magnus Tausen, varaforseti
Kerstin Laksáfoss, nevndarlimur
John Kjær, nevndarlimur
Anna Maria Toftegaard, nevndarlimur
Hávard Vatnhamar, nevndarlimur
Íðkaranevndin

### Íðkaranevndin
Hávard Vatnhamar, forfólk
Torkil Veye, varafólk
Petur Sigurð Johannesen, nevndarlimur
Edna Maria Debes, nevndarlimur
Gunnva K. Jacobsen, nevndarlimur

### Fíggjarnevndin
Elin H. Joensen, forfólk
John Kjær, nevndarlimur
Ólavur Ólavsson, nevndarlimur

### Ungdóms- og menningarnevndin
Kerstin Laksáfoss, forfólk
Anna Maria Toftegaard, nevndarlimur
Gudmund Joensen, nevndarlimur
Guðrun Jacobsen, nevndarlimur

### Spf. Ítróttavedding
Magnus Tausen, forfólk
Rói Poulsen, varaforfólk
Hjørdis Gaard, nevndarlimur
Gudrun Mortansdóttir Nolsøe, nevndarlimur
Kerstin Laksáfoss, nevndarlimur
John Kjær, nevndarlimur
Anna Maria Toftegaard, nevndarlimur
Elin H. Joensen, stjóri

### Ítróttadómstólur
Anna Rein, forfólk
Sissal Kjartansdóttir Kristiansen, nevndarlimur
Heðin Joensen, nevndarlimur
Jóhan Lamhauge, nevndarlimur
Magnus Dam, nevndarlimur
Jóhan E. Simonsen, varalimur
Andrass Thomsen, varalimur
Anja Kristina Øster, varalimur

### Dopingnevndin
Jónfinn Thomsen, forfólk
Jóhanna Arge, nevndarlimur
Pál Weihe, nevndarlimur
Majbritt Lamhauge, varalimur

### Antidopingnevndin
Jónas Tór Næs, forfólk
Katrin Rubek Nielsen, nevndarlimur
Jóannes Guttesen, nevndarlimur

### Føroya Ítróttasavn
Palli Ziskason, kassameistari
Andrass Mortensen, nevndarlimur
Marjun Hanusardóttir, nevndarlimur
Helena Dam á Neystabø, nevndarlimur
Kristian Johansen, nevndarlimur

### Úrval
Ragnar Joensen, forfólk
Jóhanna á Bergi, nevndarlimur
Katrin Olsen, nevndarlimur
Rannvá Sólheim, nevndarlimur (AMMR)
Páll Isholm, nevndarlimur
Petur Mittún, skrivari

### Heiðursskjal Poul E. Petersen
Anna Rein
Óli Holm
Heðin Mortensen
Marjun Kalsø
Signar á Brúnni
Gunvá við Keldu

# Forsetafrágreiðing hjá ÍSF 2023

**- frá mars 2023 til mars 2024**

## 1.0 Inngangur: ÍSF 85 ár - og í framúr formi

85 ár. ÍSF er vorðin ein gomul dama, hyggja vit at stovningardegnum. Men hyggja vit at virkseminum og at tí, sum hon fær frá hondini, ja, so er framvegis veiggj í hesi gomlu. Í roynd og veru kunnu vit staðfesta, at formurin ongantíð hevur verið so góður, sum hetta farna árið.

2023 hevur verið eitt ótrúliga hendingaríkt ár fyri føroyskan ítrótt. Tiltøk, kappingar, óhoyrd úrslit, nýbrot, avtalur - ja, tað kennist, sum vit á øllum frontum hava tikið okkum fram. Tað hevur eisini verið hendingarríkt hjá ÍSF, og nógv frambrot hava verið.

Vit merkja ein eldhuga í føroyskum ítrótti. Ein eldhuga, sum smittar - og sum bara elvir til enn størri eldhuga. Millum ítróttafólk. Millum ítróttagreinar. Og millum fjepparar.

Eldhugur og góður formur er reyði tráðurin, sum rennur ígjøgnum alt tað nógva virksemið í fjør.

Alt, sum vit hava gjørt, hava vit gjørt "í felag fram ímóti felags málum". Strategiin, sum varð samtykt fyri tveimum árum síðani, hevur nú av álvara víst seg í verki. Tað kennist sum vit hava lyft og styrkt føroyskan ítrótt og alt ítróttaumhvørvið.

Málini, vit settu í strategiarbeiðinum fyri tveimum árum síðani, hava verið hildin í hevd og bera nú ávøkst. Tey fýra høvuðsmálini eru:

- øll skulu við
- fjálga um sjálvboðin
- ítróttagleði fyrst og fremst
- styrkja úrvalsumhvørvini

Grundarlagið undir øllum var orðið »felagsskapur«.

Tað hevur verið ein vilji til handling. Tað hevur verið ein sterk trúgv uppá, at vit kunnu gera tað enn betur. Og vit hava onga orsøk at smæðast. Hvørki her heima – ella í altjóða høpi.

Vit koyra á. Sjálvt um vit eru blivin 85 ár

## 2.0 Børn og breidd

Børn og breidd hava fylt nógv hetta farna árið. Tað byrjaði á Ítróttartinginum undan ársaðalfundinum - og síðani var 2023 fult av tiltøkum og átøkum, har børn og breidd vóru í fokus. Í stóran mun hevur tað snúð seg um trivnað.

### 2.1 Skúlaleikir 22/23

9. mai 23. var endabresturin á Skúlaleikum 22/23, tá ið 15 flokkar kappaðust á Hálsi í Havn. Børnini kappaðust í frælsum ítrótti, flogbólti, badminton, inniróðri, kurvabólti og rørslumegi. Næstan 2000 næmingar úr 4., 5. og 6. flokkum kring alt landið tóku lut í Skúlaleikum hetta skúlaárið á tilsamans 13 undanstevnum.

- Enn einaferð var tað heilt fantastiskt at vera við til - bæði hjá ÍSF, ítróttalærarunum, sum fáa íblástur og nýggjar tankar um lærugreinina ítrótt – og ikki minst hjá børnunum, sum hava smílst frá oyra til oyra undir stevnunum, segði Elin Heðinsdóttir Joensen, forseti í ÍSF, eftir leikirnar.



**Ársins Skúlaleika-flokkar 2023 gjørdust:**

- 4. flokkur úr Kollafjarðar Skúla
- 5. flokkur úr Sands Skúla
- 6. flokkur úr Skúlanum við Løgmannabreyt

Eftir stevnuna kom fram, at tað eru fleiri børn, sum eisini royna seg í ymsu greinunum eftir skúlatíð. Hetta er gleðiligt og ein partur av endamálinum við leikunum.

**Skúlaleikir á skrá til 2027**

Skúlaleikir hava somuleiðis verið á skrá skúlaárið 2023/24. Áleið 90% av næmingunum í miðdeildum kring landið hava tikið lut í undanstevnunum. Í ár hava vit lagt størri dent á Parasport. Tað hevur roynst sera væl og verið eyka stuttligt.

Avgerð er tikin um, at Skúlaleikir verða á skrá komandi trý árini, og ætlanin er at bjóða næmingum í útskúlingini við. Næsta stigið hjá ÍSF er at fáa viðkomandi partar í undirvísingarskipanini at taka Skúlaleikir undir egnar veingir í størri mun.

Samstarvspartnarar hjá ÍSF í Skúlaleikum eru Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Kommunufelagið, Fólkaheilsustýrið og Fróðskaparsetur Føroya. Betri er høvuðsstuðul.

### 2.2 Nýtt rørsluskeið til næmingar á Glasi

ÍSF og Glasir fóru á heysti '23 undir nýtt samstarv. Tað snúði seg um at bjóða næmingum á Glasi eina stuttliga venjing um vikuna. Venjingarnar fingu heitið PULS.

Endamálið við PULS var at geva næmingum á Glasi møguleika at fáa smílið fram og pulsin upp eina ferð um vikuna í 10 vikur. Talan var um eina roynd, og venjingarnar vóru væl eydnaðar.

ítróttagreinarnar til heystskeiðið 2023 vórðu soft-tennis, bogaskjóting, kurvabóltur og inniróður.
Vit brúka nú ta vitanina og tær royndirnar, vit fingu í 2023, til at menna tilboðið, soleiðis at tað aftur kann setast á skrá á heysti 2024.

### 2.3 Safeguarding

Hóskvøldið 22. februar 2024 settu vit evnið "trygg ítróttaumhvørvi fyri børn og ung í Føroyum" á breddan. Belgiski serfrøðingurin, Tine Vertvommen, ið er Phd í tryggum ítróttaumhvørvum, kom til Føroya at hava fyrilestur. Hon hevur millum annað staðið fyri størstu evropeisku kanningini um evnið.
Tað vóru ÍSF og FSF, sum í felag fóru undir at seta evnið »trygg ítróttaumhvørvi í Føroyum« á skrá. Enska heitið fyri Trygg ítróttaumhvørvi er »safeguarding«, og tað merkir, at vit, sum varða av ítróttinum, taka stig til, at børn og ung skulu kenna seg trygg og trívast, tá ið tey koma til venjing og kappingar.
Tine Vertvommen greiddi frá um trygd og trivnað hjá børnum og ungum, hvussu og nær mørkini verða brotin – og hvørjum vit skulu hyggja at fyri at síggja ábendingar um, at børnini ikki kenna seg trygg.
Fyrilesturin var liður í málinum hjá ÍSF um, at øll skulu kunna íðka og vera partur av ítróttaliga felagsskapinum á hóskandi stigi og undir tryggum kørmum.

### 2.4 Opið hús í heystferiuni

Í samband við ABC vikuna bjóðaði ÍSF til Opið hús í SMS. Møguleiki var at royna fimleik, badminton, tennis, flogbólt, inniróður og kurvabólt. Eisini var paraítróttur á skrá, og tá kundu fólk spæla boccia, royna hondsúkklu og sportkoyristól. Eisini var ein ítróttaráðgevi til staðar at svara spurningum.
Tiltakið við at hava opið hús er liður í málinum hjá ÍSF um, at ítróttahópurin skal vaksa, og at dentur skal leggjast á rørslugleði og gleðina við ítrótti.
Hvønn dag vóru nógv, sum royndu seg og fingu eitt gott prát um ítrótt og ymsu møguleikarnar at íðka í Føroyum.

### 2.5 Nýggj breiddarpulja

Í sambandi við nýskipanina av Úrvalsstuðulinum, verður á aðalfundinum lagt fram uppskot um eina breiddarpulju. Talan er um 500.000 kr., sum á hvørjum ári skulu stuðla breiddarátøkum, ið feløg - einsæris ella í felag - taka stig til.
Til ber at søkja fígging til verkætlanir, sum tit halda kunnu styrkja breiddina, víðka tykkara virksemið og/ella menna tykkara sjálvbodna felagsskap.
Allar ítróttargreinar kunnu søkja, og treytin er, at tiltakið, sum skipað verður fyri, ikki snýr seg um kapping á høgum stigi, men at megintátturin er hugni, sosiala samvera og felagsskapur í breiðasta høpi.
Tað kann vera tungt fíggjarliga at skipa fyri slíkum tiltøkum - serliga hjá smáum feløgum. Tað kann somuleiðis vera møtumikið at finna stuðlar til slík tiltøk. Men við nýggju breiddarpuljuni er ætlanin, at svarfreistin til umsóknir skal vera í mesta lagi 5 vikur - og tað skal vera skjótt at fáa pengarnar. Søkja feløg einsæris, ber til at søkja um upp til 30.000 kr. Søkja fleiri saman er upphæddin upp til 50.000 kr.
Vónandi verður uppskotið samtykt, og vónandi fer hetta at eggja til fleiri stuttlig tiltøk, har ítróttur, stuttleiki og breiður felagsskapur eru berandi hornasteinarnir.
Við breiddarpuljuni ynskja vit í felag at vaksa um ítróttahópin og leingja um áramálið, ið fólk eru virkin.

## 3.0 Úrvalsítróttur

Innan úrvalsítrótt hevur støðuga framgongdin verið eyðsýnd. Innan fleiri greinar síggja vit í ár søguliga góð úrslit. Í nøkrum førum byggja úrslitini á eina professionalisering í sambondum og feløgum - í øðrum førum á eldhuga og serliga góð evni hjá íðkarunum. Í øllum førum er givið, at góð altjóða úrslit skapa størri áhuga - og harvið størri breidd.

### 3.1 Úrvalsítrótturin fær 1.630 milliónir kr. í 2024

Nevndin í Úrvali hevur játtað 21 umsóknum frá 10 ymsum ítróttagreinum stuðul til úrvalsítrótt í 2024. Talan var um umsóknir til 16 einstaklingar og 5 lið úr ítróttagreinunum taekwondo, fimleiki, badminton, bogaskjóting, flogbólti, frælsum ítrótti, styrki, súkkling, svimjing og hondbólti.
5 ungir íðkarar/lið fáa stuðul úr Úrval umvegis bólk 3. Hesi eru flogbóltur - U16/17 gentir og dreingir. Fimleikur - Ronja Johannesen. Hondbóltur - U06 menn. Badminton - Ranja Joensen. Og ungir úrvalssvimjarar.
At heili 37 umsóknir komu inn um úrvalsstuðul í 2024 er greitt tekin um, hvussu skjótt tað gongur framá við føroyskum ítrótti. Søkt var um tilsamans 6,2 milliónir krónur.

**Yvirlit yvir játtaðar umsóknir**

| | |
|---|---|
| Jóannes Poulsen, bogaskjóting: | 50.000 kr. |
| Sámuel Petersen, bogaskjóting: | 50.000 kr. |
| U16/17 gentur og dreingir, flogbóltur: | 20.000 kr. |
| Aron D. Jacobsen, fimleikur: | 50.000 kr. |
| Ronja Johannesen, fimleikur: | 20.000 kr. |
| A-landslið menn, hondbóltur: | 250.000 kr. |
| U-04 menn, hondbóltur: | 250.000 kr. |
| U-06 menn, hondbóltur: | 20.000 kr. |
| Ranja Joensen, badminton: | 20.000 kr. |
| Hávard Vatnhamar, súkkling: | 100.000 kr. |
| Elisabeth Erlendsdóttir, svimjing: | 100.000 kr. |
| Vár E. Eidesgaard, svimjing: | 100.000 kr. |
| Líggjas Joensen, svimjing: | 50.000 kr. |
| Isak Brisenfeldt, svimjing: | 30.000 kr. |
| Ungir úrvalssvimjarar, svimjing: | 20.000 kr. |
| Niels Áki Mørk, styrki: | 75.000 kr. |
| Pól Hendrikur Andreasen, styrki: | 75.000 kr. |
| Maibritt Reynheim Petersen, styrki: | 75.000 kr. |
| Jónas G. Isaksen, Frælsur ítróttur: | 125.000 kr. |
| Eiri J. Glerfoss, Frælsur ítróttur: | 75.000 kr. |
| Høgni Kunoy Dávason, Taekwondo: | 75.000 kr. |
| **Tilsamans:** | **1.630.000 kr.** |

### 3.2 Úrvalsstuðulin fær nýggja reglugerð

Eitt av átøkunum í nýggju strategiini, sum varð samtykt á aðalfundinum í mai 2022, var at endurskoða reglugerðina fyri Úrval. Í sambandi við endurskoðanina varð ein arbeiðsbólkur settur í februar 2023, og nýggj reglugerð verður løgd fyri aðalfundin í ár. Endamálið við at broyta reglugerðina er, at stuðulin, sum higartil er latin, í stóran mun er farin til at rinda rokningar fyri einstøku íðkararnar/bólkarnar. Lítið er tí komið umhvørvinum, har viðkomandi íðkari sprettur úr, til góðar. Nú verður størri dentur lagdur á at menna umhvørvið, so at okkurt eisini liggur eftir, tá ið einstøku úrvalsíðkararnir gevast.

Í arbeiðsbólkinum sótu Elin H. Joensen, Magnus Tausen og Hávard Vatnhamar, sum umboða starvsnevndina og íðkaranevndina í ÍSF, Páll Isholm, sum umboðar nevndina í Úrvali, og Petur Mittún, sum umboðar umsitingina í ÍSF. Harumframt bleiv Signar Hilmarsson settur sum verkætlanarleiðari.




Sum ein part av endurskoðanini hava eisini Íðkaranevndin, nevndin fyri Úrval, Mentamálaráðið, Fróðskaparsetur Føroya og øll sambondini undir ÍSF havt møguleika at gera viðmerkingar og koma við sínum íkasti til nýggju reglugerðina. Tvey hoyringsumfør hava verið.

Arbeiðsbólkurin hevur eisini samskift við úrvalsítróttaumhvørvini í Danmark, Íslandi og Norra.

Reglugerðin kemur til atkvøðugreiðslu á aðalfundinum 4. mai 2024. Hon kemur ætlandi í gildi í sambandi við Úrvalsstuðulin í 2025.

### 3.3 Nýggj skipan fyri úrvalsíðkarar á miðnámi

Eitt annað mál í sambandi við strategiarbeiðið var at bøta um umstøðurnar hjá úrvalsíðkarum, sum ganga á miðnámi. Nú er nýggj skipan sett í verk, sum loyvir íðkarum at søkja um loyvda fráveru í samband  við kappingar, venjingarlegur og annað.

Tað er ÍSF, sum eftir umsókn frá íðkaranum, metir um og boðar skúlanum frá, hvørt umsøkjarin kann metast sum úrvalsíðkari. Skúlin metir síðani, um umsøkjarin megnar at røkja sínar skúlaskyldur á nøktandi hátt - ella um ískoytisundirvísing ella onnur stuðulstiltøk eru neyðug. Tey, sum verða góðkend sum úrvalsíðkarar, seta seg í samband við ÍSF-vegleiðaran á skúlanum, og so verður ein ætlan løgd fyri skúlaárið í samráð við lærararnar.

Áður var frávera í sambandi við úrvalsítrótt mett sum frávera. Men við nýggju skipanini fáa úrvalsíðkarar á miðnámi nú:

- ÍSF- vegleiðara á skúlanum
- Hjálp til at samskipa skúlagongd og ítrótt
- Miðnámsútbúgving, sum er løgd soleiðis til rættis, at til ber at vera úrvalsíðkari
- Møguleika at umskipa innlatingar

Skipanin er soleiðis, at ÍSF ger eina heildarmeting av hvørjum einstøkum umsøkjara. Fyri at finna fram til, hvørt talan er um úrvalsíðkara ella ikki, hyggja vit millum annað at hesum viðurskiftum:

1. Er næmingurin á einum landsliði ella í einum bruttohópi?
2. Hvør er venjingarmongdin?
3. Hvørjir menningarmøguleikar eru? Her verður metingin hjá venjaranum tikin við.
4. Er venjingin á nøktandi støði til, at viðkomandi kann kallast úrvalsítrottarfólk, og fylgir viðkomandi eini miðvísari venjingarætlan?

Nýggja skipanin er komin sera væl við hjá mongu ítróttarfólkum okkara, sum ofta hava havt stóra fráveru úr miðnámsskúlum orsakað av kappingum og venjingarlegum. 130 ung eru í skipanini skúlaárið 23/24. Nú kunnu tey hava loyvda og skipaða fráveru - heldur enn bara fráveru, sum áður

Vit hava í hesum arbeiði havt sera gott og konstruktivt samstarv við Undirvísingarstýrið, BUMR og miðnámsskúlarnar.

### 3.4 EM í hondbólti í Berlin

Fyrsta endaspælið nakrantíð fyri eitt føroyskt lið gjørdist veruleiki, tá ið hondbóltsmenninir tryggjaðu sær luttøku í EM. Hondbóltsfepurin rakti Føroyar, 10% av føroyingum fóru til Berlin - og tað merktist: bæði í Føroyum, í Berlin og í útlendskum miðlum, sum góvu føroyska liðnum og føroysku áskoðarunum stóran ans.



#### 3.4.1 Slovenia - Føroyar

Fyrsti dysturin var móti Slovenia. Føroyar vóru við so at siga allan dystin, men ein vánalig løta í seinna hálvleiki seldi slovenum dystin. Teir vunnu 32-29 eftir javnleik 13-13 í hálvleikinum. Hondbóltssambandið staðfesti eftir dystin, at væl uppløgdu

føroysku áskoðararnir - hvíti múrurin handan annað málið - var størsti vinnarin í dystinum.
Eftir dystin var Hákun West av Teigum kosin besti leikari í dystinum.

### 3.4.2 Føroyar - Noreg

Fyri fullsettari Mercedes Benz Arena skaptu okkara menn eina risa hondbóltssensasjón. Hóast teir vóru aftanfyri 23-26 stutt fyri dystarlok, megnaðu teir at koma afturíaftur við einum fantastiskum endaspurti. Úrslitið gjørdist ein sensasjonellur javnleikur, 26-26, móti hondbóltsrisanum, Noregi.
Elias Ellefsen á Skipagøtu spældi ein megnardyst og var kosin besti leikari í dystinum.



### 3.4.3 Pólland - Føroyar

Pólland vann seinasta dystin í bólkaspælinum, 32-28 móti Føroyum. Í hálvleikinum var javnleikur 15-15.
Pólland var eitt sterkt lið við stórum og sterkum einstaklingum. Serliga vóru tað vinstri bakkurin, Szymon Sicko, og strikuspælarin, Kamil Syprzak, sum vóru truplir at halda - og sum søktu føroyska liðið.
Elias Ellefsen á Skipagøtu gjørdist besti leikari í dystinum.

### 3.5 Sverri Nielsen til OL fyri aðru ferð

Á OL í Tokyo í 2021 var Sverri Nielsen bara 15 harmuligar hundraðpartar av einum sekundi frá at vinna bronsuheiðursmerki. Men í september 23 megnaði Sverri Nielsen enn einaferð at rógva seg til OL-pláss í singlescullara. Tað ger hann undir donskum flaggi, tí føroyingar ikki kunnu rógva kapp í OL.



Ítróttastjórin hjá Team Danmark, Lars Balle Christensen, fegnast um, at Sverri enn einaferð er við í danska hópinum.
- Sverri telist millum heimsins bestu rógvarar, og tað er hugvekjandi at síggja, hvussu hart hann arbeiðir fyri sínum máli. Tað vísir, hvør styrki býr í honum, at hann longu hevur kvalifiserað seg til OL aftur eftir stóra vónbrotið í Japan, sigur hann.
Olympisku leikirnir 2024 verða hildnir í París, og teir liggja aftur um ólavsøkumundið.

### 3.6 Jónas Isaksen rann seg til EM-gull

Tað skapti nógvar yvirskriftir, tá ið stórtalentið úr Kvívík, Jónas Isaksen, rann seg til EM-gull í Junior-EM í Jerusalem á sumri 23. Tíðin var 45,86, sum var hansara besta tíð.
Í innleiðandi umfarinum hevði Jónas sættbestu tíðina, ið var 46,75.




Jónas er fyrsti føroyingur, sum rennur 400 metrar undir 46 sekund. Umframt at vera føroyskt met, so er hetta eisini norðurlendskt ungdómsmet.
Jónas Isaksen umboðar danska landsliðið til EM, tí Føroyar ikki eru limur í World Athletics, sum er altjóða sambandið fyri frælsan ítrótt.

### 3.7 Onnur góð altjóða úrslit

Tað hava verið ómetaliga nógv góð úrslit í 2023, men vit skulu her nevna tvey burturúr rúgvuni. Ríðing, tí tað er fyrstuferð, at Føroyar fáa heiðursmerki í HM, og rógving, tí vit halda á at standa okkum væl á rógvimaskinunum ár eftir ár.

**Ríðing:**

Á fyrsta sinni hava Føroyar vunnið heiðursmerki í ríðing í HM-kapping í gonguløgum. Talan er um Rakel Brattalíð Tindskarð, ið saman við hestinum Silas vom Worstwald stóð seg sera væl og vann silvur í ungdómsbólkinum. Eisini vunnu tey gull í altjóða kappingini “Icehorse” í Herning og gull í DM. Rakel varð somuleiðis tilnevnd til heiðurin Ársins stjørnuskot á Ítróttafagnaðinum.

**Rógving:**

Føroyar vóru væl umboðaðar í samlaðu EM og HM-kappingini, sum varð hildin í Prag.
Heimsmeistarar gjørdust Zoe E. Dickson, Vár Guriardóttir Hansen og Sarita Kristina Hansen. Sára Maria Johansen gjørd-

ist nr. 2 í sínum bólki.
Vár Guriardóttir Hansen setti somuleiðis nýtt heimsmet í bólkinum 19-29 tungvekt í ein minutt, har hon megnaði at rógva heilar 357 metrar.

## 4.0 Oyggjaleikir

í 2023 vóru Oyggjaleikir hildnir á Guernsey. 113 íðkarar umboðaðu Føroyar í badminton, bogaskjóting, skjóting, borðtennis, golf, súkkling/triathlon, kurvabólti, frælsum ítrótti, svimjing og tennis.
Høvuðsstuðlar hjá ÍSF í sambandi við Oyggjaleikirnar vóru: Sport24, Bakkafrost, Atlantic Airways og SMS.



### 4.1 Flaggberin

Tað var Peter Hentze Niclasen, badminton, ið bar Merkið inn til setanina.
Peter er ein teirra - um ikki tann - sum hevur luttikið á flest Oyggjaleikum tilsamans. Hann hevur verið við til allar oyggjaleikirnar líka síðan 1989, tó undantikið 2013, tá borðtennis ikki var við.

### 4.2 Vatnberin

Tá ið oyggjaleikir verða settir, er siður, at vatn frá øllum teimum luttakandi oyggjunum verður stoytt í eitt felags kar og blandað.
Í Føroyum hevur verið siðvenja, at yngsta ítróttarfólkið ber vatnið.
Á Guernsey var tað 14 ára gamli svimjarin, Líggjas Joensen, ið var yngsta ítróttarfólkið í føroyska hópinum, og tí fekk hann heiðurin at bera vatnið til oyggjaleikasetanina.




### 4.3 Heiðursmerki og tøl

Á Oyggjaleikunum 2024 endaðu Føroyar samanlangt á 4. plássi við 17 gull, 21 silvur og 26 bronsu - tilsamans 64 heiðursmerkjum.
Fremstur gjørdist hópurin frá Guernsey við 125 heiðursmerkjum. Nr. 2 gjørdist Jersey við 126 heiðursmerkjum, og á 3. plássi var Isle of Man við tilsamans 63 heiðursmerkjum - tó við trimum gullmedaljum fleiri enn Føroyar.




24 oyggjar vóru við á Oyggjaleikunum á Guernsey í 2023. Kappast varð í 14 ítróttagreinum, og fleiri enn 2.500 luttakarar vóru við.
Hetta vóru 19. oyggjaleikirnir, og teir vórðu í døgunum 8.-14. juli. Komandi Oyggjaleikir verða á Orkney í 2025.

### 4.4 Oyggjaleikir í Føroyum 2027

Á Oyggjaleikunum á Guernsey varð avgjørt, at Føroyar skuldu verða vertir fyri Oyggjaleikunum í 2031. Eftir ætlan skuldu leikirnir í 2027 vera á Ynys Môn, men av serligum orsøkum tók Ynys Môn seg aftur.
Tí fingu Føroyar í boði at vera vertir fyri Oyggjaleikunum longu í 2027. ÍSF gjørdi skjótt av og tók av møguleikanum.
Talan verður um 24 luttakandi tjóðir og góðar 3.000 íðkarar, sum koma til Føroya at kappast. Hetta verður størsta einstaka ítróttatiltak nakrantíð í Føroyum.
Elin Heðinsdóttir Joensen, foreseti í ÍSF segði soleiðis, tá ið tíðindini vórðu kunngjørd: Hetta kennist sum ein dreymur, ið gerst veruleiki. Vit hava verið klár at skipa fyri oyggjaleikunum í fleiri ár. Tí hevði tað verið leingi at bíðað heilt til 2031. Vit eru klár og merkja stóran stuðul frá føroyska samfelagnum. Vit fara í felag at vísa, at Oyggjaleikirnir 2027 eru í tryggum hondum.
Jörgen Pettersson, formaður í altjóða oyggjaleikanevndini takkaði Føroyum fyri at játta at vera vertir longu í 2027. Í viðmerking segði hann soleiðis: Føroyar hava víst ábyrgd og tikið eitt tak fyri liðið, nú ein av limaoyggjunum møtti avbjóðing, sum ikki bar til at loysa. Hetta er kjarnin í oyggjaleikafamiljuni. Vit eru saman um sigrar eins væl og um avbjóðingar.
Politiska skipanin við løgmanni, Aksel V. Johannsen á odda, hevur somuleiðis stuðlað ætlanini um, at fáa Oyggjaleikirnar til Føroya longu í 2027.

### 4.5 Solby A. Christiansdóttir sett sum oyggjaleikasamskipari

28. februar 2024 varð kunngjørt, at tað verður Solby Christians-

dóttir, sum skal samskipa Oyggjaleikirnar, nú teir koma aftur til Føroya.
Fyrsta uppgávan verður at samskifta við sambondini og ymsu ítróttagreinarnar í Føroyum, sum fara at hava ein stóran leiklut, nú kappingingarnar skulu leggjast til rættis.
Uppgávan fevnir eisini um samskifti við politisku skipanina, kommunur, altjóða oyggjaleikanevndina og hini oyggjaleikalondini.



Solby Christiansdóttir skal hartil samskipa innihaldið og karmarnar um leikirnar, og hon fær ábyrgdina av øllum logistikki – bæði viðvíkjandi kappingum, venjingum og ikki mist gisting.
Starvið sum oyggjaleikasamskipari er fulltíðarstarv, og Solby A. Christiansdóttir tekur við starvinum 1. mai.

## 5.0 Tiltøk

í 2023 vóru fleiri tiltøk, skeið og ráðstevnur, sum ÍSF skipaði fyri. Undirtøkan er góð, og vit merkja, at tey, sum varða av ítróttinum í Føroyum, fegin søkja sær vitan og menning.

### 5.1 Ítróttating: Børn og Ítróttur - skaðar, trýst og fráfall

Á Ítróttatinginum 29. apríl 2023 varð sjóneykan sett á, hvussu vit kunnu skapa trygg umhvørvi, so børn og ung trívast longri, og vit kunnu minka um skaðar, trýst og fráfall.
Grundarlagið undir evninum var staðfestingin av, at 71% av børnum í Føroyum eru virkin í ítrótti/rørslu, men um 15 ára aldur er talið komið niður á 52%. Í aldrinum 16-18 ár eru bara 43% av gentunum, sum siga seg vera virknar í ítrótti/rørslu.
Á tinginum var prátað við eitt foreldrapar at trimum virknum børnum. Eitt vikuskema varð lagt fram, og foreldrini greiddu frá, hvussu tey upplivdu trýstið, sum børnini vóru undir. Tað var greitt, at vit skulu ansa væl eftir, at evnaríku børnini ikki koma undir trýst í fleiri ítróttargreinum og fáa ov stóra ábyrgd. Við einum felags skema, har øll síggja allar venjingar- og kappingartíðir børnunum, ber til at seta spurningarnar – er hetta realistiskt? Er rúm fyri stuttleika? Er rúm fyri hvíld? Er rúm fyri vinum?
Norski granskarin í barna- og ungdómsítrótti, Lars Erik Espendalen, vísti á eitt rák, har børn og ung skulu menna seg til framtíðar avrik. Tey skulu gerast betur fyrr og fylgja eini langtíðarmenning. Sambært Lars Erik Espendalen er hetta eitt skaðiligt rák.

Annika Helgadóttir og Monika Mohr hava gjørt eina kvalitativa kanning fyri Fólkaheilsustýrið um sálarliga heilsuna hjá ungum. Tey uppliva, at tey antin skulu leggja sera nógva tíð og orku í venjing - ella gevast. Tað tykist ikki vera rúm fyri at venja fyri at vera partur av felagsskapinum.
Bjarti Thomsen og Jóhan Esmarsson Heimustovu fysioterapeutar, greiddu frá, at støðugt fleiri og støðugt yngri børn og ung fáa skaðar, ið koma av ov nógvari eintáttaðari venjing.

### 5.2 Skeið fyri venjarum – Venjari 1

Regluliga skipar ÍSF fyri venjaraskeiðum fyri at førleikamenna venjarar og fyri at góðskutryggja tey ítróttaligu tilboðini, sum eru til børn og ung í ítróttafeløgunum í Føroyum.
Í heyst skipaði ÍSF fyri trimum venjaraskeiðum í Havn (september), í Eysturoy (oktober) og í Suðuroy (november). Undirvíst varð ein leygardag og ein sunnudag.
Eisini tók ítróttabreytin hjá Nám X í Eysturskúlanum venjaraskeið.
Undirvísarnir, Heri Ziska og Eyðstein Simonsen, fóru ígjøgnum nógv ymisk evni: ítróttanámsfrøði, ítróttaumhvørvi, menning hjá børnum, venjing, trygd og ábyrgd, etikkur og moralur. Hví venja? Og hvussu? Upphiting, anatomi og fysiologi, venjingarprinsipp og undirvísingarprinsipp.
Skeiðið er ein partur av venjaraútbúgvingini hjá DIF, Danska Ítróttasambandinum, og til ber eisini at byggja víðari á skeiðið.
Málbólkurin var venjarar, hjálparfólk og leiðarar hjá børnum og ungum - og annars øll, sum hava áhuga í og ábyrgd av børnum og ungum, sum eru virkin í ítrótti.
Umleið 60 fólk tóku venjaraskeiðið, sum nú verður endurskoðað. Ætlanin er at leggja ein part av skeiðnum út sum E-læring.

### 5.3 Fult hús til ráðstevnu í Kongshøll

Tað var fult hús, tá ið ÍSF og Setrið skipaðu fyri Føroya fyrstu ítróttaráðstevnu. Størsti parturin av framløgunum vóru á føroyskum - einans tvær á enskum ella donskum. Áhoyrararnir fingu innlit í, hvussu nógv hendir á rørslu- og ítróttaøkinum í Føroyum – og hvussu stórar ætlanirnar eru.




**Positiv motivatión**

Fyrsti partur snúði seg um børn, motivatión og rørslu. Vit fingu staðfest týdningin av, at venjingarumhvørvi fyri børn skulu vera

stuðlandi og leggja upp til positiva innaru motivatión, tí soleiðis skapa vit grundarlag fyri einum longum lívi í rørslu. Greitt var eisini frá, hvussu venjarar og umhvørvið annars kunnu skapa góða og positiva motivatión – og hvussu vit hinvegin kunnu demotivera íðkararnar við skeivum atburði.

**Gagnligu árinini av skipaðari rørslu í skúlanum**

Vit fingu eisini staðfest, at rørsla í skúlum hevur jaliga ávirkan á trivnað, innaru motivatión og evnini hjá næmingunum at hugsavna seg fakliga. Vit sóu dømi um eina stóra verkætlan í Danmark og fingu síðani brellbitar frá nýggjastu føroysku granskingini um rørslu í skúlum, sum Helgi Winther Olsen stendur fyri.

Helgi hevur gjørt royndir í skúlunum í Suðuroy við rørslulæru á tímatalvuni tríggjar ferðir um vikuna. Hann hevur sæð munandi broytingar hjá flestu næmingunum. Serliga teimum, sum ikki røra seg so nógv.

Parturin um børn endaði við einum stuttum innliti í átakið “Skúlaleikir”, har áleið 85% av næmingunum í miðdeildum kring landið luttaka. Tað vísir seg vera stórur eftirspurningur eftir tilfari og átøkum, sum leggja upp til rørslu í skúlanum.

**Føroysk ítróttagransking í altjóða høpi**

Tórur Sjúrðarson og MayBritt Skoradal, granskarar, greiddu frá stórum granskingarverkætlanum í Føroyum, sum snúgva seg um rørslu sum heilivág, og hvussu stóran mun rørsla hevur á heilsustøðuna hjá eldri ella sjúkum fólki. Føroyar egna seg væl til gransking, og vit hava prógvað, at vit kunnu framleiða virðismikla vitan til altjóða ítróttagransking.

**Tey bestu**

Seinasti partur snúði seg um “tey bestu”, og hvussu vit í felag kunnu arbeiða saman um at náa enn hægri tindum. Vit hoyrdu um nýggju Úrvalsskipanina, sum veitir úrvalsíðkarum fíggjarligan styrk, og sum frameftir í størri mun skal menna umhvørvið og gagna fleiri – heldur enn “bara” at rinda rokningar hjá einstøkum íðkarum.

Magni Mohr vísti á, at vit við jøvnum millumbilum náa stórum úrslitum, men tað áhugaverda er, hvussu vit kunnu skapa støðuga menning, og hvussu vit - tvørtur um ítróttagreinar - kunnu læra av hvørjum øðrum og brúka vitan hvør hjá øðrum. Av tí, at vit eru ein lítil tjóð, kunnu vit samstarva og samskapa meira og betur enn aðrar stórar tjóðir.

**Orðaskifti um ítrótt**

Dagurin endaði við práti millum Magna Mohr, professara í ítrótti, Petur Mittún, aðalskrivara í ÍSF, Mark Marcher, samskipara hjá HSF, og Eyðvør Klakstein, ítróttasálarfrøðing.

Tey umrøddu eitt nú týdningin av, at børn venja ymsar ítróttagreinar so leingi, sum gjørligt. Tess seinni børnini verða tvungin at velja eina ítróttagrein fram um aðrar – tess betur. Tey komu eisini inn á munin á kvinnuligum og mannligum íðkarum, og hvussu hetta má hugsast við í ítróttatilboðini til ávirkavist dreingir og gentur.

Ein væl vitjað og væleydnað ráðstevna um ítrótt. Tann fyrsta av sínum slag, men ikki tann seinasta. Ætlanin er, at næsta ráðstevna um ítrótt verður komandi ár.

## 5.4 ÍtróttaFAGNAÐUR 2023

Leygarkvøldið 10. februar 2024 var Løkshøll í Runavík karmur um ÍtróttaFAGNAÐIN, sum ÍSF skipaði fyri.

Seks heiðurslønir vóru latnar, umframt Heiðursskjal Poul E. Petersen, og vinnararnir fingu steyp, skreytblað og peningagávu. Tvær nýggjar heiðurslønir vóru: Ársins venjari og Ársins sólstrála.

Høvuðsstuðlar vóru Poul Hansen, Runavíkar Kommuna, MBM, Smyril Line, SMS og Atlantic Airways.





### 5.4.1 ÍtróttaNAVNIÐ 2023

**A-landsliðið hjá monnum í hondbólti.**

Gongdin í føroyskum hondbólti hevur verið sera góð seinastu árini. Kortini var árið 2023 ein marknaðarsteinur, tí A-landsliðið hjá monnum vann sær fyrstuferð pláss í EM-endaspælinum.

Allir føroysku leikararnir spæla longu – ella eru á veg at spæla – yrkis- ella sáttmálahondbólt. Millum annað spæla tveir teirra í toppliðum í Bundesliguni í Týsklandi, sum verður mett at vera fremsta hondbóltsdeildin av øllum.

Fyri føroyskan hondbólt kann týdningurin av hesum bragdi ikki lýsast við orðum. Og fyri føroyskan ítrótt sum heild er hetta somuleiðis ein áminning um týdningin av at seta sær høg mál og síggja møguleikar heldur enn forðingar.

Hini tilnevndu vóru KÍ - besta liðið hjá monnum, og Jónas Gunnleivson Isaksen, rennari.

### 5.4.2 ÍtróttaSTJØRNUSKOTIÐ 2023

**Jónas Gunnleivsson Isaksen.**

Jónas tók øll á bóli, tá ið hann á Oyggjaleikunum á Guernsey legði alla mótstøðu afturum seg og vann gull í bæði 200 m og 400 m renning. Hann setti oyggjaleikamet á 400 m og ivaleyst eisini á 200 m, har tíðtøkan tó miseydnaðist.

Men Jónas prógvaði tó skjótt, at úrslitið á oyggjaleikum ikki var hepni. Hann sló av sonnum navn sítt fast, tá hann gjørdist Evropameistari hjá U20 við tíðini 45,86 sek – bara 17 ára gamal. Tíðin var skjótari enn danska U20 metið og hann setti eisini nýtt norðurlendskt juniormet.

Hini tilnevndu vóru Rakel Brattalíð Tindskarð, ríðing, og U19 landsliðið hjá monnum í hondbólti.

### 5.4.3 ÍtróttaELDSÁLIN 2023

**Eyðdis Ellendersen úr TB.**

Síðani Eyðdis Ellendersen á fyrsta sinni kom í nevndina hjá TB, hevur hon lagt nógva tíð og orku í at hjálpa Tvøroyrar Bóltfelag við øllum hugsandi viðurskiftum. Bæði í góðum og truplum tíðum.

Eyðdis sigur aldri nei, tá hon verður spurd. Heldur ikki til uppgávur, sum liggja uttanfyri hennara øki. Eitt skifti var hon enntá forkvinna í TB.

Jaligi hugburðurur hennara smittar bæði nevndarlimir og hjálparfólk í felagnum og ger trivnaðin góðan. Hetta positiva huglagið í TB hevur við sær, at fólk uttanfyri vilja sleppa uppí felagsskapin.

Hinir tilnevndu vóru Jan Johannesen, flogbóltur, og Jón Brekku, tennis.

### 5.4.4 ÍtróttaVENJARIN 2023

**Heri Ziska, frælsur ítróttur.**

Ímyndin av frælsum ítrótti í Føroyum man helst vera Heri Ziska. Hann íðkaði kastiítrótt í nógv ár og vann hópatals heiðursmerki á høgum støði. Samstundis setti hann seg tó eisini inn í allar greinarnar í frælsum ítrótti og fór at læra frá sær.

Hóast Heri er knýttur at Hvirluni sum venjari, er hann eisini instruktørur hjá øðrum venjarum og ger soleiðis sítt til at seta við. Hann er gávumildur við sínum royndum, síni vitan og mongu hugskotunum um, hvussu vit í Føroyum frameftir kunnu styrkja frælsa ítróttin.

Í uppskoti vóru eisini Wong Fai Yin, badminton, og Sarita Kristina Hansen, rógving.

### 5.4.5 ÍtróttaFELAGSSKAPURIN

**Sandoyar Ítróttarfelag - B71**

B71 er ein savnandi felagsskapur fyri alla Sandoynna. Her eru bæði børn og vaksin virkin, og flestu fólk í oynni munnu onkursvegna hava eitt tilknýti til felagið – tað veri seg sum íðkarar, venjarar, áskoðarar ella hjálparfólk annars.

Fyri eina lítla oyggj sum Sandoynna hevur tað ómetaligan týdning, at okkurt er, sum savnar øll. Tað skal ikki undirmetast, hvønn sosialan, heilsuligan og lokalan týdning felagið hevur.

Stórt fokus hevur verið á tey sjálvbodnu. Tey eru grundvøllurin, sum alt virksemið byggir á, og tey gera tað møguligt at íðka í Sandoynni. Seinnu árini er limatalið nógv vaksið, og tað merkist eisini aftur í trivnaðinum í felagnum.

Í uppskoti vóru eisini flogbóltsfelagið Mjølnir og Hondbóltssamband Føroya.

### 5.4.6 ÍtróttaSÓLSTRÁLAN

**Jóhanna Østerø og Gyða B. Djónadóttir úr Neistanum.**

Gyða og Jóhanna eru glaðar, tá tær koma í høllina, møta væl upp og skapa gott samanhald í hópinum. Tær duga væl at taka ímóti yngru gentunum og at fáa allar at kenna seg væl.

13 ára gomlu Gyða og Johanna hava í tvey ár verið hjálparvenjarar hjá gentunum, sum nú eru 9-10 ár. Tað er eyðsýnt, at genturnar tíma enn betur at venja, tá hjálparvenjararnir eru har. Gyða og Johanna duga væl at rósa gentunum.

Samanumtikið eru Gyða og Johanna fyrimyndir fyri øll í felagsskapinum – bæði yngru genturnar, liðfelagar sínar og ikki minst tey vaksnu.

Í uppskoti vóru eisini Ári Fríðason Jensen, borðtennis, og Gunnvá Fríða Bárðardóttir Nielsen, hondbóltur og fimleikur.

### 5.4.7 Heiðursskjal Poul E. Petersen

**Jan Günther.**

Fyri sítt ótroyttiliga sjálvbodna arbeiði fyri Havnar Judofelag - og fyri judo-ítróttin í Føroyum yvirhøvur.

Jan var við til at stovna Havnar Judofelag í 1971 og eisini Judosamband Føroya í 1981. Jan hevur ótroyttiliga arbeitt fyri at menna judo-ítróttin bæði her heima, men eisini altjóða.

Jan eigur stóra æru í, at tað í dag eru seks judofeløg í Føroyum, og at judo er í stórari menning.

Saman við heiðursskjalinum fekk Jan Günther eisini gullnál frá ÍSF.



## 6.0 Serligar hendingar hjá ÍSF

Umframt at ÍSF skipar fyri nógvum tiltøkum, ið venda sær úteftir til almenningin og føroyskt ítróttalív sum heild, ja, so hendir eisini nógv handan leiktjøldini hjá ÍSF.

### 6.1 Katrin á Neystabø sett í fast starv - til frama fyri felagsskapin

Í august 2023 varð Katrin Dam á Neystabø sett í fast starv sum ítróttaráðgevi við høvuðsábyrgd fyri breiddarítrótti.
Koronatíðarskeiðið vísti okkum ovurstóra týdningin av felagsskapinum. Tað hevði stóra ávirkan á strategiiarbeiði 2022-2026, har felagsskapurin av álvara kom í miðdepilin.



Áðrenn hon varð sett í fast starv, var Katrin Dam á Neystabø í verkætlanarstarvi hjá ÍSF í tvey ár, har hon eisini tók sær av breiddarítrótti. Eitt nú var hon við til at leggja lunnar undir Skúlaleikir, ið nú eru vorðnir fastur táttur á hvørjum ári.
Afturat skúlaleikum hevur Katrin Dam á Neystabø ment eitt breiddartilboð til ung á miðnámi, umframt at hon hevur skipað fyri eini rúgvu av ráðstevnum og fyrilestrum um børn, ung og breidd.

### 6.2 Heri Simonsen heiðraður við gullnál ÍSF

Á Oyggjaleikunum á Guernsey varð skipað fyri hugnaligari løtu, har føroysku fjølmiðlafólkini og umboðini fyri ÍSF hittust.
Á hugnaløtuni varð Heri Simonsen, fjølmiðlamaður við serligum tokka til ítrótt, heiðraður við gullnál ÍSF. Gullnálin verður givin teimum, ið hava gjørt eitt munagott arbeiði fyri føroyskan ítrótt. Heri hevur gjøgnum nógv ár skrivað, varpað út og greitt frá føroyskum ítrótti. Við ótroyttiligum ágrýtni hevur hann greitt frá stórum og smáum, fingið fólk inn í útvarpsstovuna at siga frá og sjálvur leitað sær út fyri at nema sær størri kunnleika um, hvat fyriferst innan ítróttaheimin.
Hann hevur varpað ljós á ymsu ítróttagreinarnar og hevur eisini verið við at bera út kunnleikan um strategiina hjá ÍSF, Skúlaleikir og Føroyaleikir. Heri hevur somuleiðis verið fastur fúsur sum frásøgumaður á Oyggjaleikunum.

### 6.3 Nýggj Antidopingavtala undirskrivað

Í august vóru umboð fyri Anti Doping Danmark í Føroyum.
Endamálið var eitt nú at undirvísa dopingeftirlitsfólkunum her og at skriva undir nýggja samstarvsavtalu við Anti Doping Føroyar.
Samstarvsavtalan við Anti Doping Danmark tryggjar, at vit støðugt verða dagførd í krøvunum, ið sett verða doping-myndugleikum - og at dopingkontrollantar í Føroyum kunnu útbúgva seg gjøgnum Anti Doping Danmark. Avtalan er við til at tryggja fakliga støðið í Føroyum.
Stórur partur av arbeiðinum hjá Anti Doping Føroyar er at kunna ítróttasambond og íðkarar, og við avtaluni kunnu vit brúka undirvísingartilfar og talgildu undirvísingarpallarnar hjá Anti Doping Danmark. Í alt 587 fólk innan ymiskar ítróttagreinar í Føroyum hava tikið skeið í e-læring í 2023.  Tey eru íðkarar, venjarar, hjálparfólk o.o. sum eru rundan um ítróttin.
Stjórin í Anti Doping Danmark, Kim Højgaard Ravn, er eisini sera væl nøgdur við samstarvið.
- Vit hava altíð havt eitt sera gott samstarv, bæði tá talan er um vegleiðing til dopingeftirlit og til undirvísing. Nýggja avtalan ger, at góða samstarvið heldur fram, segði hann.

### 6.4 Pál Joensen nýggjur samskipari í Anti-Doping Føroyum

15. februar 2024 tók Pál Joensen við starvinum sum samskipari hjá Anti-Doping Føroyum.
– Á míni ítróttarleið havi eg tíverri upplivað, at ítróttin ikki altíð er rein og rættvís. Eg havi havt stóra virðing fyri teimum, sum arbeiða fyri at halda ítróttina dopingfría. Tí eri eg sera glaður fyri møguleikan til at geva mítt íkast til antidopingarbeiðið, sigur Pál V. Joensen um nýggja starvið.



Eisini Jónas Tór Næs, forfólk í Antitopingstýrinum, fegnast um nýggja samskiparan.
– Vit í Antidoping Føroyum eru ómetaliga glað fyri at hava fingið Pál við umborð og gleða okkum til at arbeiða fyri einum reinum, heiðurligum og dopingfríum ítrótti saman við honum. Samstundis vilja vit nýta høvi at takka Jarvin Feilberg Hansen fyri hansara stóra arbeiði á økinum.
Uppgávurnar hjá Antidoping Føroyum eru at taka dopingroyndir av ítróttafólki í Føroyum, at melda og leggja fram mál um doping, at kunna um doping, at taka lut í altjóða arbeiði fyri at fyribyrgja doping og at ráðgeva og kunna almennar myndugleikar um viðurskifti, ið eru viðkomandi fyri økið.
Í 2023 vórðu 36 dopingroyndir tiknar í hesum ítróttagreinum: Fótbólti, hondbólti, Innilróðri, Kapplróðri, Kurvabólti, Svimjing, Styrkilyfting.

Allar royndirnar vóru negativar. Anti Doping Føroyar fegnast um, at føroysk ítróttafólk tykjast vera tilvitað um antidoping.
Ætlanin hjá Anti Doping Føroyum er eisini at fáa samstarvsavtalur við venjingarmiðstøðirnar, so at doping eisini verður bannað har.

### 6.5 Klintrisambandið er nýtt menningarsamband

Endamálið við Klintrisambandi Føroya er at skipa og menna ítrottargreinina í Føroyum. Millum annað við at skipa fyri almennum kappingum, at útbúgva venjarar og instruktørar og at menna trygdina í samband við Klintring.
Fyrsta nevndin í Klintrisamband Føroya telur Theodor Kapnas, Absalon Eysturoy og Rógva Laksáfoss.
Klintring er ímillum tær skjótast vaksandi ítróttargreinarnar í vesturheiminum, og á seinasta OL var klintring við fyri fyrstu ferð.
Ein minni buldrihøll er í M.A Winters gøtu og ein klintrihøll burturav í Havn. Uttandura leiðirnar, ið eru bóltaðar, fevna um Norðradal, norðoyggjar, Eysturoy - á Nesi og Tinghellu í Rituvík - og so eina góða leið í Suðuroy, sum Ítrottarháskúlin í Vági javnan brúkar. Fleiri klintriveggir eru at síggja í skúlum, í kommunalum økjum og í ítrottarhallum.
Í løtuni er bert eitt klintrifelag í Føroyum. Tað er Havnar Klintrifelag, sum hevur hølir niðri á “Bacalao” á vestaru bryggju.
Fólk uttanfyri Havnina eru eisini limir. Felagið veitir útgerð til at byggja leiðir og skipar fyri kappingum, venjingum og skeiðum fyri allar Føroyar.

### 6.6 ÍSF flutt í nýggj høli

1. november 2023 flutti ÍSF enn einaferð.
Síðani gamla ÍSF-húsið varð tikið niður fyri at gera pláss til nýggja langhylin og útbyggingina av svimjihøllini í Gundadali, hevur ÍSF húsast í einum sethúsum á Frælsinum.
Men eftir umleið tvey ár á Frælsinum eru skrivstovan nú flutt oman á Eystaru Bryggju 30, har vit húsast á ovastu hædd - í hølunum, sum Taks áður helt til.

### 6.7 Erhardt Næs lagt árarnar inn

Tann 31. august bórust boðini um, at Erhardt Næs, fyrrverandi formaður ÍSF, var farin um sýn.
Erhardt vaks upp í Hvalba, men kom til Havnar í 1946 at arbeiða.
Hann gjørdist skjótt partur av ítróttaumhvørvinum i Havn, og serliga kappróðurin hevði hansara áhuga. Tað var eisini innan kappróðurin, at lunnarnir vórðu lagdir til langa lívið hjá Erhardt innan ítróttafyrisiting.
Erhardt var formaður í Havnar Róðrarfelag árini 1954 til 1959 og aftur 1962 til 1964. Hann var eisini formaður í Tórshavnar Ítróttarráð eitt skifti. Í 1962 varð hann valdur í nevndina fyri Ítróttasamband Føroya, har hann sat, til hann legði frá sær í 1978. Árini 1964 til 1975 var hann skrivari - og frá 1976 til 1978 var hann formaður.
Fyri drúgva arbeiði sítt hevur Erhardt fingið silvur- og gullmerki ÍSF, umframt hægsta heiðursmerki ÍSF: gullmerki við bjálka.
Vit lýsa frið yvir minnið um fyrrverandi formannin, sum í áratíggju tænti føroysku ítróttini á besta hátt.



### 6.8 Størri stuðul frá politisku skipanini

ÍSF vil at enda rósa politisku skipanini og landsstýrinum, ið nú hevur raðfest ítróttin munandi á fíggjarlógini.
Vit eru takksom og fegnast, nú játtanin til ÍSF hækkaði við tveimum milliónum. Tað hevur alstóran týdning fyri okkara virksemi.
Vit taka hetta sum eitt greitt tekin um, at sitandi samgonga tekur ítróttin í álvara og virðismetir tað stóra arbeiðið, vit gera - bæði á breiddar- og úrvalsstigi.
Eisini tá ið talan er um Oyggjaleikir, hevur politiska skipanin staðið stinn saman við ÍSF og bjóðað Føroyar fram

## 7.0 Útgangur

ÍSF hevur nú 85 ár á baki.
Ein gomul dama, hyggja vit at stovningardegnum. Men hyggja vit at avrikinum hetta farna árið, so eru eingi ellismein at hóma.
Her er full ferð framá.
Framvegis er veiggj í hesi gomlu.
Strategiin hevur av álvara fingið flog, og vit síggja hvussu tað lyftir føroyskan ítrótt - bæði á breiddar- og á úrvalsstigi - at vit arbeiða í felag fram ímóti felags málum. Vit síggja sprettandi samstørv, vit síggja eldhuga og vit síggja styrknandi felagsskap.
Og nú vit av álvara fara undir fyrireikingarnar til Oyggjaleikirnar 2027, vænta vit, at tað í enn størri mun fer at síggjast á ferð og framgongd. Á samstørvunum og slóðbrótandi avrikum.
Í roynd og veru kunnu vit staðfesta, at formurin ongantíð hevur verið so góður, sum nú. Vit hava sanniliga onga orsøk at smæðast. Hvørki her heima – ella í altjóða høpi.
So vit ætla okkum at blíva við at koyra á.
Sjálvt um vit eru blivin heili 85 ár.

# Býtið 2018-2024




# 2023: Býtið, Altjóða puljur og Úrval



# Umboðstingið


© Mynd: Ólavur Frederiksen

# Starvsnevndin



# Badminton

Badmintonsamband Føroya / bsf@bsf.fo / Tel 582300 / www.bsf.fo

**Sjálvboðin eru ein styrkur hjá badminton, sum vit á ongan hátt kunnu vera fyriuttan. BSF fer at arbeiða við hesum bólkinum komandi tíðina og vita, hvussu ber til at fjálga um tey.**

## Strategi

**Breidd - Úrval - Sjálvboðin - Ítróttagleði:**

Vit eru partur av Skúlaleikum og Parabadminton, og bæði samstørvini eru gevandi og skapa nýggj sambond í okkara ítrótti. Nógvir ungir leikarar eru farnir at spæla badminton, eftir at vit fóru í holt við samstarvið við ÍSF um Skúlaleikir. Hetta kappingarárið hava vit havt fleiri breiddarvenjingar fyri leikarum í U11, U13, U15 og U17/19. Her hava spælarar vant við góðum venjara og saman við spælarum úr øðrum feløgum. BSF hevur fingið nógvar positivar afturmeldingar frá okkara breiddarvenjingum, har ætlanin var at skipa eina stuttliga og øðrvísi venjing fyri breiddini, sum eisini kann styrkja samanhaldið. Hesar venjingarnar gjørdu, at MBF av sínum eintingum skipaði fyri einari kapping fyri leikarum í U11-13 í C og D bólkinum.

Fyri úrvalsleikarum verður skipað talentvenjing fyri U15, U17 og U19 leikarum eina ferð um mánaðin. Bruttohópurin hjá seniorum venur hvønn leygardag. Hjálparlandsliðsvenjarin venur bruttohópin, og Rúni Øster hevur í ár vant talenthópin. Vit royna at skipa kappingar fyri flest allar úrvalsleikarar uttan fyri Føroyar. U15 er við eina ferð um árið, U17/19 tvær ferðir um árið og senior spælarar oftari. Somuleiðis eggja vit spælarum til sjálvir at fara uttanlands. Eitt av málunum er at kunna stuðla spælarum, sum vilja fara til m.a. Future Series kappingar.

Sjálvboðin eru ein styrkur hjá badminton, sum vit á ongan hátt kunnu vera fyriuttan. BSF fer at arbeiða við hesum bólkinum komandi tíðina og vita, hvussu ber til at fjálga um tey.

## Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**

4 FM fyri børn og ung í einmansleiki, fyri lið, í tvímansleiki og í blandaðum tvímansleiki.

3 kappingar í tvímansleiki og blandaðum tvímansleiki.

5 Grand Prix kappingar í einmansleiki fyri bæði børn, ung og vaksin.

FM seniorar Kontrast FM í einmansleiki, í tvímansleiki og í blandaðum tvímansleiki.

Stuðlað kapping, har íslendskir leikarar komu til Føroya, HBF skipaði fyri.

Summarlegur í Klaksvík og Tórshavn, sum blivu stuðlaðar við bóltum.

U9 og U11 kapping, mars 2023 - fyri at styrkja breiddarumhvørvi

**Kappingar í uttanlands:**

EM fyri lið, Lettand, EM U17

Future series Reykjavík, januar 2023, senior

DM fyri lið, Danmark, kapping fyri seniorar sum fyrireiking til Oyl

ISI cup, Danmark, kapping fyri leikarum U17 og U19, mars 2023

Farum mai 2023, ungdómsleikarar U15

Oyggjaleikir Guernsey, kapping fyri seniorar, juli 2023

Kapping í Ikast, U17, U19 og seniorspælarar, august 2023

Small Nations á Malta, kapping fyri seniorar, november 2023

## Virksemi annars

Nógv virksemi steðgaði vegna korona, og hetta hava vit í 2023 arbeitt við at fáa í gongd aftur. Beint nú hava vit eina umsókn liggjandi hjá Badminton Europe (BEC), har ætlanin er, at venjingarlegan fyri spælarar úr Grønlandi, Íslandi og Føroyum skal byrja aftur. Um BEC játtar hesum, verður venjingarlegan í Føroyum 5.-11. august 2024.

Í 2023 var Small State fyri fyrstu ferð hildið. Kappingin var í Malta. Føroyar stóðu seg væl og fingu eitt flott fjórða pláss. Hendan kappingin verður aftur í 2024 á Kýpros.

Somuleiðis kappaðust okkara U17 spælarar til EM fyri lið, har vit ikki komu víðari í bólkinum, men vunnu tó bæði sett og dystir.

Størsta avrikið í 2023 var, tá ið okkara landslið vann gull í liðkappingini á oyggjaleikunum, og harafturat vunnu átta heiðursmerkir í einstaklingakappingini. Søguliga gott Oyggjaleikaúrslit hjá badminton.

Í løtuni søkja vit eftir nýggjum landsliðsvenjara og mugu eisini finna loysn við hjálparlandsliðsvenjara.

## Framtíðarætlanir

Av øðrum ætlanum fyri komandi árini ætla vit at arbeiða við hesum:

Ætla at skipa fyri enn fleiri breiddarvenjingum og Shuttle time



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

venjingum fyri lærarum.
Sosial átøk fyri sjálvboðin og spælarar.
Framhaldandi úrvalsvenjingar við ungdómslandsliðum, U15, U17 og U19.
Framhaldandi vikuligar venjingar fyri seniorar.
Saman við landsliðsvenjaranum skipa nøkur venjaraskeið/hugskotsdagar til tey, sum eru venjarar hjá leikarum kring landið.
Gera Facebook-bólk til leikarar, har tey kunnu samskifta um badmintonlegur og kappingar uttanlands, so at tey kunnu hjálpa hvørjum øðrum við at velja, hvat er vert at fara til.
Luttaka í kappingum í Danmark og aðrastaðni í Evropa, so góða

## Feløg og limatøl

| | |
|---|---:|
| HBF | 350 |
| KBF | 60 |
| ÍF | 40 |
| MBF | 30 |
| VÍF | 40 |
| Nápur | 35 |
| **Í alt** | **555** |

### Nevndarforfólk:
Katrin Jacobsen

### Nevndarlimir:
Mariann Øster, næstforfólk
Gunnar Gregoriussen, nevndarlimur
Sofía Olsen, nevndarlimur/aðalskrivari
Johnny í Grótinum, nevndarlimur

### Aðrar nevndir:
**Kappingarnevnd:**
Laufey Ó. Hansen og
Thurid í Buð leggja allar kappingar til rættis sambært galdandi reglugerð

**Dómsnevnd:**
Fróði Hansen
Aksel Poulsen
Magnus Gaard, viðgera og kunnu taka avgerðir í kærumálum

### Lønt starvsfólk:

| | |
|---|---|
| Sofía Olsen, aðalskrivari | 0,2 |
| Aksel Poulsen, fíggjarfólk | 0,1 |

# Bogaskjóting

Bogaskjótisamband Føroya / bskf@bskf.fo / Tel 225077 / www.bskf.fo

**Ætlanin er eisini at brúka meira orku, íroknað fíggjarliga orku, upp á ítróttar-upplivingar hjá teimum yngstu skjúttunum - at geva teimum okkurt at stíla eftir, nakrar gularøtur.**

## Strategi

Breidd - Úrval - Sjálvboðin - Ítróttagleði

BSKF hevur sett sjøtul á átøk, sum skulu gera bogaskjóting sjónligari sum ítrótt í Føroyum. Miðlingin er intensiverað við tí fyri eyga at promovera ítróttagreinina, og Bogaskjótisambandið vil aktivt hjálpa teimum fýra feløgunum at fáa fleiri íðkarar. Sum liður í hesum arbeiði er skrivari/samskipari nú settur við hægri starvsbrøki enn áður. Miðling og eksponering av ítróttini hava hægstu raðfesting í arbeiði hansara. Økta fokuseringin upp á venjara- og venjingarpartin skal eisini stimbra hugin hjá ungum skjúttum at halda fast í bogaskjótingini, umframt at stimbra úrvalsumhvørvini og eggja evnaríkum skjúttum til kanska at seta sær eitt sindur hægri mál - tó altíð realistisk mál. Eydnast tað at fáa fleiri ungar íðkarar, fer tað í sær sjálvum at gagna breiddini og styrkja tann partin. Ætlanin er eisini at brúka meira orku, íroknað fíggjarliga orku, upp á ítróttarupplivingar hjá teimum yngstu skjúttunum - at geva teimum okkurt at stíla eftir, nakrar gularøtur. Tað kundi til dømis verið betri møguleikar at sleppa til kappingar uttanlands av og á.

## Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**

Í vetrarhálvuni: Innandurakappingar í bogaflokkunum recurve, compound og barboga (barebow) fyri børn í frástøðunum 12 og 15 metrar. Enda við FM-kapping.

Í vetrarhálvuni: Innandura Grand Prix-kappingar fyri vaksin við recurve-, compound- og barbogum í 18 metra frástøðu. Enda við FM-kapping og Grand Prix-avgerð.

Summar: FM uttandura á fløtuni í Hoydølum.

**Kappingar uttanlands:**

Nytårspokalen, innandurakapping í Taastrup í Danmark 7. januar. Luttakararnir rinda alt sjálvir, men BSKF samskipar.

Frederiksborgpokalen, innandurakapping í Hillerød í Danmark 5. februar. Luttakararnir rinda alt sjálvir, men BSKF samskipar.

Jóannes Poulsen, compound, var við í altjóða kapping í Nimes í Frankaríki 21.-22. januar. Tríggir úrvalsskjúttar, Jóannes Poulsen og Nikkel Petersen, compound, og Hans Petur Højgaard, recurve, vóru teknaðir til European Archery Indoor Championships í Samsun í Turkalandi.

Hans Petur Højgaard, recurve, og Jóannes Poulsen, compound, vóru meldaðir til European Archery indoor Championships, sum skuldi verða í Samun í Turkalandi í februar. Kappingin bleiv avlýst vegna jarðskjálvta.

Jóannes fór í staðin til eina world cup-kapping í Antalya Turkalandi í apríl. Í mai var hann við í einari altjóða kapping í Kroatia.

Um mánaðarskiftið juni-juli vóru fýra ungir skjúttar við í kappingini um norðurlendsku ungdómsmeistaraskapirnar, NUM, í Larvik í Noregi. Her vann compoundskjúttin, Sámuel Petersen, NUM í aldursbólkinum U21.

8.-14. juli var bogaskjúttalandsliðið við í Oyggjaleikunum á Guernsey, har skjúttarnir vunnu fleiri heiðursmerki - eisini fleiri gullheiðursmerki.

Um mánaðarskiftið juli-august vóru Jóannes Poulsen, Jógvan Niclasen og Sámuel Petersen, allir compound, og Hans Petur Højgaard, recurve, í uttandura HM-kapping í Berlin.

Í november tóku Jóannes Poulsen, Nikkel Petersen og Jógvan Niclasen, allir compound, lut í altjóða kapping í Eindhoven í Hollandi. Jóannes Poulsen fór beinleiðis víðari til Luksemborg, har hann var við í eini aðrari altjóða kapping.

## Virksemi annars

Arbeiðið at styrkja og menna venjingina hjá úrvalsskjúttunum heldur fram. Samstarvið við donsku venjararnar Martin Damnsbo og Søren Ipsen vísir seg at rigga væl. Teir hava hvør sínar styrkir, Martin Damsbo er greitt tann, sum kann motivera og lyfta úrvalsskjúttarnar uppaftur longri upp í styrki, meðan Søren Ipsen kanska serliga kann geva íblástur til breiddina.

Í juni, stutt áðrenn føroysku bogaskjúttarnir skuldu í eldin, fyrst á Oyggjaleikum og síðani í uttandura HM, var skipað fyri venjingarlegu í Danmark, har íðkararnir fingu fleiri samanhangandi dagar saman við Martini Damsbo og Søren Ipsen undir friðarligum og óstrongdum umstøðum. Øll vóru samd um, at slíkar savningar eru gull verdar og eiga at endurtakast so títt, sum til ber.

Tað er ein sannroynd, at tað gerst støðugt dýrari at luttaka í kappingum uttanlands. Altjóða kappingarnar, sum verða hildnar undir hattinum hjá altjóða bogaskjótifelagsskapinum World Archery eru vorðnar so dýrar at vera við í, at støðugt fleiri lond og einstakir íðkarar aftra seg við at luttaka. Laka luttøkan í EM í

innandura bogaskjóting, sum var í Kroatia í februar, bar boð um hetta, og nógv bendir á, at myndin verður tann sama, tá ið EM í uttandura bogaskjóting verður í Týsklandi í mai.

Ein stór og nýggj forðing er “bústaðarskyldan”, sum nú verður praktiserað. Til fyri kortum gjørdu skjúttarnir og teirra nasjonalu ítróttarsambond sjálvi av, hvussu tey búleikaðust undir kappingum. Tað bar eitt nú til at búgva rættiliga bíliga við at leiga airbnb-íbúðir. Men nú verður kravt, at bæði íðkarar og teirra officials búgva á gistingarhúsum, sum kappingarfyriskipararnir hava valt út, og tað fyri ógvusliga uppskrúvaðar prísir. Akta íðkararnir ikki tey boðini, verða teir útihýstir frá viðkomandi kapping.

Støðan ger, at pengarnir hjá BSKF verri enn so røkka eins væl og fyrr. Úrslitið verður sjálvsagt, at færri íðkarar fram eftir sleppa út um landoddarnar at kappast – um ikki meira peningur kann útvegast. Tað liggur tí eisini í kortunum, at skrivarin skal royna at leggja strategiir fyri, hvussu meira stuðulspeningur kann fáast til vega, men ivasamt er, hvussu góð tey útlitini eru, tí flest allar ítróttargreinar eru í neyvt somu støðu, og tær troyta allar tey somu miðini.

## Framtíðarætlanir

Í vár byrjar arbeiðið at snikka saman eitt føroyskt, eintýtt, regluverk fyri alla føroysku bogaskjótiítróttina. Mest sannlíkt verður regluverkið hjá bogaskjótingini í Danmark brúkt sum fyrimynd, og talan kann verða um í stóran mun at umseta stórar partar av danska regluverkinum. Men útlendskar reglur og mannagongdir kunnu ikki lofta øllum ivaspurningum og nøkta tørvin á reglum á øllum økjum. Bara tað, at landið er lítið og enn rættiliga fáment í bogaskjótihøpi, ger til dømis, at egnar reglur mugu gerast fyri, júst hvussu vit skipa okkara egnu kappingar, og hvørjar treytir skulu setast fyri luttøku o.s.fr.



**Nevndarforfólk:**
Fróði Heri Poulsen

**Nevndarlimir:**
Ingolf S. Olsen, skrivari
Jógvan Niclasen, næstforfólk
Hans Petur Højgaard, nevndarlimur
Hans Bogi Ellefsen, tiltakslimur

**Lønt starsfólk:**
Ingolf S. Olsen, skrivari/samskipari
0,36

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Bogaskjótifelagið Tambar | 30 |
| Bogaskjótifelagið Ørvur | 45 |
| Bogaskjótifelagið Vágaskot | 71 |
| Team Suðurskot | 41 |

**Sosialir miðlarl:**
Facebook (BSKF)
Instagram (worldarchery_faroeislands)

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Borðtennis

Borðtennissamband Føroya / btsf@btsf.fo / Tel 269511 / www.btsf.fo

**Borðtennissamband Føroya stílar eftir at fevna um breiddina og hevur umframt skúlavitjanir til tey yngstu, lið og kappingar fyri tey eldru, eisini gjørt samstarv við Parasport Føroyar.**

## Strategi

Borðtennis í Føroyum hevur eina víðopna kappingarskipan, ið fevnir um breiddina, tí øll, uttan aldur, kyn og førleikar, kappast hvør í móti øðrum í teimum seks árligu Grand Prix-kappingunum. Her eru bólkarnir býttir upp eftir undanfarnum úrslitum.
Borðtennissamband Føroya stílar eftir at fevna um breiddina og hevur umframt skúlavitjanir til tey yngstu, lið og kappingar fyri tey eldru, eisini gjørt samstarv við Parasport Føroyar.
Ein skipað venjingarætlan varð løgd fyri Parasport-leikaranum, Tummasi Wilhelm, sum í juni luttók í Special Olympic World Games í Berlin. Tummas, sum regluliga venur við borðtennisfelagnum Tór í Havn, vann fleiri dystir.
- Tað var mega feitt, segði hann við heimasíðu sambandsins, btsf.fo.
Tummas er sjálvur elitu-leikari, og hevur vunnið seg heilt upp í B-bólkin í Grand Prix-kappingarskipanini.
Aðrir elitu-leikarar hava eisini gjørt um seg, og hevur Borðtennissamband Føroya í 2023 eitt nú stuðlað við, at føroyska kvinnulandsliðið hevur eitt lið í næstbestu donsku deildini. Har umboða tær felagið Horsens KFUM. Landsliðsleikarin, Henrietta Nørr, sum býr har, hevur staðið á odda fyri hesi munagóðu verkætlan
Eins og í so mongum ítróttum, so er sjálvbodna arbeiðsmegin størsta drívmegin í borðtennis, og Borðtennissamband Føroya er heppið at eiga mong sjálvboðin, sum sambandið roynir at fjálga um.

## Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**

Grand Prix 3 - Tórshavn, januar
Grand Prix 4 - Tórshavn, februar
Grand Prix 5 - Trongisvágur, februar
FM ung - Trongisvágur, mars
FM vaksin - Tórshavn, apríl
Grand Prix 1 - Trongisvágur, november
Grand Prix 2 - Tórshavn, november

**Kappingar uttanlands:**

Kvickly Cup - Ribe, januar
Malmø Open - Malmø, februar
Special Olympic World Games - Berlin, juni
Oyggjaleikir - Guernsey, juli

## Virksemi annars

Borðtennissamband Føroya hevur gjørt átøk fyri at gera borðtennis sjónligari í føroyska ítróttalandslagnum og samfelagnum sum heild. Eitt av átøkunum hevur verið at fáa borðtennis inn um skúlagátt, og í oktober sluppu útvið 400 næmingar í høvuðsstaðarøkinum og í Suðuroynni at royna borðtennis í ítróttatímunum - við frálæru frá útlendskum instruktøri, sum Borðtennissamband Føroya í samstarvi við fleiri skúlar hevði fingið higar.
Borðtennis er vísindaliga prógvað at vera gott fyri børn, eitt nú er tað tí, at tað krevur hugsavning og at leggja snildar ætlanir, og tí fegnast Borðtennissamband Føroya um vælvild og undirtøku frá skúlunum, sum gevur orsøk til at halda fram við skúlavitjanum. Ikki einans fyriskipararnir vóru fegnir – tað vóru børnini sanniliga eisini, og fleiri teirra spæla í dag borðtennis í einum av feløgunum.
Í átakinum at gera borðtennis sjónligari hevur Borðtennissamband Føroya eisini luttikið í tiltaki á torginum í SMS, har tað sum so mangan var nóg mikið við einum borði, tveimum battum og einum bólti fyri at fáa hópin av fólki at royna seg. Borðtennis er væl umtókt millum mong og kann spælast í øllum aldursbólkum og á øllum stigum.
Í 2023 var hátíðarhald á skránni. Hetta var tann 23. februar, tá ið aldursforsetin í føroyskum borðtennis, Tvøroyrar Borðtennisfelag, hevði 75 ára stovningardag. Hesin dagur varð hildin í rætta TBF-andanum við nógvum borðtennis og góðum hýri í høllini.
Formaður felagsins, Kai Roest, bjóðaði teimum 70-80 gestunum vælkomnum, og umframt borðtennis og ábit, vórðu trý fólk útnevnd sum heiðurslimir í felagnum. TBF heiðraði Johan Andreas Olsen, Paulinu Niclasen og Sigurbjørn Niclasen, sum í mong áratíggju í nevndararbeiði, sum sjálvboðin og onkur sum venjari og spælari, hava gjørt eitt megnar arbeiði fyri felagið.
Tað er umráðandi at geva fólki viðurkenning og vísa takksemi fyri sjálvbodna arbeiðið, sum tey útinna. Hetta var eisini støðan, tá ið ungi venjarin í borðtennisfelagnum Tór, Ári Fríðason



**Nevndarforfólk:**
Fróði Fríðason Jensen

**Nevndarlimir:**
Elinborg C. Mortensen, næstforfólk
Teitur Haraldsen Albinus, kassameistari
Pætur Albinus, skrivari

**Kappingarnevnd:**
Peter Hentze Niclasen, forfólk
Vagnur Kjærbech Nolsøe, nevndarlimur
Kai Roest, nevndarlimur

**Lønt starvsfólk:**

| | |
|---|---|
| Hallur Thorsteinsson, mennari | 0,2 |

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Borðtennisfelagið Tór | 30 |
| Tvøroyrar Borðtennisfelag | 30 |
| Oyndarfjarðar Ítróttarfelag | 10 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

Jensen, varð ein av teimum tilnevndu sum ársins sólstrála í føroyskum ítrótti á árliga Ítróttafagnaðinum. Slíkir persónar eru, ja – sólstrálur – fyri ítróttina í Føroyum.

## Framtíðarætlanir

Framtíðarætlanirnar hjá Borðtennissambandi Føroya fevna eitt nú um at menna átøkini at breiða borðtennis kring landið, og sum liður í hesum er ætlanin at víðka um skúlavitjanir og at fara undir fyrireikandi arbeiði at gerast partur av Skúlaleikum. Ungdóms- og A-landslið skulu framhaldandi stimbrast við venjingarlegum og kappingum uttanlands, og hugt verður nærri at møguleikunum fyri at skipa fyri enn fleiri kappingum í Føroyum. Mennari er settur í starv, hvørs fremstu uppgávur vera at koma út til møgulig nýggj feløg at stuðla teimum í at taka fyrstu stigini, samstundis sum at regluliga vitja núverandi feløgini fyri at stimbra um venjingar- og felagsarbeiðið á staðnum.
Um góð trý ár verða oyggjaleikir í Føroyum, og Borðtennissamband Føroya er longu farið í holt við at fyrireika seg til hesa stóru uppgávu, har málið er – saman við øðrum ítróttum – at skipa fyri einari framúr ítróttaupplivíng á Føroya landi.

## Sosialir miðlar

Instagram: table.tennis.faroe.islands
Facebook: Borðtennissamband Føroya
Youtube: Borðtennissamband Føroya

# Flogbóltur

Flogbóltsamband Føroya / fbf@fbf.fo / Tel 218766 / www.fbf.fo

**Eftir at A-landsliðini í 2022 høvdu luttikið í Eurovolley undankappingunum fyri kvinnur og menn, luttóku hesi í 2023 í European League (Silver League).**

## Strategi

1) Breidd - 2) Úrval - 3) Sjálvboðin - 4) Ítróttagleði

Eins og undanfarna ár hevur FBF havt flogbóltsskúlan, ið er ætlaður øllum, ið vilja spæla flogbólt.

## Kappingar:

**Í Føroyum:**

Silver Leauge A-landslið kvinnur 27.04.2023-04.06.2023 í Tórshavn

Silver Leauge A-landslið menn 29.04.2023-04.06.2023 í Tórshavn

Challenge Cup Mjølnir menn 25.10.2023

**Uttanlands:**

Silver Leauge A-landslið kvinnur 08.06.2023-12.06.2023 í Portugal

Silver Leauge A-landslið kvinnur 12.06.2023-15.06.2023 í Georgia

Silver Leauge A-landslið kvinnur 15.06.2023-18.06.2023 í Montenegro

Silver Leauge A-landslið menn 08.06.2023-11.06.2023 í Kýpros

Nevza U17 gentur og dreingir 15.10.2023-19.10.2023 í Ikast DK

Nevza U19 Gentur og dreingir 26.10.2023-30.10.2023

Challenge Cup Mjølnir menn 01.11.2023 í Hollandi

## Virksemi

Flogbóltssamband Føroya helt í 2023 áfram at virka eftir ætlanini, sum var samtykt í heysti í 2021. Hetta merkir, at A-landsliðini í 2023 luttóku í European League ímeðan U17 og U19 landsliðini fyri dreingir og gentir luttóku í NEVZA kappingunum, sum samstundis var Eurovolley undankapping.

**Altjóða arbeiði**: Eftir at A-landsliðini í 2022 høvdu luttikið í Eurovolley undankappingunum fyri kvinnur og menn, luttóku hesi í 2023 í European League (Silver League).

Kvinnurnar vóru í bólki við Portugal, Georgia og Montenegro, ímeðan mennirnir vóru í bólki við Kýpros og Lettlandi. Leiktir vóru dystir heima og úti.

Hetta var so annað árið á rað, at Føroyar luttók í eini skrásettari CEV kapping. Tað serliga við hesi luttøkuni var, at føroysku kvinnurnar vunnu ein av dystunum og var hetta sostatt fyrsti skrásetti sigur hjá einum føroyskum A-landsliðið. Hetta hendi eftir at føroyska kvinnulandsliði á heimavølli vann 3-1 ímóti Georgia.

Í oktober 2023 var so vanliga luttøkan fyri U17 og U19 landsliðini í NEVZA kappingunum. Hesaferð var kappingin samstundis skipað sum Eurovolley undankapping fyri nevndu aldursbólkar.

Flogbóltssamband Føroya hevur gjørt av at vera vertur fyri NEVZA U19 kappingini í 2024, 2025 og møguliga eisini í 2026. Hetta er mett at vera stórur fyrimunur í mun til longu ferðina til Finnlands.

Í 2023 luttók eitt føroyskt flogbóltsfelag á fyrsta sinnið í eini altjóða CEV kapping. Hetta hendi eftir, at FBF hevur eggjað feløgunum at taka lut í hesum kappingum. Mjølnir úr Klaksvík meldaði seg til. Mjølnir møtti hollendska liðnum, Numidia VC Limax Linne. Sæð í mun til, at hetta var fyrsta luttøkan hjá einum føroyskum liði og at Holland er millum fremstu flogbóltstjóðir í Evropa, vóru úrslitini hjá Mjølnir avbera góð. Heimadysturin endaði 1-3, eftir at Mjølnir óvæntað vann fyrsta settið.

**Flogbóltsskúlin:** Flogbóltsskúlin hjá FBF helt áfram í 2023 við einum munandi tali av ungum, sum tvær ferðir vikuliga verða vand av ymisku U-landsliðsvenjarunum. Tað er rættuliga eyðsýnt, at leikstigið hjá yngstu flogbóltsleikarunum - t.e. U12 og U14 - er hækkað munandi. Orsøkin er helst, at umframt tað stóra arbeiði, sum verður gjørt í einstøku feløgunum, at flogbóltsskúlin hevur haft eina stóra ávirkan.

**Kappingarnar:** Sum nakað nýtt byrjaði FBF at brúka talgildar dómaraseðlar og nýggjar skipanir frá Genius Sports til bestu deildirnar hjá monnum og kvinnum. Hetta saman við hagtølum frá einstøku dystunum hava givið ein serligan dám við livescore, vikuliðum, sum verða samansett av óheftum hagtølum og sjálvvirkandi dagførdum støðutalvum.

Ætlandi skulu upplýsingar frá hesum skipanum frameftir brúkast í sambandi við sjónvarpingina av dystunum.

## Framtíðarætlanir

A-landsliðini hjá kvinnum og monnum halda fram við at kappast í Silver Leauge á hvørjum ári.

Nevza U19 hjá gentum og dreingjum verður í Føroyum í 2024.

Vit halda fram við at fara til Nevza U17 í Ikast.




**Nevndarforfólk:**
Peter Holm

**Nevndarlimir:**
Guðrun Joensen, næstforfólk
Jóhan á Mýruni, nevndarlimur

**Lønt starvsfólk:**
Jóhan Vest, stjóri 1 (starvsbrøk)
Jana Jacobsen, samskipari 1 (starvsbrøk)

**Feløg og limatøl:**
B71, Dráttur, Fleyr, ÍF, KÍF
Mjølnir, Nøvan, SÍ, TB, Ternan

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Fótbóltur

Fótbóltssamband Føroya / fsf@fsf.fo / Tel 351979 / www.fsf.fo

**Visjónin í nýggju FSF menningarætlanini 2021-2025 er, at Føroyar skulu gerast heimsmeistarar í luttøku. Ítøkiliga málið er at økja um talið av leikarum við 20 prosentum hesi 5 árini.**

## Strategi

**Breidd:** Visjónin hjá FSF er at gerast heimsmeistari í luttøku. Tí vilja vit bjóða tilboð til øll.

**Úrval:** FSF hevur víðkað um úrvalstilboðið soleiðis, at U16 landslið fyri gentur og dreingir eru stovnað.

**Sjálvboðin:** www.fsf.fo/hvussu-faa-vit-fleiri-sjalvbodin/

## Kappingar

**Í Føroyum:**

**Landskappingin:** Í 2023 vóru 452 lið tilmeldað landskappingingarnar, sum eru nakað fleiri enn árið fyri. 304 lið vóru tilmeldað í mansfótbólti, og 148 lið í kvinnufótbólti.

Í Betri deildini hjá monnum vann KÍ aftur føroyameistaraheitið sannførandi. Víkingur vann silvur, og HB vann bronsu.
Betri deildin hjá kvinnum í 2023 líktist nógv kappingini í 2022. Í 2023 luttóku aftur átta lið, og KÍ endurvann meistaraheitið í stórum stíli. NSÍ vann silvur, og HB vann bronsu.

**Steypakappingin:** Finalan um Løgmanssteypið í 2023 var millum B68 og HB. Finaluna vann HB eftir brotssparkskapping, og úrslitið bleiv 5-3.
Steypakappingina hjá kvinnum vann NSÍ við 2-1 sigri á KÍ í finaluni.

**Uttanlands:**

**Evropeiska luttøkan hjá feløgunum:** 2023 bleiv søguligt fyri føroyska luttøku í UEFA kappingunum fyri feløg. Sum fyrsta føroyska felag nakrantíð megnaði KÍ at vinna seg í bólkaspælið í UEFA Europa Conference League. Við frálíku avrikunum - bæði í undankappingini og í bólkaspælinum - setti KÍ veruliga fokus á føroyskan felagsfótbólt í 2023.

Umframt KÍ spældu HB, Víkingur og B36 eisini í UEFA kappingunum hjá monnum, og í kappingini hjá kvinnum luttók KÍ sum meistaralið.

## Virksemi annars

Føroyskur fótbóltur er í støðugari menning, og ongantíð hevur virksemið verið so umfatandi. Serliga gleðiligt er at síggja, at luttøkan millum børn og ung er methøg - bæði tá ið tað kemur til tal á leikarum og liðum. Hjá teimum vaksnu vísir KÍ vegin. Við sannførandi avrikum í UEFA kappingunum hevur KÍ prógvað, at við miðvísum arbeiði móti langtíðarmálum ber alt til.

**Landsliðsfótbóltur**

Í 2023 spældi A-landsliðið hjá monnum tíggju landsdystir. Í EM-undankappingini var føroyska landsliðið í bólki E, sum endaði við, at Føroyar fingu 2 stig: 1-1 javnleik á útivølli móti Moldova og 0-0 á útivølli móti Albania. Harafturat vóru eisini tveir venjingardystir á skránni, móti Norðurmakedónia og Noregi. Føroyar spældu seks dystir í nýggju UEFA Nations League kappingini fyri kvinnur, september til desember. Hóast einki vunnið stig, vóru stór framstig at síggja. Harumframt leikti kvinnulandsliðið tveir vinardystir móti Luksemborg í 2023.

U21 landsliðið heldur fram við at fáa góð úrslit. Liðið leikti fimm undankappingardystir í 2023 og fekk í hesum dystum sjey stig - tveir sigrar, ein javnleik og tvey tap.

Í 2023 leiktu ungdómslandsliðini 52 landsdystir. FSF hevur U15, U16, U17 og U19 landslið fyri gentur og dreingir. U15 og U16 liðini spæla venjingardystir/menningarkappingar, meðan U17 og U19 spæla bæði venjingardystir/ menningarkappingar og undankappingardystir.

## Framtíðarætlanir

**Grassroots**

Visjónin í FSF menningarætlanini 2021-2025 er, at Føroyar skulu gerast heimsmeistarar í luttøku. Ítøkiliga málið er at økja um talið á leikarum við 20% hesi 5 árini. Fyri at røkka hesum málinum er samstundis neyðugt at vita nágreiniliga, hvussu nógvir virknir fótbóltsleikarar eru í Føroyum.
Fyri børn og ung í aldrinum 5-17 ár er at fegnast um, at í hesum aldursbólkunum er málið við 20% fleiri leikarum nátt hesi seinastu 3 árini. Arbeitt verður tó áhaldandi fram ímóti at røkka øllum deilmálunum í menningarætlanini.



**Forseti:**
Christian F. Andreasen

**Nevndarlimir:**
Róin Schrøter, varaforseti
Anja Rein, nevndarlimur
Maria J. Joensen, nevndarlimur
Heri á Rógvi, nevndarlimur
Fríðin Ziskason, nevndarlimur
Rúni Herup Olsen, nevndarlimur

**Aðrar nevndir:**
Fíggjarnevnd, kappingarnevnd, útbúgvingar- og menningarnevnd, dómaranevnd, landsliðsnevnd, kvinnunevnd, grassroots- og ungdómsnevnd, aga- og etiska nevnd, yvirkærunevnd

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

**Ársfrágreiðingin 2023** og **Menningarætlanin 2021-2026** kunnu lesast í fullari longd á heimasíðuni hjá FSF.

## Feløg

07 Vestur - AB - B36 - B68 - B71 - EB/Streymur - FC Hoyvík - FC Suðuroy - HB - ÍF - KÍ - MB - NSÍ - Royn - Skála - TB - Víkingur

## Annað

**Fótbóltstilboð til vaksin og børn við menningartarni**
Venjingartilboðið fyri børn í aldrinum 8-12 ár, sum kallast "Fótbóltur fyri øll", ið B36 stendur fyri, helt fram í 2023. Venjing var eina ferð um vikuna í tíðarskeiðnum apríl til oktober. Tilboðið til vaksnar leikarar við venjarum úr HB helt fram í 2023. Umleið 12 leikarar hittast eina ferð um vikuna til venjing. Nýggj samstarvsavtala er gjørd við Parasport fyri árini 2023-2026.

**Grassrootsvikan**
Árliga grassrootsvikan var í døgunum 23.-29. september. Tiltakið Bóltur&Spæl, ið nú er blivið eitt afturvendandi tiltak, var eisini á skránni í 2023. Tiltakið er fyri børn, sum eru 5-6 ár (fødd í 2017 og 2018). Endamálið er at geva børnunum eina góða og stuttliga venjing, sum øll kunnu vera við í. Umleið 600 barnagarðsbørn luttóku saman við umleið 160 starvsfólkum. 130 skúlanæmingar luttóku sum hjálparfólk.
Saman við Parasport varð eisini skipað fyri einum fótbóltsfestivali á Tórsvølli fyri næmingum í serbreytunum á miðnámi.

**Safeguarding - trygd og trivnaður í føroyskum ítrótti**
Saman við Ítróttasambandi Føroya fór FSF á vári í 2023 í gongd við at seta fokus á trygd og trivnað, sum á øðrum málum verður kallað "safeguarding". Arbeitt hevur verið við at gera eina allýsing av hugtakinum og geva feløgunum nakað ítøkiligt at halda seg til og nakrar mannagongdir fyri, hvussu ymiskar støður frameftir kunnu handfarast.

**Kvinnur í fótbólti**
Á kvinnu- og gentusíðuni er serstøk menningarætlan "Kvinnur á vøllin" gjørd, sum nágreinar menningina av kvinnufótbólti árini 2021 til 2025.

# Frælsur ítróttur

Frælsur Ítróttur Føroya / athletics@athletics.fo / Tel 221226 / www.fif.fo

**Allar kappingar herheima eru fyri allar áhugaðar íðkarar. Við einum sera stórum tali av kappingum alt árið eru nógv høvi at royna seg í øllum greinum í frælsum ítrótti.**

## Strategi

**Breidd:** FÍF luttók í skúlaleikum, og stórkappingarnar á sumri í 2023 vóru fyri øll.

**Úrval:** Íðkarar fingu sera nógvar møguleikar at luttaka í kappingum uttanlands. Venjingarlegur vóru eisini fyriskipaðar uttanlands. Bæði luttøkan og heiðursmerkjaúrtøkan á Oyggjaleikunum í Guernsey var søguliga stór.

**Ítróttagleði:** Allar kappingar herheima eru fyri allar áhugaðar íðkarar. Við einum sera stórum tali av kappingum alt árið eru nógv høvi at royna seg í øllum greinum í frælsum ítrótti.

## Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**

07.01.23 Nýggjárshálvmarathon Toftir
21.01.23 RASKA VK4 Sørvágur
04.02.23 RASKA VK5 / FM í Lendisrenning, Hoydalar
25.02.23 RASKA VK6 Fossánes
19.03.23 RASKA VK7 Tvøroyri
25.03.23 RASKA VK8 / FM í 10 km, Runavík
25.04.23 Flaggdagsrenning, Tórshavn
29.04.23 Silvarenning, Klaksvík
06.05.23 FM í Hálvmarathon, Klaksvík
13.05.23 RASKA Stórkapping 1, Tórsbreyt
20.05.23 Kvinnurenningin, Tórshavn
27.05.23 RASKA Stórkapping 2, Guttabreyt
03.06.23 Norðoyastevnurenningin, Klaksvík
04.06.23 Tórshavn Marathon
10.06.23 Stuttleikir, Tórsbreyt
17.06.23 RASKA Stórkapping 3, Tórsbreyt
01.07.23 Føroya Sunnasta Hálvmarathon
02.07.23 Top Run, Kollfjarðardalur
27.07.23 Ólavsøkurenningin
12.08.23 FM á breyt, Tórsbreyt
26.08.23 Faroe Express Stafettin
02.09.23 Føroya Vakrasta Hálvmarathon
09.09.23 18 Wild Islands
30.09.23 Backyard Ultra, Havnadalur
04.11.23 RASKA VK1 Runt Agnið, Toftir
18.11.23 RASKA VK2 Kerjar, Havnadalur
09.12.23 RASKA VK3 Kollafjørður

**Kappingar uttanlands:**

21.01.23 Stórmót, Laugardalshøllin Reykjavík, IS
11.02.23 Pallas Spelen, Malmø, SE
18.02.23 DM Inde Senior, Randers, DK
04.03.23 DMU Inde, Skive, DK
04.03.23 Kastikapping, Växjö, SE
10.06.23 Copenhagen Open
23.06.23 DM Ude, Aalborg
30.06.23 VU Spelen, Gøteborg
08.07.23 Oyggjaleikir, Guernsey
02.09.23 DMU Ude, Hvidovre

## Framtíðarætlanir

Komandi oyggjaleikirnir í Føroyum í 2027 hava longu havt greiðar raðfestinging við sær fyri komandi trý árini. Eini 100 officials skulu nýtast til oyggjaleikirnar, tí mugu verandi dómarar endurnýggja sína útbúgving, og fleiri nýggj fólk mugu útbúgvast. Verandi hentleikar til frælsan ítrótt mugu dagførast til leikirnar. Og ítróttaliga er málið, at Føroyar á heimavølli hava tvær kvinnur ella tveir menn á nøktandi stigi í øllum teimum umleið 40 greinunum í frælsum ítrótti á oyggjaleikunum.

## Feløg og limatøl

| | |
|---|---|
| Bragdið | 290 |
| Frælsi | 60 |
| Hvirlan | 100 |
| Hvistan | 75 |
| Roysni | 45-50 |
| Treysti | 300 |

## Sosialir miðlar

www.facebook.com/2002fif
https://instagram.com/athleticsfo



**Nevndarforfólk:**
Sølvi Reinert Hansen

**Nevndarlimir:**
Peter Jensen, skrivari
Karin Kirke Petersen, kassameistari
Heini Gregersen, nevndarlimur

## Aðrar nevndir:

**Kappingarnevnd:**
Heini Gregersen, forfólk, FÍF
Markus Hvannastein, limur, Treysti
Birna Abrahamsen, limur, Hvirlan
Rógvi Johannesen, limur, Bragdið

**Kærunevndin:**
Arnfinnur Johannesen, limur, Roysnið
Jeggi Lorentzen, limur, Treysti
Lovisa Niclasen, limur, Hvirlan

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Fimleikur

Føroya Fimleikasamband / fimleikur@fimleikur.fo / Tel 919919 / www.fimleikur.fo

**Føroya Fimleikasamband er í fer við at gera eina strategi fyri komandi árini. Strategiin skal vera við til at menna breiddina, estetiska fimleikin og amboðsfimleikin komandi árini.**

## Strategi

Breidd - Úrval - Sjálvboðin - Ítróttagleði

Føroya Fimleikasamband skipar á hvørjum ári fyri skeiðum til breiddina, estetiska fimleikin og amboðsfimleikin. Í 2023 bleiv stórur dentur lagdur á at halda skeið fyri breiddini, tí ikki nóg stórur dentur hevur verið lagdur á hetta økið seinastu árini. Breiddin er grundarlagið undir føroysku fimleikafeløgnum, og tí er alneyðugt at leggja stóran dent á breiddina. Skeiðini, sum vera bjóðað, eru ókeypis, og tey eru á einum stigi, har øll kunna vera við.

14.-17. februar 2023 skipaðu Ida-Marie Pedersen og Lasse Smedegaard fyri skeiði til breiddarfimleikin. Feløgini, sum luttóku á skeiðinum, vóru Vága Fimleikafelag, Klaksvíkar Fimleikafelag og Fimleikafelagið Flog. Tey undirvístu umleið 60 børnum í frítíðarskúlanum í Havn í 1.-3. flokki. Føroya Fimleikasamband hevur leingi havt gott samstarv við Idu-Mariu og Lasse, og tískil koma tey væntandi aftur til Føroya í nærmastu framtíð.

29. september-1. oktober 2023 skipaði DGI fyri skeiði til breiddarvenjararnar í Føroyum. Skeiðið varð hildið í Havn og í Runavík.

## Kappingar

**Í Føroyum:**

**Estetiskar kappingar:**

Jólacup, desember, í Tórshavn

Steypakapping 1, 28.01.2023 í høllini á Hálsi

Steypakapping 2, 11.03.2023 í Bylgjuni

FM undankapping, mai, í høllini á Hálsi

FM finalan, mai, í høllini á Hálsi

**Amboðskappingar:**

Góðkenningardagur Lev 1-2-3 / Kappingarfyrireiking, 22.01.2023 í Bylgjuni

Góðkenningardagur Lev 1-2-3 / Kappingarfyrireiking, 25.02.2023 í FIMI

Steypakapping 1. og 2., var 19.03.2023 í Bylgjuni

Góðkenningardagur Lev 1-2-3 / Kappingarfyrireiking, 16.04.2023 í FIMI

FM fyri einstaklingar, 30.04.2023 í FIMI

Góðkenningardagur Lev 1-2-3 / Kappingarfyrireiking, 23.10.2023 í FIMI

Liðkapping, 18.11.2023 í Bylgjuni

**Uttanlands:**

NM2023 fyri juniorar bleiv hildin í Helsinki (FIN) um vikuskiftið 19.-21. mai.

Fimleika-oyggjaleikir vóru í Álandi í vikuni 3.-8. juli.

NEC fyri seniorar var 25.-26. nov. 2023 í Halmstad í Svørríki.

## Virksemi annars

Føroya Fimleikasamband skipar á hvørjum ári fyri dómaraskeiðum í estetiskum- og amboðsfimleiki. Fýra skeið vera hildin á hvørjum ári fyri dómarum í amboðsfimleiki. Tvey skeið eru fyri kvinnudómarum, og tvey eru fyri mannfólkadómarum. Her er talan um FIG-skeið í E og D døming, umframt skeið í bundnum serium. Fimleikasambandið leggur stóran dent á, at føroysku kappingarnar eru væl fyriskipaðar og rættvísar, og í hesum sambandi spæla dómararnir ein týðandi leiklut. Í verandi løtu hava Føroyar tríggjar altjóða dómarar, og ætlanin er at hækka munandi um hetta talið eftir OL í París, tá ið nýggj FIG-skeið vera hildin.

Stórur dentur hevur eisini verið lagdur á at økja um dómarahópin í estestiskum fimleiki. Bæði í 2022 og 2023 vóru skeið hildin fyri yvir 50 luttakarum úr øllum føroysku feløgnum, har Fimleikasambandið eisini fekk vitjan av undirvísarum úr hinum skandinavisku londunum. Dómaraskeiðini í estetiskum fimleiki hava eydnast sera væl og hava havt sera stóra undirtøku.

Tá ið fimleikaárið er komið at enda, skipar Fimleikasambandið fyri pallborðsfundi fyri øllum fimleikafeløgunum í Føroyum. Her verður serligur dentur lagdur á, hvørjar broytingar Fimleikasambandið skal gera til komandi kappingarár. Tað hevur leingi verið ynski um at gera eina nýggja kappingarskipan fyri yngru fimleikararnar í amboðsfimleiki. Hetta arbeiðið er sett í gongd, og verður væntandi ein nýggj kappingarskipan sett í gildi í 2025.

Føroya Fimleikasamband skipaði eisini fyri fimleikagalla í 2023, sum var hildið í Havn. Fimleikasambandið er sera fegið um stóru undirtøkuna og stóra stuðulin til tiltakið.

## Framtíðarætlanir

Føroya Fimleikasamband er í fer við at gera eina strategi fyri




**Nevndarforfólk:**
Pól Esper H. Hansen

**Nevndarlimir:**
Heri Lamhauge, næstforfólk, amboðs-samskipari
Elin Michelsen, samskipari, estetiskt
Rúna Olsen, samskipari, breiddarfimleikur
Malan Mikkelsen, samskipari, Fimleikafagnaður og galla

**Lønt starvsfólk:**
Ninna R. Simonsen, skrivari 0,3
Heri Jøkladal, kassameistari

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

komandi árini. Sissal Kristiansen kemur at hjálpa Fimleikasambandinum at seta eina tílíka strategi út í kortið. Strategiin skal vera við til at menna breiddina, estetiska fimleikin og amboðsfimleikin komandi árini.
Fimleikasambandið hevur í mong ár roynt at gerast fullur limur í FIG, og tað arbeiðið heldur fram. Í verandi løtu kunnu føroyskir fimleikarar ikki luttaka í skrásettum FIG kappingum sum World cup, EM, HM ella OL. Tískil hava vit eggjað føroysku fimleikarunum at luttaka við danska landsliðnum, so leingi vit ikki hava fullan limaskap í FIG.
Oyggjaleikir vera í Føroyum í 2027, og Fimleikasambandið hevur greitt boðað frá, at fimleikur verður við á oyggjaleikunum í 2027. Hetta er sjálvandi sera avbjóðandi fyri Fimleikasambandið, tí fólk skula til at skipa fyri einari tílíkari kapping. Serliga er talan um avbjóðingar í dómararhópinum. Í verandi løtu hava Føroyar trýggjar altjóða dómarar, og vit hava sett sum mál, at hetta talið skal verða millum níggju og tólv í 2027.
Umfram NEC og NM verður eisini lagt upp til, at føroysku fimleikararnir skulu kappast í fleiri altjóða kappingum, sum ikki eru FIG skrásettar kappingar, og har føroysku fimleikararnir eru kappingarførir.
Miðað verður eftir at hava fleiri skeið í estestiskum fimleiki, og at dómarahópurin verður øktur komandi árini.
Tað er ógvuliga ymiskt, hvussu føroysku fimleikafeløgini eru fyri. Eitt mál er at menna Tvøroyra Fimleikafelag og Vága Fimleikafelag, so tey eisini kunna vera við í føroysku kappingunum. Hetta kundi verið gjørt við at stuðla venjarahópinum við ymiskum skeiðum í breidd, estetiskum fimleiki og amboðsfimleiki. Fimleikasambandið hevur ætlanir um at skipa fyri einum fimleikadegi, har øll kunnu koma at venja breiddar-, estetiskan- og amboðsfimleik.

## Annað

Føroya Fimleikasamband hevur sett ein skrivara (0,3 starv) og ein kassameistara, sum fær 2000 kr. pr. mánað. Ætlanin er at økja um hetta virksemið við at gera skrivstovustarvið til hálvtíðarstarv.

## Feløg og limatøl:

| | |
|---|---:|
| Havnar Fimleikafelag | 1.277 |
| Fimleikafelagið Ljósið | 276 |
| Fimleikafelagið Støkk | 940 |
| Fimleikafelagið FLOG | 172 |
| Klaksvíkar Fimleikafelag | 390 |
| Tvøroyra Fimleikafelag | 150 |
| Vága Fimleikafelag | 96 |
| | **3.301** |

## Sosialir miðlar

Føroya Fimleikasamband | Facebook
Føroya Fimleikasamband (@fimleikasambandid) • Instagram-billeder og -videoer

# Hondbóltur

Hondbóltssamband Føroya / hsf@hsf.fo / Tel 231982 / www.hsf.fo

## Hondbóltsárið 2023 var helst hitt besta nakrantíð í føroyskari hondbóltssøgu, tá hugsað verður um altjóða úrslit.

### Strategi

HSF arbeiðir áhaldandi við at tryggja eina so stóra breidd sum gjørligt. Kappingar verða skipaðar í fleiri bólkum í hvørjum árgangi, hetta er fyri at tryggja, at so nógv sum gjørligt spæla á einum hóskandi og mennandi stigi. T.d. eru bæði A- og B-steypakappingar, sum báðar enda við einum finaludegi í Høllini á Hálsi.

HSF er av tí áskoðan, at breidd og úrval ikki útiloka hvørt annað, tey hangan saman. Tískil fevnir leikaramenningin hjá HSF breitt, og roynt verður at fáa so nógv sum gjørligt í gjøgnum skipanina. Fyri at styrkja um úrvalsumhvørvið hevur HSF m.a. havt málverjavenjaraskeið, skeið í skaðafyribyrging og serskeið fyri lámar og vengur. Umhvørvið við hondbóltsgreining er styrkt við at felagsavtala er gjørd við greiningarfyritøkuna, Sideline XPS, sum ger, at allir dystir í bestu føroysku deildunum verða kliptir, kunnu greinast og nýtast til hagtøl.

HSF upplivir, at flestu feløgini eru væl skipað við sjálvbodnum hjálparfólkum, og HSF roynir at bera so í bandi, at hesi fólk fáa ágóðar, sum t.d. atgongumerkir til landsdystir.

### Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**

EM-undankapping, menn

EM-undankapping, kvinnur

**Kappingar uttanlands:**

M21 HM-endaspæl í Týsklandi 20. juni-2. juli

M17 European Open í Gøteborg í Svøríki 3.-8. juli

W19 EHF Championship í Klaipeda í Litava 8.-16. juli

M19 HM-endaspæl í Kroatia 2.-13. august

W17 EHF Championship í Baku í Aserbadjan 5.-13. august

W20 HM-undankapping 19 -26. november

### Virksemi annars

Hondbóltsárið 2023 var helst hitt besta nakrantíð í føroyskari hondbóltssøgu, tá hugsað verður um altjóða úrslit. HSF rakk einum av stóru málunum, sum var at vinna seg í eitt A-endaspæl, tá manslandsliðið vann seg í EM-endaspælið 2024 í Týsklandi. Heimasigrar í dystum móti Rumenia og Ukraina fyri fullsettari Høll á Hálsi vóru nóg mikið til, at Føroyar komu víðari. U21- og U19-landsliðini hjá monnum spældu HM-endaspøl í ávikavist Týsklandi og Kroatia, og blivu tey ávikavist nr. 7 og 8. av 32. luttakandi londum. Elias Ellefsen á Skipagøtu bleiv toppskjútti í U21 HM, og var eisini kosin besta miðja í kappingini. Óli Mittún bleiv eisini toppskjútti og var eisini kosin besta miðja í U19 HM-endaspælinum.

U17- og U19-kvinnurnar kappaðust eisini um pláss í endaspølum, men vóru bæði liðini júst ov stutt til at røkka tí.

Kvinnulandsliðið byrjaði sína EM-undankapping á heysti, og tær fara eisini at kappast um eitt pláss í EM-endaspælinum.

Ongantíð hava so nógv føroysk feløg kappast í evropeiskum hondbólti. Heili seks feløg meldaðu til European Cup kappingarárið 2023-24: H71 menn og kvinnur, Neistin menn og kvinnur og Team Klaksvík og VÍF menn. Neistakvinnur og VÍF menn vunnu seg víðari til annað umfar. HSF fegnast um, at felagshondbólturin í Føroyum í størri mun eisini luttekur í altjóða kappingum.

HSF hevur uppbygt eitt gott samstarv við íslendska hondbóltssambandið, og í 2023 hava aftur verið fleiri ungdómsvenjingardystir landanna millum, umframt tveir A-landsdystir.

Av øðrum virksemi kunnu m.a. nevnast ymisk skeið, sum HSF skipar fyri. Teirra millum eru skeið fyri fysioterapeutar, dómaraskeið, venjaraskeið, málverjuvenjaraskeið og skeið fyri dómaraborð. Eisini samstarvar HSF við fyritøkuna Sideline um dátur og greiningar av dystum. Allir dystirnir í bestu føroysku deildunum verða greinaðir av Sideline.

At kappast á hægsta stigi er fíggjarliga krevjandi, men HSF fegnast um gott samstarv við stuðlar, nú enn størri avbjóðingar standa fyri framman í 2024.

### Framtíðarætlanir

HSF arbeiðir áhaldandi við at menna føroyskan hondbólt á fleiri mótum. Eitt av aðalmálunum er, at Føroyar eisini skulu luttaka í einum EM- ella HM-endaspæli fyri kvinnur innan fyri fimm ár. Fyri at røkka hesum málinum leggur HSF nógv fyri at menna dygdargóðar leikarar saman við feløgunum, sum kunnu standa seg í altjóða dystum.

HSF arbeiðir áhaldandi við at tryggja virksemið fíggarliga saman við myndugleikum, stuðlum og okkara egna virksemi.

HSF vil menna samleikan hjá hondbóltinum í Føroyum, menna dygdargóðar og nútímans loysnir, sum kunnu virka fyri at breiða hondbóltin út og styrkja umsitingina hjá feløgunum og sambandinum sjálvum. Aftur at hesum vil HSF virka fyri at tryggja nøktandi nútímans karmar, so at altjóða hondbóltur kann leikast í Føroyum, karmar, sum liva upp til krøvini hjá altjóða sambondunum IHF og EHF.




**Nevndarforfólk:**
Gunn Ellefsen

**Nevndarlimir:**
Jógvan Emil Nielsen, næstforfólk
Heini Ellingsgaard, nevndarlimur
Durita Thomsen, nevndarlimur
Kristian Østergaard, nevndarlimur
Høgni Vilhelmsen, varalimur
Birgir Kass, varalimur

**Kappingarnevnd:**
Høgni Vilhelmsen, forfólk
Eyðun Mortensen, nevndarlimur
Jákup Dam, nevndarlimur
Ása á Neystabø, varalimur

**Menningar- og úrvalsnevndin:**
Ann-Mari Wang, forfólk
Anna Dam, nevndarlimur
Hans Andreas Dahl, nevndarlimur
Gilli Wardum, nevndarlimur
Mark Lausen Marcher, nevndarlimur
Birita Mortansdóttir, nevndarlimur
Djóni Højgaard, nevndarlimur
Kristian Østergaard, nevndarlimur

**Aganevnd** :
Jens Andrias Vinther, forfólk
Niels Winther, nevndarlimur
Hartvig Joensen, nevndarlimur

**Dómsnevnd** :
Súsanna Leo, forkvinna
Kristian Johansen, nevndarlimur
Margrið Weihe, nevndarlimur

**Stuðlanevnd:**
Durita Thomsen, forfólk
Heini Ellingsgaard, nevndarlimur
Gunn Ellefsen, nevndarlimur

**Dómaranevnd:**
Jógvan Emil Nielsen, forfólk
Heini Ellingsgaard, nevndarlimur
Thomas Juul Sólbjørnsson Thomsen, nevndarlimur
Dánjal Samuelsen, nevndarlimur
Margrið Weihe, nevndarlimur

**Skrivstovan:**
Andrass Thomsen, stjóri
Mark Lausen-Marcher, ítróttastjóri
Ári Rouch, samskipari
Hallur Danielsen, samskipari

**Feløg og limir:**
H71
Neistin
Kyndil
VB
ÍA
SÍF/Søljan
VÍF
KÍF
Stjørnan
Team Klaksvík
Tjaldur
StÍF
EB

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Judo

Judo Føroyar / judo@judo.fo / Tel 216586 / www.judo.fo

**Judo Føroyar fer frameftir at nýta orku upp á at styrkja feløgini - bæði umsitingarliga og venjingarliga. Eisini eiga vit at endurskoða kappingarnar og felags venjingarlegurnar.**

**1) Breidd - 2) Úrval - 3) Sjálvboðin - 4) Ítróttagleði**
Judofeløgini hava øll árini arbeitt innan fyri hesi fýra økini, sum ÍSF nú hevur sett í sína strategi, og vit fara í framtíðini at betra okkum á øllum hesum økjum við ymiskum tiltøkum.

## Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**
SJF- cup, fyrst í februar
HJF-cup, fyrst í mars
FM fyri børn í mars
FM fyri vaksin í apríl
HJF-kapping í november

**Kappingar uttanlands:**
RIG, januar
Copenhagen Open, apríl
NM, mai
EJU-masters, juni
Svendborg masters, oktober
HM masters, november
Copenhagen Cup, november
DM, november

## Virksemi annars

Judo Føroyar hevur seinasta árið havt eitt sindur av avbjóðingum við luttakaratalinum, men tað er tíbetur um at venda aftur, so at vit aftur gerast fleiri, harav síggja vit eisini eina positiva gongd at fáa foreldur við at venja.
**Feløgini** Feløgini, sum eru virkin, eru framvegis seks í tali. Gongdin hjá teimum hevur verið ymisk. Summi hava havt stóra framgongd við íðkandi, meðan tað er heldur lakari hjá øðrum feløgum.
Judo Føroyar fer frameftir at nýta orku upp á at styrkja feløgini - bæði umsitingarliga og venjingarliga. Eisini eiga vit at endurskoða kappingarnar og felags venjingarlegurnar. Vit hildu fyri nøkrum árum síðani, at tað vóru ov nógvar kappingar og løgdu tí skránna um, men nú kunnu vit staðfesta, at vit hava ov fá felags tiltøk, so hetta er nakað, ið vit fara at umrøða og gera meira við frameftir.
Men feløgini gera eitt stórt arbeiði at veita eitt so gott tilboð sum gjørligt til bæði børn og vaksin. Hesum skulu vit halda fast í og víðka.
**Masters kappingar** Farna árið hava vit havt luttakarar í altjóða masters kappingum. Bæði í danskari kapping og í altjóða kappingum, so sum NM og HM.
Hetta er nakað, vit fara at halda fram við, tó so at hesar kappingar ikki verða tað berandi í altjóða kappingum, men hinvegin ein gularót til t.d. venjarar.
**EM fyri smátjóðir** Í 2022 skipaði Evropeiska Judosambandið á fyrsta sinni fyri EM fyri smátjóðir, har tíggju tey minstu limalondini í EJU luttóku.
Hendan fyrsta kappingin var í Luksembourg, og Føroyar luttóku við tíggju luttakarum (níggju monnum og einari kvinnu).
Hendan kappingin er á hvørjum ári, men í 2023 var hon partur av Small States kappingini. Har hava Føroyar ikki limaskap, og tí sluppu vit ikki at vera við. Hendan kappingin fer annaðhvørt ár at vera soleiðis, so hesi árini kunnu vit fyribils ikki luttaka, men vit vóna, at Føroyar skjótt kunnu gerast limir har, tí tað vildi givið føroyskum ítrótti yvirhøvur ein frálíkan møguleika afturat.
Í 2024 verður hendan kappingin í Kýpros, og har ætla vit at kappast.
Men annaðhvørt ár verður kappingin fyriskipað av EJU, og har fara vit sjálvandi at luttaka. Næsta tílíka kapping verður í Kýpros í 2024.
**Útbúgving** Vit hava luttikið í altjóða dómaraseminarum, og vit hava eisini havt dómaraskeið í Føroyum, har vit útbúgva fleiri dómarar at døma - bæði í Føroyum og uttanlands.
Andrias Sumberg stóð í 2023 royndina sum altjóða dómari, og hann er fyrsti føroyingur, sum er útnevndur altjóða dómari.
Vit halda fram at útbúgva dómarar. Fyri fyrst til heimligar kappingar. Síðani sleppa teir at royna seg í norðurlendskum høpi. Hjá teimum, ið hava hug til tess, er ætlanin eisini at teir fáa møguleika at fara víðari til altjóða dómara.
**FM** FM kappingin fyri børn varð hildin í Havn í mars. 75 luttóku, og kappingin gekk væl.
FM fyri vaksin er aftur í ár partur av Kontrast FM, har finalurnar verða saman við badminton og borðtennis. Hetta verður sent beinleiðis í sjónvarpinum. Hendan kappingin verður aftur í ár í Havn fyrsta vikuskiftið aftan á páskir.



**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Havnar Judofelag | 45 |
| Sunda Judofelag | 25 |
| Klaksvíkar Judofelag | 26 |
| Vága Judofelag | 43 |
| Skálafjarðar Judo | 12 |
| Suðuroyar Judo | 20 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

## Framtíðarætlanir

Judo Føroyar fer framvegis at byggja víðari á tað arbeiðið, sum vit eru í gongd við.
Vit fara í størri mun at útbúgva venjarar og dómarar, so vit kunnu veita limum okkara bestu venjingarmøguleikar.
Vit hava seinnu árini eisini fingið fleiri og fleiri foreldur við til venjingarnar. Hetta er eitt frálíkt høvi hjá teimum at venja saman við børnunum, samstundis sum tað gevur teimum góða venjing, og ikki minst stóru gleðina at gera ítrótt saman. Hetta er eisini eitt øki, sum verður hægri raðfest frameftir.
Í framtíðini vera fleiri venjingarlegur og felagsvenjingar. Hetta er ein frálíkur møguleiki at styrkja sosiala sambandið millum tey íðkandi, og samstundis sum tey fáa góða venjing, uppliva tey hetta sum eitt stuttligt tiltak.
Evropeiska Judosambandið vil hava øll limalondini við til síni tiltøk. Tey stuðla í ávísan mun hesum luttøkunum, og vit fara frameftir at økja hetta spakuliga, soleiðis at fleiri fáa møguleika at luttaka í altjóða kappingum og venjingarlegum

**Nevndarforfólk:**
Sofus Debes Johannesen

**Nevndarlimir:**
Kristianna Solberg á Túgvu, næstforfólk
Petur Sigurð Johannesen, skrivari
Silja Johannesen, nevndarlimur
Andrias Sumberg, nevndarlimur
Anna Saloma Steinberg, tiltakslimur
Bárður Hentze Lenvig, tiltakslimur

# Kurvabóltur

Menningarsambandið fyri Kurvabólt / kurvaboltur@gmail.com / Tel 590696 / www.kurvabolt.fo

**Kurvabóltur hevur verið partur av Skúlaleikum, sum ÍSF hevur skipað fyri. Vit síggja heilt greitt gleði og stuttleika millum okkara ungu, tá ið tey royna kurvabólt. Hetta hevur heilt avgjørt verið gott fyri kurvabóltin.**

## Kappingar

**Kappingar í Føroyum:**

FM kapping hjá kvinnum 22/23

FM kapping hjá monnum 22/23

**Uttanlands:**

Oyggjaleikir Guernsey-kvinnulandslið

Oyggjaleikir Guernsey-manslandslið

## Virksemi

Tað gongur væl hjá føroyskum kurvabólti, og 2023 hevur verið enn eitt søguligt ár. Økti áhugin fyri kurvabólti merkist væl. Í Runavík er eitt felag stovnað, Kurvabóltsfelagið Tarvur, sum merkir, at tað nú eru sjey kurvabóltsfeløg í Føroyum. Áhugin, bæði at spæla og fylgja við kurvabólti, økist í øllum aldursbólkum. Tað er sjálvandi torført at seta fingurin á júst eitt ávíst, sum er atvoldin til góðu gongdina. Í KSF halda vit í øllum førum, at tann aktivi luturin vit hava í tiltøkum hjá ÍSF hjálpir.

Kurvabóltur hevur verið partur av Skúlaleikum, sum ÍSF hevur skipað fyri. Vit síggja heilt greitt gleði og stuttleika millum okkara ungu, tá ið tey royna kurvabólt. Hetta hevur heilt avgjørt verið gott fyri kurvabóltin. Hetta kann væl vera ein orsøk fyri økta áhuganum.

Til almennu tiltøkini “Opið hús” og “Ert tú næsta oyggjaleikastjørnan”, har kurvabóltur var á Torginum í SMS, sást eisini heilt greitt, at kurvabóltur er nakað, sum tey ungu tíma væl. Tað bleiv ikki gjørt upp í tølum, hvussu nógv royndu seg, men har vóru heilt nógv. Tað skal ofta ikki so nógv til - ein bóltur og ein kurv eru nokk. KSF roynir altíð at vera aktivur partur í øllum tiltøkum, sum ÍSF skipar fyri. KSF metir tað vera sera týdningarmikið, at ítróttarsambondini standa saman og stuðla tiltøkunum hjá ÍSF, sum best ber til.

Tá ið vit hyggja aftur á 2023 um nøkur ár, vera tað helst Oyggjaleikirnir, sum fara at standa eftir sum nakað heilt serligt. Á fyrsta sinni var kurvabóltur umboðaður - bæði hjá kvinnum og monnum. Kurvabóltur var millum tey, ið høvdu flest íðkarar við í føroyska ferðalagnum. Hesum eru vit errin av. Íðkarar, venjarar og sjálvboðin brúktu nógva tíð og orku, so at fyrireikingarnar vóru so góðar sum yvirhøvur gjørligt.

Mansliðið hjá okkum kláraði seg sera væl, og sjónligt er, at menninir hava flutt seg sera nógv rætta vegin frá fyrstu leikunum, ið vit vóru við til. Mansliðið endaði á sætta plássi, sum heilt avgjørt er meira enn eitt góðkent úrslit. Leggjast skal afturat, at teir vóru so ómetaliga nær við at røkka einum hálvfinaluplássi. Kappingin millum liðini, sum endaðu á triðja og sætta plássi, var sera jøvn. Tað er als ikki veruleikafjart at seta sær sum mál at verða uppaftur nærri stríðnum um heiðursmerkir til leikirnir í Føroyum.

Kvinnurnar vóru við á Oyggjaleikunum fyri fyrstu ferð. Tað var sera torført at vita, hvat roknast kundi við. Kvinnur gjørdu fyri okkara viðkomandi bart, og vunnu tann eina dystin, sum eingin okkara hevði torað at droyma um. Hetta er greitt tekin um, at kvinnurnar hava tikið uppgávuna í størsta álvara, og tær hava veruliga víst, hvør dugur er í teimum. Hetta gevur okkara kvinnum trúnna uppá, at harða arbeiðið hevur loyst seg, og hetta er bert byrjanin upp á føroyska kvinnulandsliðið.

## Feløg og limatøl

| | |
|---|---|
| Kurvabóltsfelagið Hávur | 44 |
| Kurvabóltsfelagið Hamar | 43 |
| Kurvabóltsfelagið Sporðdrekin | 70 |
| Kurvabóltsfelagið Ravnur | 47 |
| Kurvabóltsfelagið Nykur | 14 |
| Kurvabóltsfelagið Falkur | 13 |



**Nevndarforfólk:**
John Norðbúð Thomsen

**Nevndarlimir:**
Anna Petersen, skrivari
Sára Isfeldt, kassameistari
Sølvi Olsen á Skúr, nevndarlimur
Magnus Jakobsen, nevndarlimur

## Aðrar nevndir:

**Kappingarnevnd:**
Kenneth á Argjaboða
Súsanna Mørk
Magnus Jakobsen

**Dómsnevnd**
Rainer Latupeirissa
Sigrid Midjord
Pól Jakobsen

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Parasport

Parasport Føroyar / parasport@parasport.fo / Tel 217975 / www.parasport.fo

**Markleys leggur stóran dent á felagsskap, menning og stuttleika. Hvussu dugnaligur ein ynskir at blíva, er upp til hvønn einstakan.**

## Strategi

Á aðalfundinum varð strategi fyri Parasport fyri komandi 5 árini (2023–2028) løgd fram og góðkend. Síðani varð arbeitt við einum faldara, sum nevndin læt gera til almenna nýtslu. Strategiin hjá Parasport hevur fimm høvuðsøki, ið fokus verður sett á komandi fimm árini.

1. Styrkja/greina tann organisatoriska partin (professionalisma og fíggjarliga grundarlagið)
2. Styrkja tilvitanina í samfelagnum um Pararørsluna og brandið.
3. Vaksa um breiddina og styrkja elituna
4. Fremja inklusjón
5. Betra og birta undir samstarvið við viðkomandi feløg og samstarvsfelagar.

Nevndin hevur sett verkætlanarfólk í tvey ár, sum skal hjálpa við at seta strategiina í verk. Signar Hilmarsson, ið er útbúgvin í ítrótti og heilsuvísindi, byrjaði í starvinum 1. oktober.

**Markleys**

Í 2023 er samstarv tikið upp aftur við Guðruna Jacobsen um at byrja parabadminton undir heitinum "Markleys"
Vit halda, at hetta kann tala til breiddina, tí einki mark er fyri, hvør kann vera við. Hetta kann eisini tala til elituna, tí einki mark er fyri, hvussu langt tú kanst koma.
Markleys-átakið leggur serligan dent á rekrutering, menning og at føra børn og ung við virkistarni í aldrinum 7-15 ár út í nærliggjandi ítróttarfeløg. Markleys er ikki eitt vanligt paravenjingartilboð, men eitt rekruterings- og menningartilboð.
Markleys leggur stóran dent á felagsskap, menning og stuttleika. Hvussu dugnaligur ein ynskir at blíva, er upp til hvønn einstakan. Venjararnir tillaga venjingina til hvønn íðkara. Um ein ætlar at fara allan vegin og íðka úrvalsítrótt, skal hetta eisini vera ein møguleiki, men tó einki krav.
Málið er at styrkja Markley badminton og byrja Markleys svimjing í 2024.

## Kappingar

**Í Føroyum:**

FM í Special Olympics borðtennis, 23. mars, Tórshavn
FM í Special Olympics bowling, 25. mars, Tórshavn
FM í Special Olympics boccia, 26. mars, Glyvrar
Jysk open svimjikapping, 27. mars, Tórshavn
Jólasvimjikapping, 27. november, Tórshavn
Jólabowlikapping, 20. november, Tórshavn
Jólabocciakapping, 2. desember, Runavík
Jólaborðtenniskapping, 8. desember, Tórshavn

**Uttanlands:**

Malmø open, boccia og bowling, 10.-12. februar, Malmø í Svøríki
Para svimjistevna, 5. apríl, Allerød DK.
NM í boccia, 4.-7. mai, Vejen DK.
Virtus Global Games, 4.-11. juni, Vichy FRA.
Special Olympics World Games, 17.-25. juni, Berlin TÝS.
WAS Framerunning cup, 20.-23. juli, Frederiksberg DK.
Para NM á stuttgeil, 1.-3. desember, Tartu EST

## Virksemi

Sum vant varð skipað fyri Special Olympisku FM kappingunum áðrenn páskir í 2023.
Kappingarnar gingu sera væl, og gleðast vit um, at luttakaratalið spakuliga er á veg uppaftur eftir nøkur ár við niðurgongd.
Í november/desember varð skipað fyri jólakappingunum, og eisini hesar høvdu góða undirtøku.
Miðað verður eftir at fáa nakrar av kappingunum út úr Havnini, og hava bocciakapping og bowlikapping verið í Eysturoy í farna árið. Hetta hevur riggað sera væl í samstarvi við venjararnar hjá feløgunum.

**Special Olympics ítróttir:**

Absolutt størsta tiltakið í 2023 var Special Olympics World Summer Games, ið hesa ferð var í Berlin.
Ferðalagið taldi 24 fólk, har 14 vóru íðkarar.
Fýra Special Olympics íðkarar luttóku í Malmø open: Aleksander Mittún Darvichy og Durita Strøm í bowling og Tummas Wilhelm og Unn Mortensen í borðtennis.
Tríggir íðkarar luttóku í parasvimjistevnu í Allerød DK: Signa Vár Dávadóttir, Hóri Hemmingson og Jórun Mai Smith

**Paraítróttir:**

Áki Joensen var til kapping í Poznan í Póllandi, har hann royndi at vinna sær stig til PL luttøku. Áki Joensen, Unn Mortensen, Meiken Olsen og Mirjam Hansen luttóku í NM í Boccia, sum



**Nevndarforfólk:**
Petur Elias Petersen

**Nevndarlimir:**
Tóra Norðgerð, næstforfólk
Hans Karl Højgaard, skrivari
Anna Gaardlykke, nevndarlimur

**Kappingarnevndin:**
Tóra Norðgerð, forfólk
Hans Karl Højgaard, skrivari
Anna Gaardlykke, nevndarlimur

**Special Olympics nevnd:**
Tóra Norðgerð, national director
Tróndur Ravnsfjall, sports director
Petur Elias Petersen, fíggjarkønur
Meiken Olsen, íðkaraumboð
Anette Olsen, foreldraumboð

**Lønt starvsfólk:**
Tróndur Ravnsfjall, ítróttaráðgevi
Signar Hilmarsson, verkætlanarfólk

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Smæran | 30 |
| Svanur | 110 |
| Ljósið | 276 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

var í Danmark. Her vann Áki bronsu í einmansleiki og gull í tvímansleiki.
Signa Vár Dávadóttir var einsamallur føroyskur luttakari í Virtus Global Games í Vichy í Frankaríki. Kappingarnar hjá Signu Vár gingu sum heild væl, og hevði hon fleiri góðar plaseringar, umframt tvey bronsuheiðursmerki við í skjáttuni heimaftur.
Tveir íðkarar, Martin Johannesen og Ábraham Bjarnason, luttóku í árligu WAS Framerunning CUP í Frederiksberg í juli.
Í samstarvi við SSF og Havnar svimjifelag bleiv gjørt av at bjóða Andreasi Mellemgaard til NM í svimjing, sum var í Riga. Hetta samstarvið riggaði væl, og fekk Andreas góð úrslit og virðismikla læru av túrinum.

## Framtíðarætlanir

Fleiri kappingar og tiltøk eru á skránni í 2024
Umframt tær átta føstu kappingarnar, sum Parasport skipar fyri, er ætlanin eisini at skipa fyri og luttaka í øðrum kappingum
Parasport hevur fingið innbjóðing til Special Olympics festivalin í Frederikshavn, sum verður í mai 2024.
Íðkarar, ið íðka fimleik, borðtennis, svimjing, boccia og bowling vera við í ferðalagnum, ið telur 27. fólk.
Nú Føroyaleikir vórðu avlýstir verður skipað fyri eini boccia-kapping í summar ístaðin.
Oyggjaleikir 2027
Framerunning C&C verður í DK í juli, og hevur starvsnevndin úttikið tríggjar íðkarar at luttaka.
NM í frælsum ítrótti verður í Svøríki í august, og vónin er, at vit hava luttakara við har.
Ætlanin er eisini at luttaka í tveimum parasvimjikappingum.
Kappingarnar í 2024 eru liður í arbeiðinum at vinna luttøku í PL um 4 ár.

# Ríðing

Ríðisamband Føroya / info@ridisamband.fo / Tel 511618 / www.ridisamband.fo

**Fimm kappingarumfør eru vanliga í kappríðing, har dystast verður um hava skjótasta rossið í fimm ymsum greinum. Hetta eru kappingar. ið byrjaðu fyri 100 árum síðani. Tí er kappríðing millum elstu ítróttagreinir í Føroyum.**

## Kappingar

**Í Føroyum**

**FM kappingar:**

Á hvørjum ári verður skipað fyri regluligum FM kappingum. Fimm kappingarumfør eru vanliga í kappríðing, har dystast verður um hava skjótasta rossið í fimm ymsum greinum. Hetta eru kappingar. ið byrjaðu fyri 100 árum síðani. Tí er kappríðing millum elstu ítróttagreinir í Føroyum.

Tað eru fimm ymiskar kappingargreinir. Trav, Tølt, Skeið, Tvíspor ung og Tvíspor vaksin. Sostatt eru 25 FM kappríðingar á hvørjum ári. Ríðisamband Føroya skipar fyri hesum kappingum í tøttum samstarvi við feløgini.

Skipað verður eisini fyri kappingum í gonguløgum fyri íslandsross. Fýra kappingar eru árliga. Hendan kapping er aftur deild upp í bólkar fyri tey ymsu gonguløgini og sergreinar innan fyri hesi gonguløg. Vanliga verður kappast í seks greinum, t.v.s. at tað eru minst 24 kappingar hvørt ár. Hesar kappingar vera fyriskipaðar eftir altjóða lógarverki, tí hetta er grein har ross, reiðfólk og dómarar hava møguleika at koma út um landoddarnar at dystast.

Um veturin skipa feløgini eisini hvør í sínum lagi fyri kappingum. Hetta gongur serliga fyrí seg í reiðhøllunum í Havnardali - og nú eisini í Miðvági, har góðir møguleikar eru fyri hesum.

**Uttanlands:**

**HM silvur**

Aftaná NM gullið í Álandi var tað ein spentur hópur, ið fór til HM í Niðurlondum. Aftur hesa ferð bragdaði hjá føroysku reiðfólkunum, og gleðin var stór, tá ið tey komu heim við einum HM-silvurheiðursmerki. Unga Rakel B. Tindskarð vann tað í greinini T1 fyri ung. Hon reið á hestinum Sílas vom Forstwald. HM silvurið er eitt satt bragd, og tað boðar frá góðum framtíðarútlitum.

## Virksemi annars

**Tvífalding av limafeløgum**

Limatalið í Ríðisambandinum er tvífaldað, síðan tað bleiv stovnað í 1997. Trý feløg hava verið í sambandinum, men seinastu fýra árini eru trý feløg komin afturat. Fyrst komu eysturoyingar í Sleipni við, síðani suðringar í Suðurrossi, og nú eru kollfirðingar í Dalarossi eisini komnir við. Hesi eru enn lutfalsliga lítil feløg, men vit vóna, at tey vaksa, so hvørt sum umstøðurnar hjá teimum gerast betri.

**Farvæl til Marknagil**

Tað man metast sum afturstig fyri ítróttina, at elsta og største ríðibreytin í landinum má víkja fyri nýggja innkomuvegnum í Tórshavnar Kommunu. Kappríðing hevur verið í Marknagili á hvørjum ári síðani 1970. Føroya Ríðingarfelag, sum eigur breytina, er tó í samstarvi við kommununa í gongd við ætlanir um nýggja breyt á økinum hjá felagnum í Havnardali. Hetta fer tó heilt víst at ávirka FM kappingarnar í 2024.

**Nevndarforfólk:**
Brandur í Dali

**Nevndarlimir:**
Zacharias R. Jacobsen, næstforfólk
Valborg Laksafoss, nevndarlimur
Poula Tornby, tiltakslimur

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Vága Ríðingarfelag | 120 |
| Føroyskt Íslandsrossafelag | 150 |
| Føroya Ríðingarfelag | 400 |
| Sleipnir | 50 |
| Suðurross | 30 |
| Dalaross | 0 |



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Rógving

Róðrarsamband Føroya / rsf@rsf.fo / Tel 267553 / www.rsf.fo / www.innirodur.rsf.fo

**Øll feløg undir RSF gera eitt megnararbeiði fyri sjálvboðin. Uttan sjálvbodnu fjøldina var ógjørligt at skipa kappróður.**

## Strategi

1) Breidd - 2) Úrval - 3) Sjálvboðin - 4) Ítróttagleði
Flestu feløgini undir RSF bjóða øllum áhugaðum møguleika at brúka hølir og bátar til stuttleikavenjingar uttan kappingarluttøku. Feløgini standa sjálvi fyri arbeiðinum at styrkja umhvørvið.

RSF er ikki partur av úrvali hjá ÍSF, tí sambandið hevur ikki altjóða viðurkenning.
Øll feløg undir RSF gera eitt megnararbeiði fyri sjálvboðin. Uttan sjálvbodnu fjøldina var ógjørligt at skipa kappróður.
RSF frøist um, at serliga ung róðrarfólk týðiliga vísa gleði við at hoyra til róðrarumhvørvið.

## Kappingar

**Í Føroyum:**

Sjey FM kappingar, trý ódnartøk og fýra Grandprix í innilróðri.
Grandprix og FM í inniróðri - Við Streymin 11.03.2023
Ódnartak 1.-Runavík 29.04. 2023
Ódnartak 2 -Miðvági 13.05. 2023
Ódnartak 3 -Norðragøtu 20.05. 2023
Norðoyastevna-03.06. 2023
Sundalagsstevna (Hósvík)-17.06. 2023
Jóansøka (Tvøroyri)-24.06. 2023
Varmakelda í Fuglafirði-01.07. 2023
Fjarðastevna á Strondum-08.07. 2023
Vestanstevna (Miðvágur)-15.07. 2023
Ólavsøka-28.07. 2023
Grandprix 1 -Trongisvági 30.09. 2023
Grandprix 2.-Vestmanna 04.11. 2023
Grandprix 3.-Kambsdali 09.12. 2023
Open Nordic Championship (netborið), sum skuldi vera 11.02.2023, varð avlýst

**Uttanlands:**

DM í Gladsax  januar 2023
EM í París-februar 2023
HM í Toronto-februar 2023

## Virksemi

Árligi aðalfundurin hjá RSF er í mars á hvørjum ári. Í apríl vóru allir nevndarlimir, dómarar og umsiting á trygdarskeiði við Áir. Hetta kom í kjalarvørrinum av óhappinum, sum hendi á vestanstevnu í Sørvági 16. juli 2022. Á heysti var eftirmetingarfundur hjá kappróðrinum. Umframt kappingar, hevur RSF luttikið í Skúlaleikum, Puls á Glasi og ABC tiltakinum í SMS. RSF hevur saman við Tjóðsavninum eisini luttikið í Unesco tiltakinum í Danmark um varðveitslu av føroyska bátinum. Umboð fyri nevnd og umsiting hava havt tveir fundir uttanlands við NOR og Dansk Roning. Nýggj lóg um inniróður er skrivað, samtykt og tikin í nýtslu.

## Framtíðarætlanir

Luttaka í oyggjaleikum 2027 við onkrum slagi av sýningarítrótti. Arbeiða fram móti at fáa Parasport við í inniróður. Arbeiðið við at søkja um altjóða limaskap í World Rowing er nærri málinum.

## Sosialir miðlar

www.facebook.com/rsf1980
#faroeserowing á Instagram

**Nevndarforfólk:**
Annika V. Dalsgarð

**Nevndarlimir:**
Elsa Magnussen, næstforfólk
Petur Hansen, skrivari
Hugo Skorastein

**Lønt starvsfólk:**

| | |
|---|---|
| Annika Jacobsen, samskipari | 0,5 |
| Ulrik Andersen, teknisk ábyrgd | 0,5 |



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

## Feløg og limatøl

| | |
|---|---|
| Argja Róðrarfelag (AR) | 96 |
| Árnafjarðar Róðrarfelag | 0 |
| Eiðis Róðrarfelag (ERF) | 21 |
| Froðbiar Sóknar Róðrarfelag (FSR) | 39 |
| Haldórsvíkar Kapplóðrarfelag | 0 |
| Havnar Róðrarfelag (HR) | 196 |
| Hósvíkar Róðrarfelag (HVR) | 56 |
| Hvalbiar Róðrarfelag | 0 |
| Hvalvík- Streymnesar Róðrarfelag (HSR) | 25 |
| ÍF Kapplóður | 68 |
| Kapplóðrarfelagið NSÍ | 84 |
| Kapplóðrarfelagið Tindur | 83 |
| KÍF Kapplóður | 60 |
| Klaksvíkar Róðrarfelag (KRF) | 97 |
| Kvívíkar Sóknar Róðrarfelag (KSR) | 20 |
| Miðvágs Róðrarfelag (MR) | 63 |
| Nólsoyar Ítróttafelag (NÍF) | 12 |
| Norðdepils Hvannasunds Róðrarfelag (NHR) | 39 |
| Róðrardeild Sandavágs Ítróttafelag (SÍF) | 56 |
| Róðrarfelagið Knørrur | 98 |
| Skála Róðrarfelag | 44 |
| Strálan, Strendur | 7 |
| Sunda Róðrarfelag (SU.R.F.) | 0 |
| Sørvágs Róðrarfelag (SR) | 45 |
| Vágs Kapplóðrarfelag (VK) | 28 |
| VÍF Kapplóður | 80 |
| **Aktivir limir 2023** | **1317** |

SERSAMBANDIÐ FYRI
SÚKKLING OG TRIATHLON

# Súkkling og Triathlon

Sersambandið fyri Súkkling og Triathlon / sst@sst.fo / Tel 216420 / www.sst.fo

**Tað var gott, at Oyggjaleikir vórðu fyriskipaðir aftur í Guernsey 2023. Hjá súkkling og triathlon eru fýra ár gingin síðan seinastu oyggjaleikaluttøkuna á Gibraltar í 2019.**

## Strategi

1) Breidd - 2) Úrval - 3) Sjálvboðin - 4) Ítróttagleði

Vit hava roynt at fáa feløgini at skipa fyri avbjóðingum og kappingum. Vit síggja, at tað er áhugi fyri hesum tiltøkum.

## Kappingar

**Í Føroyum:**

FM veg í tíðarsúkkling bleiv hildin 14. juni á Strondum. Her vann Jákup Petur framman fyri Magna á øðrum plássi og Bergtór á triðja plássi. Anida vann hjá kvinnum.

17. juni var kapping í FM veg í vegasúkkling, hetta var samstundis eisini skipað sum ein súkkluavbjóðing upp á 104 km. úr Runavík til Havnar - um Eiðisskarð og Oyggjarvegin. Vinnari hjá monnum bleiv Jákup Petur framman fyri Gunnar, sum stríddist við Paula Poulsen um 2. plássið. Fyrsta kvinnan, ið kom á mál, var Sigrid Bjartalíð.

28. juni bleiv skipað fyri FM í mountain bike/fjallasúkkling (MTB) á stuttum teini í økinum kring Eirargarð, har Helgi vann framman fyri Hilmar á øðrum plássi og Gunnar á triðja plássi.

30. juni var aftur FM kapping í MTB. Kappast varð á olympiska teininum uppi við Hotel Føroyar. Her vann Helgi. Hilmar og Gunnar komu á mál sum nr. 2 og 3.

3. september bleiv FM í sprint Triathlon hildið í Havn. Her vann Magni, Helgi fekk 2. plássið og Erik 3. plássið.

FM veg í býarsúkkling bleiv útsett til 1. oktober. Kappast varð á rundstrekki úti hjá Wenzel. Her gjørdist Helgi FM vinnari framman fyri Niklas á øðrum plássi og Magna á triðja plássi.

FM MTB á langteini bleiv súkklað 28. oktober eftir einari nýggjari rutu í Havnardali. FM Vinnari gjørdist Helgi framman fyri Jákup Petur og Andrass. Í hesum sambandi kann nevnast, at Helgi hevur vunnið øll trettan FM-heitini í fjallasúkkling á langteini (MTB XCM) síðan 2011, tá ið fyrsta FM á MTB langteini varð fyriskipað undir SST.

**Uttanlands:**

Tað var gott, at Oyggjaleikir vórðu fyriskipaðir aftur í Guernsey 2023. Hjá súkkling og triathlon eru fýra ár gingin síðan seinastu oyggjaleikaluttøkuna á Gibraltar í 2019. Heili seks ár eru gingin, síðan fjallasúkkling varð fyriskipað seinast. Tað var í Gotlandi í 2017. Hetta var somuleiðis fyrstu ferð, at vit brúktu nýggju úttøkukrøvini í sambandi við Oyggjaleikir. Tíanverri var eingin kvinna við til Oyggjaleikir fyri triathlon ella súkkling, men vit fingu úttikið sjey menn. Fleiri yngri íðkarar sluppu at royna seg fyri fyrstu ferð í kapping fyri Føroyar saman við nøkrum av teimum royndu.

## Virksemi

2023 bleiv fyri SST fyrsta árið, tá ið vit arbeiddu nógv við okkara altjóða at-limaskapi í UCI og World Triahlon. Har serliga lisensir til føroyskar íkarar, sum kappast altjóða, ikki eru komnir upp á pláss í 2023.

SST hevur skipað fyri átta FM kappingum í 2023. Fyrsta kappingin var FM í Triathlon, har kappast varð í OL teininum í Havn. Svomið varð í svimjihøllini í Gundadali, súkklað til Kaldbaks og runnið runt í økinum á Hálsi. FM-heitið vann Magni framman fyri Bergtór og Gunnar. Hjá kvinnum vann Anida, sum eisini var einasta kvinnan, ið luttók.

## Framtíðarætlanir

SST fer at arbeiða við at fáa eitt skipað venjaraskeið, sum skal vera afturvendandi komandi árini.

Eisini er ætlanin at bjóða eitt dómaraskeið til teirra, sum døma triahlon og súkklukappingar. Fyri at blíva góðkendur dómari krevur tað, at dómarar skulu uttanlands at vera hjálpardómarar tey fyrstu árini.

## Sosialir miðlar

Facebook: Sersambandið fyri súkkling og triathlon
Instagram: sst.fo




**Nevndarforfólk:**
Arnfinnur Helmsdal

**Nevndarlimir:**
Lena Hallgren, næstforfólk og kassameistari
Ken Nolsøe, nevndarlimur

**Starvsfólk:**
Sølvi Reinert Hansen, samskipari 0,25

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Tórshavnar Súkklu og Triathlon felag | 25 |
| Norðstrok | 33 |
| Skatefelagið | 17 |
| Troy | 3 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

SKJÓTISAMBAND FØROYA

# Skjóting

Skjótisamband Føroya / skot@skot.fo / Tel 244143 / www.skot.fo

**Allar skjótibreytir í Føroyum í dag verða riknar av sjálvbodnum í limafeløgunum. Uttan sjálvboðin høvdu ongar breytir verið í rakstri í dag.**

## Strategi

Breidd - Úrval - Sjálvboðin – Ítróttagleði:

Strategiin, sum bleiv samtykt á aðalfundinum hjá ÍSF í mai mánaði í 2022, varð heldur ikki beinleiðis partur av rakstrinum hjá Skjótisambandi Føroya (SkF) í 2023.

Orsøkin er helst, at longu áðrenn orð blivu sett á eina strategi, hava vit verið tilvitað um nógv av tí, sum stendur í strategiini. Allar skjótibreytir í Føroyum í dag verða riknar av sjálvbodnum í limafeløgunum. Uttan sjálvboðin høvdu ongar breytir verið í rakstri í dag. Tey sjálvbodnu gera arbeiðið, tí tey hava alsk til felagið og ítróttina. Tey gera tað ikki, tí tey vilja hava nakað afturfyri. Av og á skipa limafeløgini tó fyri arbeiðsdegi fyri limirnar, har endað verður við ymiskum sosialum tiltøkum fyri sjálvboðin.

Øll, sum hava roynt leirdúgvuskjóting, vita, at tað er ein ítróttagrein, har gleðin er stór, tá ið tú rakar dúgvuna, men tað kann vera torført at raka, tá ið tú ert nýggjur íðkari. Tí hava fleiri limafeløg skipað venjing fyri nýggjar limir, har ferð og vinklar á kastimaskinunum verða lækkað soleiðis, at tað ikki gert ov torført at raka dúgvuna. So hvørt, sum íðkarin hevur framgongd, verða ferð og vinklar settir líðandi upp til kappingarstig.

## Kappingar

**Í Føroyum:**

| | | |
|---|---|---|
| 25-03 | Tórshavn | F80 kappingin |
| 08-04 | Leirvík | Apríl kapping |
| 15-04 | Við Norðskála | 37 ára kappingin |
| 22-04 | Leirvík | Flaggdagskappingin |
| 29-04 | Vestmanna | Krossmessukappingin |
| 13-05 | Tórshavn | 12. Simme Cup |
| 20-05 | Leirvík | Mai kappingin |
| 27-05 | Við Norðskála | Magn við Streymin |
| 27-05 | Tórshavn | Vármúlakappingin |
| 10-06 | Leirvík | F-16 kappingin |
| 10-06 | Við Norðskála | Summarkappingin |
| 24-06 | Tórshavn | Jóansøkukappingin |
| 24-06 | Vestmanna | Syftusøkukapping |
| 01-07 | Leirvík | Trap kapping |
| 22.-23.07 | Tórshavn | Tórshamar Open |
| 05-08 | Leirvík | Eysturoyar Cup |
| 12-08 | Leirvík | FM trap |
| 19.-20.08 | Tórshavn | FM OL trap |
| 26-08 | Við Norðskála | FM Skeet - dagur 1 |
| 27-08 | Tórshavn | FM Skeet - dagur 2 |
| 09-09 | Við Norðskála | Veðrakappingin |
| 30-09 | Tórshavn | Mikkjalsmessukappingin |
| 28-10 | Tórshavn | Harukappingi |

**Uttanlands:**

| | | |
|---|---|---|
| 18-03 | Danmark | Esbjerg - 75 dúgvur |
| 09-04 | Danmark | Aalborg påske 75 dúgvur |
| 15-04 | Danmark | Sydvestjysk Grand Prix |
| 29-04 | Danmark | Horsens Grand Prix |
| 13-05 | Danmark | CPH Grand Prix |
| 20-05 | Danmark | OL Trap 2023 LM Jylland |
| 03-06 | Danmark | Aalborg Grand Prix - OL trap |
| 03-06 | Danmark | Scandinavia Open |
| 08-07 | Guernsey | Oyggjaleikir |
| 12-08 | Danmark | Viborg Grand Prix |
| 24-08 | Danmark | Landskamp skandinavisk mesterskab |
| 23-09 | Danmark | Horsens efterårs GP |

## Virksemi

**Oyggjaleikir**

Største, einstaka ítróttahending hjá SkF í 2023 vóru oyggjaleikirnar á Guernsey, har føroysku íðkararnir vunnu eitt gull-, tvey silvur- og trý bronsuheiðursmerki.

Átta íðkarar vóru við á landsliðinum, og er hetta største landslið, sum SkF nakrantíð hevur úttikið til oyggjaleikir. Helvtin av íðkarunum vóru á oyggjaleikunum fyri fyrstu ferð.

Hóast vit ikki hava siðvenju við English Skeet skjótigreinini í Føroyum, gjørdi SkF av at tekna eitt landslið til luttøku í tí greinini. Hóast hetta var fyrstu ferð, so megnaðu føroysku íðkararnir at liggja uml. á miðjuni á úrslitalistanum.

**Príshækkingar**

Prísurin fyri patrónir og dúgvur er hækkandi, og seinastu tvey árini er prísurin hækkaður við uml. 55 prosentum. Metingarnar eru, at prísurin fer at halda á at hækka í 2024. Orsøkin sigst




**Nevndarforfólk:**
Esmar A. Joensen

**Nevndarlimir:**
Finn Ludvig, nevndarlimur
Jógvan Egholm, nevndarlimur
Jónstein Johannesen, nevndarlimur
Tórur Fløtt, nevndarlimur

**Lønt starvsfólk:**
Herleif Hammer, skrivari

**Feløg og limatøl**

| | |
|---|---|
| Veiðifelagið Byrsumúli (VBM), Tórshavn | 199 |
| Eysturskot (EYS), Leirvík | 51 |
| Sunda Byrsufelag (SBF), Norðskáli | 23 |
| Vestmanna Byrsufelag (VBF), Vestmanna | 44 |

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

vera inflatión og kríggið í Ukraina.
Ógvusligu príshækkingarnar eru kanska ein av størstu hóttanum í móti at fáa nýggjar íðkarar til leirdúgvuskjóting í løtuni, tí umframt, at prísurin á patrónum og dúgvum er høgur, so er útgerðin til skjóting rættiliga kostnaðarmikil.

**Skjótibreytir**
Fýra skjótibreytir eru í Føroyum. Tann størsta liggur á Sandvíkum í Tórshavn. Ein umfatandi útbygging hevur verið av breytini seinastu trý árini. Útbygging er ikki liðug enn. Í løtuni verður nýtt felagshús bygt, og seinna skeet-breytin er innrættað til at skipa fyri venjingum til unglingar og óroynd.
Vestmanna Byrsufelag rekur breytina í Vestmanna. Tey eru komin á mál við at byggja nýtt felagshús við síðuna av breytini, og hava nú útvegað útgerð til kastimaskinu, ið kastar dúgvur, sum minna um harur. Í Vestmanna er siðvenja fyri haruveiðu, og vóna tey, at hendan íløgan fer at fáa fleiri limir til felagið.
Við Norðskála liggur breytin hjá Sunda Byrsufelag. Hvønn mikudag hevur felagið skipað fyri venjing til ung og óroynd. Í løtuni verður lendið hampað fyri at verja breytina móti veðrinum og fyri, at ruddingin skal gerast lættari.
Seinasta virkandi breytin, er breytin úti á Vík í Leirvík, sum Eysturskot rekur. Felagið hevur hampað og gjørt lendisarbeiðið kring breytina, so tað er lættari at halda breytina reina. Skipað verður fyri regluligum venjingum í Nordisk Trap og ABT/OL trap summarhálvuna.

| Kapping | Grein | Vinnari | Unglingakapping |
|---|---|---|---|
| Føroyameistari | OL Trap | Finn Ludvig, VBM | Bartal Klettheyggj, VBM |
| Føroyameistari | Trap | Alex Johannesen, EYS | Bartal Klettheyggj, VBM |
| Føroyameistari | Skeet | Tórur Fløtt, SBF | Jóhann Fløtt, SBF |
| Grand Prix | Trap | Alex Johannesen, EYS | |
| Grand Prix | Skeet | Tórur Fløtt, SBF | |
| Føroya Cup | Trap | Alex Johannesen, EYS | |
| Føroya Cup | Skeet | Tórur Fløtt, SBF | |

# Svimjing

Svimjisamband Føroya / ssf@ssf.fo / Tel 607559 / www.ssf.fo

**Føroysk svimjing hevur so við og við fótað sær eftir koronukreppuna, so tilboðini nú eru mong hjá okkara svimjarum bæði í Føroyum og uttanlands, umframt at úrslitini nú eisini batna.**

## Strategi

SSF hevur síðani 2021 arbeitt við at betra um sína fyrisiting út frá árligari 'good governance' kanning hjá altjóða svimjisambandinum. Hetta er eisini gjørt í samráði við limafeløgini. Betringar í 2022 vóru m.a. innføring av etiskari reglugerð og reglugerð um fyribyrging av ágangi og misbrúki, umframt aldursmark fyri starvsnevndarlimir og innføring av fyribils íðkaranevnd. Betringar í 2023 vóru m.a. reglugerð fyri íðkaranevnd og val millum íðkarar til hesa somu nevnd. Aftur at hesum var eisini broyting í lóg hjá SSF um atkvøðurætt til aðalfundin.

Hartil hava vit arbeitt miðvíst við at tilrættarleggja framtíðina, so at árligi kalendarafundurin avtalar stevnur til árið eftir, umframt, at virksemis- og fíggjarætlan hjá SSF verður løgd fram og viðgjørd saman við feløgunum trý ár fram. Og vit royna nú eisini at hava eina nágreiniligari landsliðsætlan klára til komandi skúlaár.

Strategiin hjá ÍSF kemur aftur at hesum, og verður so vítt gjørligt fingin at hóska inn í høvuðsætlanina. Dentur er á at royna at økja um tilboðini og at lova fleiri svimjarum framat, umframt at styrkja um sjálvbodna hópin.

## Kappingar

**Í Føroyum:**

| | |
|---|---|
| 14.-15. januar 2023 | SuSvim Open (50m.), Vágur |
| 4. februar 2023 | FLOT-stevna B1-3 (16m.), Toftir |
| 18.-19. februar 2023 | Ægir Open (25m.), Klaksvík |
| 4. mars 2023 | SuSvim-stevna B1-4 (16m.), Vágur |
| 18.-19. mars 2023 | HS Open (25m.), Tórshavn |
| 25. mars 2023 | Reysta-stevna B1-4 (16m.), Leirvík |
| 14.-16. apríl 2023 | Atlantic Open (25m.), Tórshavn |
| 22. apríl 2023 | HS-stevna B1-4 (25m.), Tórshavn |
| 6.-7. mai 2023 | ABMS (25m.), Klaksvík |
| 20.-21. mai 2023 | SuSvim Open (50m.), Vágur |
| 16.-18. juni 2023 | FML/JML (50m.), Vágur |
| 23. september 2023 | HS-stevna B1-4 (16m.), Argir |
| 30. sep.-1. okt. 2023 | HS Open (25m.), Tórshavn |
| 21.-22. oktober 2023 | Ægir Open (25m), Klaksvík |
| 28. oktober 2023 | SuSvim-stevna B1-4 (16m), Vágur |
| 10.-12. november 2023 | FMS/JMS (25m), Tórshavn |
| 18. november 2023 | ABMS (25m), Klaksvík |
| 2. desember 2023 | FS-stevna (16m), Fuglafjørður |
| 16. desember 2023 | HS jólastevna (25m), Tórshavn |

**Uttanlands:**

| | |
|---|---|
| 1.-4. apríl 2023 | Danish Open (50m), Bellahøj, |
| 10.-11. juni 2023 | Sumarmót Íslands (50m), Reykjavík |
| 8.-9. juli 2023 | NMU (50m), Jönköping |
| 10.-13. juli 2023 | Oyggjaleikir (25m), Guernsey |
| 23.-30. juli 2023 | HM (50m), Fukuoka |
| 10.-13. august 2023 | EM U23 (50m), Dublin |
| 6.-8. oktober 2023 | World Cup (50m), Berlin |
| 1.-3. desember 2023 | NM/NJM (25m), Tartu |

## Virksemi

Føroysk svimjing hevur so við og við fótað sær eftir koronukreppuna, so tilboðini nú eru mong hjá okkara svimjarum bæði í Føroyum og uttanlands, umframt at úrslitini nú eisini batna. Stór føroysk luttøka var t.d. í Reykjavík International í januar 2023 við góðum úrslitum, og føroyskir svimjarar hava yvirhøvur svomið væl alt árið í samband við landsliðsuppgávur - mált í persónligum metum.

Svimjingin var tann føroyska ítróttin, ið vann mest á oyggjaleikunum í Guernsey í fjør, og vit megnaðu hartil eisini at vinna heiðursmerki í norðurlendsku juniormeistarastevnuni í Estlandi í desember 2023. Fleiri føroysk met vórðu sett, og tríggir svimjarar svumu seg til gullnál í 2023. Tey vóru Elisabeth Erlendsdóttir á Danish Open í apríl, og Líggjas Joensen og Isak Brisenfeldt á Norðurlendsku Juniormeistarastevnuni í desember.

Landsliðsvirksemið er so smátt komið í eina fasta legu við regluligum landsliðslegum og við títtum uttanlandstilboðum til bæði tey bestu og tey næstbestu. Eitt, sum er nýtt, er, at vit nú royna okkum við einum landsliðstoymi heldur enn einum landsliðsvenjara sum so í felag og saman við feløgum fyriskipa tiltøk til landsliðssvimjarar og talent.

Nýggj svimjinevnd varð skipað í vár, og hon slapp at royna seg við nógvum uppgávum í 2023.

Tey bæði Pál Joensen og Signhild Joensen fingu sum fyribils íðkaranevnd í lag val til somu nevnd, so at vit nú við ársbyrjan 2024 hava eina veruliga íðkaranevnd, sum er fyriskipað av



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

íðkarunum sjálvum. Eitt av spennandi átøkunum í 2024 verður ein ætlað gallaveitsla aftan á FM í november.
Okkara tríggir altjóða yvirdómarar vórðu í 2023 úttiknir til Evropeisku juniormeistarastevnuna og Evropeisku U23-meistarastevnuna, og vit fingu ein yvirdómara útbúnan afturat í heyst. Tørvurin er tó enn stórur á bæði dómarum og yvirdómarum. Vit fingu eisini eitt felag afturat í 2023, tá ið Svimjifelagið Hellufossur í Kvívík varð stovnað.

## Framtíðarætlanir

SSF virksemisætlan 2023-2026 pr 10. februar 2024
SSF landsliðsætlan 2023 - Avgreitt
SSF landsliðsætlan 2024

## Annað

Formaðurin í SSF hevur síðani 2022 verið limur í ovastu nevndini hjá evropeiska svimjisambandinum og hevur verið nevndarumboð í.s.v. virksemið í miðling og svimjiførleika. Tað hevur verið avbjóðandi, men eisini spennandi, og var tað eitt herðaklapp, at hann í 2024 var afturvaldur í nevndina fram til 2028.

| **Feløg og limatøl** | 400 |
|---|---:|
| Havnar Svimjifelag (HS) | 152 |
| Suðuroyar Svimjifelag (SuSvim) | 400 |
| Svimjifelagið Ægir (Ægir) | 162 |
| Svimjifelagið FLOT (FS) | 72 |
| Svimjifelagið Reysti (Reysti) | 42 |
| Fuglafjarðar Svimjifelag (FS) | 30 |
| | **1258** |

**Nevndarforfólk:**
Rókur í Jákupsstovu

**Nevndarlimir:**
Johan Martin Thorsteinsson, næstforfólk
Gunnvá Thomsen, skrivari
Sabina Poulsen, nevndarlimur
Dann Hjelm, nevndarlimur
Hálvdan Rúni Gaardbo, tiltakslimur
Signhild Joensen, íðkaraumboð

**Lønt starvsfólk:**
Kristian Martin Joensen, landsliðsvenjari 1/6
Rúna Jakobsen, landsliðsvenjari 1/6

**Aðrar nevndir:**
**Svimjinevnd:**
Bjørg Jensen, forfólk
Jón Bjarnason Vestergaard, næstforfólk
Rakul Arnfríð Dam, skrivari/nevndarlimur

**Dómsnevnd:**
Anni á Hædd, forfólk
Jórun Eið, nevndarlimur

Billardsamband Føroya

# Billard

Billardsamband Føroya / billardsambandforoya@gmail.com / Tel 252202 / www.billard.fo

**Sum heild halda vit í nevndini, at billardítróttin í Føroyum liggur á einum lutfalsliga góðum stað, og at pílarnir hava peikað uppeftir, síðan ítróttin fram til 2008 var í einum lítlum aldudali.**

## Strategi

**Breidd:** Tað verður ikki gjørt nógv beinleiðis við breiddina, men spælt verður í trimum deildum, og tað er eingin førleikagátt fyri at kunna vera við í 3. deild.

**Úrval:** Tað besta, vit hava at bjóða úrmælingunum er FM. Men vón um er at fara til Danmarkar at kappast.

**Sjálvboðin:** Vit eggja feløgunum til at fjálga um tey sjálvbodnu.

**Ítróttagleði:** Vit hava ein góðan felagsskap. Tað sæst eisini á innanhýsis Facebook-síðuni "Billard FO", har tilfar javnan verður lagt inn - til bæði gaman og álvara.

## Kappingar:

**Í Føroyum:**

FM fyri lið í 1. deild, 2. deild og 3. deild. Frá oktober til mars 2024 verður spælt úti hjá feløgunum (síðan 1977).

FM fyri einstaklingar, apríl í Havn (síðan 1977)

Haldor Holm Cup, oktober í Klaksvík (síðan 1989)

Skómakara kappingin, á varmakeldu í Fuglafirði

Lions Cup, Suðuroy, september á Tvøroyri (síðan 2018)

**Uttanlands:**

Eingin kapping í 2023

## Virksemi

**Oyggjaleikir**

Liðkappingarnar í 1., 2. og 3. deild hava sína gongd, og nevndin metir, at kappingarnar eydnast væl. Seks lið vóru í 1. deild, seks lið í 2. deild, og níggju lið vóru í 3. deild.

Eftir átjan ára oyðimarkargongd kemur billardgullið nú aftur til høvuðsstaðin. Hetta var undiryvirskriftin á eini grein á Portal.fo. Tí tað var nevnliga HABI1, mannað við Jógvani Jørgensen og Ólavi Kjølbro, ið megnaði at vinna føroyameistaraheitið fyri lið.

Í 2. deild var tað lið úr Skálafjarðar Billardfelag, ið megnaði at vinna deildina. Eitt flott avrik. Serliga tí, at felagið er nýtt. Tað bleiv stovnað í 2019. Vinnandi liðið var SFBF1, mannað við Markusi L. Olsen og Henriki Sommer. Hetta var sostatt fyrstu ferð, at Skálafjarðar billardfelag var umboðað í bestu deildini.

Í 3. deild bleiv tað eins og síðsta kappingarár HABI5, sum vann deildina. Hesa ferð mannað við Óskari Eiriksson og Heimiri Ottósson. Samanlagt vóru tað 63 mans, sum umboðaðu feløgini í liðkappingunum í ár.

**Liðkappingar 2022/23**

| Deild | Nr. 1 | Nr. 2 | Nr. 3 |
|---|---|---|---|
| 1. deild | HABI1 | HABI2 | TVBF1 |
| 2. deild | SFBF1 | BBF2 | HABI4 |
| 3. deild | HABI5 | KLBF5 | KLBF4 |

**Haldor Holm Cup**

Haldor Holm Cup bleiv spælt, eina viku áðrenn liðkappingin byrjaði. Haldor Holm Cup verður spælt á tann hátt, at leikarar dystast í fleiri settum, ið eru upp í 100 eygu. Finalan í ár var ímillum Páll Hera Nolsøe úr TVBF og Kristian Suna Høgnesen úr KLBF. Páll Heri tók sigurin.

**Lions Cup Suðuroy**

Lions Cup Suðuroy er einstaklingakapping, sum verður spæld eina ferð um árið í hølunum hjá Tvøroyrar Billardfelag. Kappingin er skipað soleiðis, at einans leikarar, ið hava upp í 15 í miðal frá styrkislistanum árið fyri, sleppa at luttaka í kappingini. Hesa ferð vóru ellivu leikarar tilmeldaðir. Dystast bleiv fyrst í tveimum bólkum. Síðani vóru hálvfinalur, bronsudystur og finala. Havnarmenn gjørdu ikki mætari enn at vinna øll heiðursmerkini. Vinnari av kappingini gjørdist veteranurin úr Havn Jan Müller, nr. 2 bleiv Óskar Eiriksson, og nr. 3 bleiv Hans Jacob Kollsker.

**FM fyri einstaklingar**

FM fyri einstaklingar í ár bleiv spælt í Havnar klubba. Ikki færri enn sekstan spælarar høvdu teknað seg til hesa innleiðandi kappingina.

Klaksvíkingurin Ólavur Kjølbro, ið spælir við HABI, vann sítt fyrsta føroyameistaraheiti fyri einstaklingar. Hann gjørdi ikki mætari enn at vinna á Páll Hera Nolsøe, verandi føroyameistara, í finaluni. Nr. 3 gjørdist Kristian Suni Høgnesen. Hetta var samstundis fyrstu ferð í átjan ár, at havnarmenn eiga føroyameistaraskapið fyri einstaklingar.

Eisini má nevnast, at eitt met bleiv sett. Tað var Páll Heri, sum í hálvfinaluni lukkaði í triðja inngangi. Hetta er stórt met og gevur eitt miðaltal upp á 166 eygu.

**Skómakarakappingin á varmakeldu**

Aftur í ár skipaðu fuglfirðingar fyri skómakarakapping á varma-



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

keldu. Vinnarin av kappingini gjørdist Hjalti Petersen, nr 2. gjørdist Poul Herman og nr 3. bleiv Petur Meinhard Jacobsen.

**Stroyming**
Gongd er nú komin á stroymingina. Sambandið hevur stovnað ein brúkara á Youtube, og hevur tað verið SFBF1, sum hevur verið drívmegin.

**Samandráttur**
Út frá tí, sum er nevnt omanfyri, metir nevndin, at billardítróttin átti at verið nógv sjónligari fyri tann vanliga føroyingin. Hetta eru vit í nevndini í holt við at bøta um við at gera ítróttina lættari atkomiliga á sosialu miðlunum, og vit eru vísir í, at tað fer at bøta um støðuna.
Sum heild halda vit í nevndini, at billardítróttin í Føroyum liggur á einum lutfalsliga góðum stað, og at pílarnir hava peikað uppeftir, síðan ítróttin fram til 2008 var í einum lítlum aldudali. Nýggja felagið á Skálafjørðinum er dømi um, at áhugi er, og at vøksturin kann halda fram. Okkara fatan er, at teir leikarar, ið leggjast afturat, eru leikarar, ið oftast halda fram við spælinum. Hetta er sera jaligt.

## Framtíðarætlanir

- At skaffa ein høvuðsstuðul til bestu deildina í liðkappingini. (Sáttmála-Inntøkumøguleiki)
- At skaffa ein høvuðsstuðul til FM kappingina fyri einstaklingar (Sáttmála-Inntøkumøguleiki)
- Hava ein miðlamann, sum kann umsita ein Facebook-profil og skriva fleiri greinar og savna myndir at leggja út á miðlarnir, (Ólønt).
- Eggja feløgunum til at gera sítt fyri at fáa størri tilgongd. Møguliga gera avtalu við ungdómshús, skúlar o.s.fr.
- Bøta um heimasíðuna
- Finna eina loysn upp á stroyming, útgerð o.s.fr. Møguliga stroyma beinleiðis á Facebook.

## Sosialir miðlar

www.facebook.com/Billardsambandforoya
Billardsamband Føroya - YouTube

**Nevndarforfólk:**
Markus L. Olsen

**Nevndarlimir:**
Hugin Albinus, kassameistari
Oskar Eiriksson, skrivari
Hans Jacob Nystrøm, nevndarlimur
Jakup Arnholdt Lambaa, nevndarlimur
Kristian Suni Høgnesen, tiltakslimur
Heri Signar Nolsøe, tiltakslimur

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Tvøroyrar Billardfelag | 23 |
| Klaksvíkar Billardfelag | 24 |
| Billardfelag Fuglafjarða | 11 |
| Havnar Billardfelag | 12 |
| Skálafjarða Billardfelag | 11 |

# Boksing

Boksisamband Føroya / boksisambandforoya@gmail.com / Tel 210307

**Vit ætla at kappast í 4-6 altjóða kappingum. Aftur at hesum fara vit eisini at vera við í donskum meistaraskapum. Hetta er galdandi komandi fimm árini.**

## Kappingar:

**Í Føroyum:**
Juni. Venjingarlega í Føroyum. Trý donsk feløg vóru við. 50 boksarar luttóku.

**Uttanlands:**
**Februar:** Fimtan boksarar fóru til Danmarkar. Á skránni vóru diplomdystir og veruligir dystir. Tórshavn boksing vann fimm diplomdystir og fýra dystir. Klaksvík boksing vann tríggjar diplomdystir.
**Mars:** Tríggir boksarar kappaðust í Sjællandske mesterskaber. Vit vunnu eitt gull- og eitt silvurheiðursmerki.
**Mars:** Ein boksari kappaðist í altjóða kapping í Hvidovre. Tað bleiv til ein sigur í hálvfinaluni, men finalan endaði við tapi. Eitt silvurheiðursmerki bleiv vunnið.
**Apríl:** Tveir boksarar luttóku í donsku meistarastevnuni fyri byrj-arar. Sigrað bleiv í báðum hálvfinalunum, og tá finalurnar vóru lidnar, kom eitt gull- og eitt silvurheiðursmerki um hálsin.
**September:** Venjingarlega í Danmark. Seks boksarar luttóku. Hetta var fyrireiking til altjóða kapping í oktober.
**Oktober:** Tríggir boksarar kappaðust í altjóða kapping í Hill-erød, "HSK". Vit vunnu eitt gull- og eitt silvurheiðursmerki.
**Desember:** Tveir boksarar vunnu gullheiðursmerkir í altjóða kapping í Vordingborg.

## Framtíðarætlanir

Ætla at kappast í 4-6 altjóða kappingum. Aftur at hesum fara vit eisini at vera við í donskum meistaraskapum. Hetta er galdandi komandi fimm árini.

## Sosialir miðlar

Facebook, Boksisamband Føroya

**Nevndarforfólk:**
Martin Meng

**Nevndarlimir:**
Johannes Klein, næstforfólk
Beinta Johannessen, kassameistari

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Tórshavn Boksing | 75 |
| Klaksvík Boksing | 16 |



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Dart

Dartsamband Føroya / dartsamband@gmail.com / Tel 595097 / www.dartfo.com

**Ætlanin er, at framhaldandi menna føroyskt dart, sum er á rættari leið. Vit hava í dag leikara, sum ger um seg úti í Evropa, har hann vinnur kappingar.**

## Strategi

Vit høvdu venjaraskeið við dananum Daniel Tybøl. Sambandið hevur eisini lagt stóran dent á, at feløgini menna ungdómin og hevur tí sett Una Árting sum ungdómsmennara.

## Kappingar:

**Í Føroyum:**

10 single kappingar runt um í feløgunum
10 kappingar í tvímansleiki runt um í feløgunum
10 mix kappingar, sum allar hava verið á Argjum
Kappingin fyri lið hevur eisini verið
Tórshavn Open og Faroe Islands Open við metstórari luttøku og 66 útlendskum leikarum úr átta londum

**Uttanlands:**

HM í Esbjerg 26.-30. september. A-landsliðini hjá kvinnum og monnum luttóku
28 føroyingar til Iceland Open 25. og 26. apríl í Reykjavík
Jan McIntosh luttók í Modus Super Series í november í 2023.

## Framtíðarætlanir

Ætlanin er, at framhaldandi menna føroyskt dart, sum er á rættari leið. Vit hava í dag leikara, sum ger um seg úti í Evropa, har hann vinnur kappingar. Ætlanin er eisini at fáa ein sterkari ungdóm, og arbeitt verður hart við tí í øllum feløgunum. Vit vilja gera tað betri til EM og HM, og eisini fáa ungdómslandslið stovnað, men har eru vit enn á byrjanarstigi, so vit vita ikki, nær vit koma á mál við tí. Ætlanin er eisini at blíva eitt sersamband innan næstu fimm árini.

## Feløg og limatøl:

| | |
|---|---|
| Klaksvíkar Dartfelag | 30 |
| Pílar og Skot | 12 |
| D16 | 15 |
| D9 Dartfelag | 50 |
| Argja Dartfelag | 20 |
| Havnar Dartfelag | 35 |
| Vága Dartfelag | 32 |
| Dart Sandoy | 10 |
| Suðuroyar Dartfelag | 11 |
| Eiðis Dartfelag | 12 |

## Sosialir miðlar

Facebook: Dartsamband Føroya

**Nevndarforfólk:**
Annfinn A. Hjaltalin

**Nevndarlimir:**
Kristian Joensen, næstforfólk
Rógvi Rasmussen, kassameistari
Heri Kallsoy, skrivari
Júst Trygvason, nevndarlimur

**Ungdómsnevnd:**
Annfinn A. Hjaltalin, forfólk
Uni Árting, nevndarlimur
Júst Trygvason, nevndarlimur
Eyðun Samuelsen, nevndarlimur

**Lønt starvsfólk:**
Uni Árting, ungsdómsmennari



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Golf

Golfsamband Føroya / ingisam@gmail.com / Tel 222273

**Á felagsøkinum verður støðugt skipað fyri arbeiðsdøgum á breytini á Glyvursnesi, ið er nakað, sum er við til at styrkja samanhaldið millum tey sjálvbodnu í felagnum.**

## Strategi

**Breidd:** Orsakað av, at golfbreytin á Glyvursnesi gjøgnum 2023 hevur ligið í einum slag av ongamannalandi, uttan at limir og feløg hava vitað, júst hvør ætlanin hjá kommununi er viðvíkjandi byggingini av nýggjari breyt, var onki serstakt gjørt á breidd-arøkinum
**Úrval:** Fimm leikarar, fýra mans og ein kvinna luttóku á Oyggja-leikunum á Guernsey 2023
**Sjálvboðin:** Á felagsøkinum verður støðugt skipað fyri arbeiðs-døgum á breytini á Glyvursnesi, ið er nakað, sum er við til at styrkja samanhaldið millum tey sjálvbodnu í felagnum.
**Ítróttagleði:** Sí 1

## Kappingar:

**Í Føroyum:**
Golfsambandið skipaði ikki fyri kappingum í 2023, men Tórs-havnar Golffelag skipar regluliga fyri kappingum gjøgnum summarhálvárið. Tvær av kappingunum vóru opnar - tað vil siga almennar kappingar: Bygma Open 17. og 18. juni og Bank-Nordik Open 22. juli.

**Uttanlands:**
Golfsamband Føroya var umboðað á Oyggjaleikunum á Guern-sey 8. til 14. juli 2023 við fýra monnum/einum liði og einari kvinnu (ikki við í liðkappingini).

## Framtíðarætlanir

Nú sær út til, at gongd kemur á veruligu ætlanina at byggja golfbreyt á Glyvursnesi í komandi ári, t.v.s. í 2025. Men longu í ár roknar Tórshavnar Golffelag at fáa niðurlagda fjósið á økinum til láns, so hetta kann brúkast sum felagshús við møguleika fyri innandura venjingarumstøðum. Golfsambandið er sinnað at vera við til at stimbra umstøðurnar har, so føroyskir golfleikar-ar fáa møguleika at royna seg og venja árið runt í øllum veðri. Hetta er ein tiltrongd betring av umstøðunum hjá føroyskum golfleikarum, sum vit síggja stórar møguleikar í.

**Nevndarforfólk:**
Ingi Samuelsen

**Nevndarlimir:**
Bjarne Jørgensen, næstforfólk
Bárður Højgaard, peningarøkil

**Feløg og limatøl:**

| | |
|---|---|
| Tórshavnar Golffelag | 80 |
| Eysturoyar Golffelag | 15 |


Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Klintring

Klintrisamband Føroya

**Klintrisambandið skal vera veitari av førarum, vegleiðingum og besta framferðarhátti í reipklintring. Harafturat skal sambandið vera forsprákari fyri siðiligari atferð í náttúru okkara.**

## Virksemi annars

Klintrisamband Føroya varð sett á stovn á heysti 2023.
Tíðin síðani hevur verið nýtt til at skilgreina arbeiðsumráðið hjá menningarsambandinum. Umframt at arbeiða við grundleggjandi menning, so sum útbúgving av venjarum, instruktørum, dómarum og førleikum sum heild hevur trygd í sambandi við útiklintring ein sentralan leiklut.

Klintrisambandið skal vera veitari av førarum, vegleiðingum og besta framferðarhátti í reipklintring. Harafturat skal sambandið vera forsprákari fyri siðiligari atferð í náttúru okkara.

Klintrisambandið skal verða eitt andlit út í heim - bæði hvat viðvíkur útlendskum íðkarum, ið koma hendan vegin, men eisini tá ið farið verður í onnur lond at kappast.

Í løtuni leggja vit lunnar undir fyrsta Føroya meistaraheitið í Bulduring. Hendan kappingin verður 19. og 20. apríl 2024 í høvuðstaðnum.
Við klintrikvøðu
Nevndin

**Nevndarforfólk:**
Absalon Eysturoy

**Nevndarlimir:**
Theodor Kapnas, nevndarlimur
Rógvi Laksáfoss, nevndarlimur



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Seyðahundar

Seyðahundasamband Føroya / minhundur@gmail.com / Tel 580445 / www.hundar.fo



**Nevndarforfólk:**
Tummas Jacobsen

**Nevndarlimir:**
Tóki Berg Mikkelsen, næstforfólk
Brandur Klettskarð í Kongsstovu, skrivari
Steinur Poulsen, peningarøkil
Páll Poulsen, nevndarlimur
Hans Meinhard Midjord, tiltakslimur
Hanus Højgaard, tiltakslimur

**Feløg:**
Suðurstreymoyar Seyðhundafelag
Sandoyar Seyðahundafelag
Sundalags Seyðahundafelag
Norðoyar Seyðahundafelag
Vága Seyðahundafelag
Eysturoyar Seyðahundafelag

Mynd: Finnur Justinussen



# Styrki

Føroya Styrkisamband / heini.hatun@gmail.com / Tel 522353 / www.styrkisamband.fo

**Til DM í ár vunnu vit heili seks gullheiðursmerkir, umframt níggju onnur heiðursmerkir. Hetta er besta úrslit vit hava fingið higartil, og ætlanin er bert at økja um tað talið.**

## Strategi

**Breidd:** FSS stríðist fyri at fáa karmar soleiðis, at eitt veruligt breiddartilboð kann veitast. Tó koma fleiri feløg, sum tíðin gongur, og skjótt kunnu vit bjóða styrkiítrótt um alt landið. Vit hava bæði í 2023 og 2022 bjóðað skeið í vektlyfting. í 2022 byrjaði tað við Ítrótttarháskúlan, og nú verður felag skjótt stovnað har. Í 2023 vóru vit í róðrarneystinum, har 30 luttakandi vóru við. Fyri 2024 hava vit longu gjørt avtalu við HSF um styrkiskeið.

**Úrval:** Sama avbjóðingin við hølum galdandi, men tað verður kompenserað við miðvísum innsatsi í okkara vinarumhvørvi í Slagelse (AK Atlas).

**Sjálvboðin:** Vit royna at fáa fólk úr ymsu venjingarmiðstøðunum og feløgunum við í fyriskipan av felagskappingum og Føroyaleikum. Vit skipa tað soleiðis, at FSS letur upp í hendi ábyrgdir til ymsu feløgini at standa fyri í rotatiónsskipan.

**Ítróttagleði:** Vit duga ikki ítøkiliga at siga frá her - tó eru ætlanir um at skipa fyri reinum, sosialum tiltøkum, um yvirskot verður til tað (tá ið vit hava betri felagsumstøður at virka undir og fíggjarligan styrk).

## Kappingar:

**Í Føroyum:**
**VL** FM-Tórshavn - 25.02.2023
Ólavsøkustevnan-Tórshavn-27.02.2023
**SL** FM-Tórshavn - 27.05.2023
1-Dyst í beinbend-Tórshavn-08.07.2023
1-Dyst í Bonkpress - Tórshavn-22.07.2023
1-Dyst í Rætstøðulyft - Tórshavn-12.08.2023
Steypakapping-Tórshavn-25.11.2023
**KB** FM-Klaksvík-27.05.2023

**Uttanlands:**
**VL** Reykjavík International Games-Reykjavík-29.01.2023
B-DM - Slagelse-04.02.2023
DM 2023 - Valby - 11.03.2023
Påske Cup - Slagelse-09.04.2023
AK Thors Klubmesterskaber-København - 15.04.2023
Atlas Pokal Cup - Slagelse-05.05.2023
DM Hold - Aalborg-24.06.2023
La Coruna - a Coruna-01.07.2024
Ålholm Cup-Hillerød-23.09.2023
Aalborg Cup-Aalborg-07.10.2023
NM Senior-Landskrona-28.10.2023
NM Junior-Rovaniemi-11.11.2023
AK Thors Interne Klubmesterskaber-Keypmannahavn-14.12.2023

**SL** Páskamót-Reykjavík - 16.04.2023
Páskamót Bonkpress-Reykjavík - 16.04.2023
NM Junior - Lillestrøm-16.09.2023
NM Junior - Lillestrøm-17.09.2023
Thor's Power Christmas Meet-Reykjavík-02.12.2023

**KB** HM - Hódmezővásárhely, Ungarn-25.06.2023

## Virksemi annars

2023 hevur verið eitt virkisríkt ár fyri Føroya Styrkisamband. Millum annað er eitt nýtt felag stovnað. DM og NM heiðursmerkir eru komin í hús, og so hevur vektlyftingin tikið eitt stórt fet nærri fullkomnum altjóða limaskapi.
Nýggj feløg
Vit arbeiða støðugt við at fáa fleiri feløg til sambandið hjá okkum. Í 2023 hevur verið mest arbeitt í Runavík, har eitt felag er ávegis. Runavíkar Kommuna er sera áhugað í hesum, tí tey skulu hýsa NM 2024. Men eisini tí, at tey leggja nógv fyri ítróttina har.
Sum nú er, er ítróttin sera sentral í høvuðsstaðarøkinum, og tað vilja vit broyta.
Í 2023 var Føroya Styrkifelag yvirtikið av Yndi, og tað eitur nú Megingjørð. Felag í Klaksvík bleiv formliga sett á stovn. Tað eitur Fullpower Kúlulyft.
Styrkillyfting
Styrkilyftingin hevur tikið risafet í 2023. Fyri fyrstu ferð vóru fleiri íðkarar við til kappingar uttanlands, umframt at tað var fyrstu ferð, at vit sendu íðkarar til eina NM Kapping. Kappingin var í august mánaði.




**Nevndarforfólk:**
Heini Hátún

**Nevndarlimir:**
Niels Juel Arge, PR (næstforfólk)
Jákup Suni Berg, styrkilyfting
Niels Áki Mørk, vektlyfting + samskipari
Sonni Eliassen, kúlulyft

**Felag og limatal:**

| | |
|---|---|
| Megingjørð | 6 |
| Stoyt | 20 |
| Burn Íðkarar | 32 |
| Fullpower Kúlulyft | 9 |

**Lønt starvsfólk:**
Niels Áki Mørk, samskipari
Gudmundur Danielsen, kassameistari

**Tiltakslimir og onnur við ymsum ábyrgdum:**
Gudmundur Danielsen - tiltakslimur, kassameistari
Rói Hjaltalin - tiltakslimur, ráðgevandi
Maibrit Reynheim Petersen - tiltakslimur, íðkari

Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

Nógv flott úrslit komu uttanlands. Hóast tað fyllir nógv, so er tað ikki alt fyri okkum. Til FM kappingina vóru 14 luttakarar, tað merkir eisini, at styrkilyfting byrjar at nærkast íðkaratalinum, ið er til vektlyfting.
Vektlyfting
Vektlyfting er størsta greinin, sum vit hava. Her eru bæði flest luttakandi íðkarar, aktivitetur og í hesi greinini  hava vit klárað okkum sera væl í altjóða kappingum.
Til DM í ár vunnu vit heili seks gullheiðursmerkir, umframt níggju onnur heiðursmerkir. Hetta er besta úrslit vit hava fingið higartil, og ætlanin er bert at økja um tað talið.
Hetta var samstundis annað árið, har ið vit luttóku í NM, bæði fyri vaksin og fyri juniorar. Til NM Senior komu vit heim við tveimum norðurlendskum meistarum. Vit høvdu fýra luttakarar við. Vit høvdu eisini ein luttakara við til NM Junior.
Kúlulyft hevði eisini eitt gott ár. Sonni Eliasen gjørdist aftur podiumvinnari í HM. Hóast vit ikki hava nógvan aktivitet í hesari ítróttagreinini, fáa vit góð altjóða úrslit.
2023 var fyrsta árið, har FSS bjóðaði verulig styrkisskeið. Havnar Róðrarfelag var okkara fyrsti kundi,og tað eydnaðist sera væl. HSF hevur eisini víst áhuga.

## Framtíðarætlanir

Vit hava tvey ítøkilig stórmál, ið vit arbeiða fyri. Annað er at gerast sersamband sum skjótast. Hitt er at gerast limur í øllum altjóða sambondum, ið eru viðkomandi fyri okkum. Vit eru longu limur í viðkomandi kúlulyft-sambondum og í NWF, NPF og IWF. Í februar 2024 blivu vit eisini limur í Small Nations í Vektlyfting. Vónandi gerast vit skjótt limur í EWF eisini, tá er limaskapurin fyri Vektlyfting fullfíggjaður. Eftir tað verður tað sama gongd við Styrkilyfting.
Fyri breiddarmál í Føroyum er næsta stigið at stabilisera ítróttina og tey feløg, ið longu eru, umframt at stovna fleiri feløg. Tað er sera gott, at bæði Runavík og Vágur fara at stovna hvør sítt styrkifelag í ár.
Vit hava havt tørv á at endurnýggja dómaraskarðan í øllum greinum - serliga í SL og VL. Í VL er arbeiðið farið ígongd. Vónandi kunnu vit í 2024 stovnað eina dómaraútbúgving saman við DVF, sum kann brúkast til okkum føroyingar soleiðis, at vit eru óheft av tí danska sambandinum. Hendan ætlanin sær út til at bera á mál. Tá hon er komin á mál, fara vit beint í gongd við at gera sama arbeiðið fyri SL.
Fyri okkara 5-ára ætlan hava vit eisini tvey stór mál. Annað er at kunna seta eitt hálv- ella fulltíðar starvsfólk í starv, so at gerandisdagurin hjá bæði sambandinum og feløgum kann gerast betri. Hitt stóra málið er at økja um breiddina. Vit hava longu víst, at føroyingar eru gjørdir av øgiligum tilfari, tí vit hava vunnið fleiri heiðursmerkir í Danmark og í Norðurlondum.

# Taekwondo

Taekwondosamband Føroyar / faroeislands.taekwondo@gmail.com / Tel 598187 / www.taekwondo.fo

**Øll sjálvboðin fingu í 2023 eina gávu frá felagnum. Peningurin kom frá laksatorginum. Tey fingu flogferðaseðlar, wellnes, máltíðir v.m. Hetta gleddi stjørnurnar, sum halda felagnum uppi, almikið.**

## Strategi

Breidd - Úrval - Sjálvboðin - Ítróttagleði

32 íðkarar fóru 23.-26. februar til Esbjerg cup at kappast bæði í kampi og poomsae (teknikki.) Undan hesum høvdu vit tjent pengar fyri at rudda tangagarðin og fyri at leggja graslíki á tveir vøllir í Runavíkar kommunu. Í juni var Kim Drube, danski landsliðsvenjarin í poomsae, í Føroyum, har hann stóð fyri venjingarlegu. 87 íðkarar blivu graderaðir (fingu nýtt belti).

Í juli fór ferðalag við 32 fólkum til eina stóra felags venjingarlegu í Esbjerg fyri øll. Bæði nýggj, hvít belti og svørt belti vid høgum Dan vóru við. Her vóru vit eisini fleiri, sum tóku dómara- og venjaraskeið.

Í november fingu vit trý nýggj 3. dan, og vit fingu tvey nýggj svørt belti.

16. desember hildu vit stóran jólafrokost, har øll kundu vera við.

Síðsta venjingarlega fyri øll var hildin 27.-30. desember. Michelle var við, og hon hugnaði nógv um bædi stór og smá við svimjitúri, mati og spæli.

Úrvalsíðkarar vóru á 14 uttanlandsferðum. Í oktober vunnu vit eina bronsu í Riga Open, sum er ein altjóða G1 kapping. Hetta er higartil størsta bragd í okkara søgu. Eisini eru fysioterapeutur, diatistur, mentalvenjari og fysiskur venjari komnir upp í Team Føroyar.

Øll sjálvboðin fingu í 2023 eina gávu frá felagnum. Peningurin kom frá laksatorginum. Tey fingu flogferðaseðlar, wellnes, máltíðir v.m. Hetta gleddi stjørnurnar, sum halda felagnum uppi, almikið.

Legur, arbeiði, hugnadagar og ferðir eru við til at skapa samanhaldið í HF. Hetta gera vit nógv við alt árið.

## Kappingar:

**Í Føroyum:**

Kapping var í Føroyum 17. juni í teknikki og kampi. 42 íðkarar vóru vid

FM í Føroyum varð hildið í klubbanum tann 16. desember. 79 íðkarar kappaðust um at gerast føroyameistarar í bæði kampi og í teknikki.

**Uttanlands:**

Vit byrjaðu árið vid NM í Finnlandi 20.-22. jan.

Síðani var Esbjerg cup fyri øll 23.-26. feb.

9. -12. mars luttóku fimm í Holland Dutch Open.

13.-16. apríl luttóku fýra í Spanish Open.

27.-30. mai luttóku tvey í HM í Aserbadjan.

8.-11.september luttóku fýra í Polish Open.

28. september-2.oktober luttóku tvey í Albanian Open.

7.-9.oktober luttóku Høgni og Mathis í Lettlandi, og her var tað, at Høgni vann bronsu í Riga Open.

Síðsta kappingin var French open í Frankaríki.

## Virksemi annars

2023 hevur verið eitt ár, har vit ongar nýggjar limir hava tikið inn. Hetta hevur gjørt, at vit hava fokuserað nógv upp á at gera tey, sum longu íðka. Vit hava arbeitt nógv, og vit hava ferðast nógv. Nógvar venjingarlegur hava verið, og vit hava verið sjónlig í kommunalum høpi við at arbeiða nógv. Vit hava sligið gras, ruddað, lagt graslíki á, havt laksatorg og ruddað áir. Graderingar hava verid tríggjar ferðir, tvær í Føroyum og ein í Danmark. Har vísa vit tað fram, sum vit hava lært.

## Sosialir miðlar

Facebook: Taekwondofelagið Hwarang Føroyar

**Nevndarforfólk:**
Noomi Kunoy Heradóttir

**Nevndarlimir:**
Gurið Lómfelli, næstforfólk
Tórheðin Jónsveinsson Jensen, kassameistari
Dávur Kunoy Høgnason, nevndarlimur
David Im, nevndarlimur

**Lønt starvsfólk:**
Mathias B Gabrielsen, landsliðsvenjari 0,3

**Feløg og limatøl:**
Hwarang Føroyar 107


Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Tennis

Tennissamband Føroya / stefaniskorini@gmail.com / jb@banknordik.fo / Tel 729912

## Skipað verður regluliga fyri venjingum fyri ung og børn umframt liðvenjingum fyri vaksin, har kvinnur og menn eru við.

### Strategi

**Breidd:** Skipað verður regluliga fyri venjingum fyri ung og børn umframt liðvenjingum fyri vaksin, har kvinnur og menn eru við. Kappingar fyri seniorar hava eisini verið partur av skránni í 2023.

**Úrval:** Føroyska landsliðið hjá monnum spældi á vári 2023 landsdyst ímóti Íslandi í Reykjavík. Hetta var ein søguligur dystur, tí hetta er fyrstu ferð, at Føroyar og Ísland hava spælt landsdyst í tennis. Hetta var eisini liður í fyrireikingum til Oyggjaleikir 2023.

**Sjálvboðin:** Fleiri sjálvboðin eru við til venjingar fyri vaksin og børn. Felagshúsið við vøllin í Gundadali er nú tikið í nýtslu, og tað hevur betrað umhvørvið kring vøllirnar.

**Ítróttargleði:** Venjingar fyri ung og børn byggja í stóran mun upp á gleði av at íðka tennis, umframt at liðvenjingarnar fyri vaksin eisini hava ítróttargleði sum ein týðandi lið í venjingunum.
Virkisætlanin er tongd at venjing og menning av nýggjum og vandum leikarum. Venjing í bólkum við skeiðum í tíggju vikur hevur eydnast sera væl seinastu árini, og í samstarvi við HTF hevur verið skipað fyri venjingum fyri børn, og tað hevur verið væl eydnað.

### Kappingar:

**Í Føroyum:**

Kappingarnar hava verið árliga FM-kappingin umframt opin várkapping og heystkapping fyri menn, kvinnur, seniorar og børn.

**Uttanlands:**

Kappingar uttanlands hava verið Oyggjaleikir 2023 umframt ein søguligur landsdystur millum Ísland og Føroyar í Reykjavík.

### Sosialir miðlar

Havnar Tennisfelag | Tórshavn | Facebook

### Nevndarforfólk:

Stefan í Skorini

### Nevndarlimir:

Ingi Højsted, kassameistari
Jón Brekku, nevndarlimur
Janus Rein, nevndarlimur
Svenn F. Jacobsen, nevndarlimur

### Felag:

Havnar Tennisfelag 200



Mynd: Gilli Brend í Hoyvík

# Ítróttasamband Føroya

## ÁRSFRÁSØGN

## 2023

**FRUMRIT**

Ársfrásøgnin er løgd fram og góðkend á felagsins ársaðalfundi, tann

_________________________

Fundarstjóri

## Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| **Átekningar** | |
| Leiðsluátekning | 1 |
| Átekning frá óheftum grannskoðara | 2 |
| **Upplýsingar um felagið** | |
| Upplýsingar um felagið | 5 |
| **Ársroknskapur 1. januar - 31. desember 2023** | |
| Nýttur roknskaparháttur | 5 |
| Rakstrarroknskapur | 7 |
| Fíggjarstøða | 8 |
| Notur | 10 |

## Leiðsluátekning

Starvsnevndin hevur í dag lagt fram ársfrásøgnina fyri 2023 hjá Ítróttasamband Føroya.

Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ársroknskaparlógina.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðu pr. 31. desember 2023 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2023.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri ársaðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 3. mai 2024

**Daglig leiðsla**

Petur Mittún
aðalskrivari

Starvsnevnd:

| | | |
|---|---|---|
| Elin Heðinsdóttir Joensen<br>forseti | Magnus Tausen<br>varaforseti | John Kjær<br>nevndarlimur |
| Anna Maria Toftegaard<br>nevndarlimur | Kerstin Laksáfoss<br>nevndarlimur | Hávard Vatnhamar<br>nevndarlimur |

## Átekning frá óheftum grannskoðara

**Til limafeløgini í Ítróttasamband Føroya**

**Niðurstøða**

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Ítróttasamband Føroya fyri roknskaparárið 1. januar - 31. desember 2023 við nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum. Ársroknskapurin er gjørdur eftir ársroknskaparlógini.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni pr. 31. desember 2023 hjá felagnum og av úrslitinum av virkseminum hjá felagnum í roknskapar-árinum 1. januar - 31. desember 2023 samsvarandi ársroknskaparlógini.

**Grundarlag fyri niðurstøðuni**

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardar um grannskoðan og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum samsvarandi altjóða reglunum hjá International Ethics Standards Board for Accountants' um etiskan atburð hjá grannskoðarum (IESBA Code) og øðrum etiskum krøvum, sum eru galdandi í Føroyum. Vit hava eisini hildið hinar etisku skyldurnar, sum ásettar eru í hesum krøvum og IESBA Code. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við árs-roknskaparlógina. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til, fyri at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

**Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin**

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um ársroknskapurin vísir tey undirliggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

Vit samskifta við ovastu leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

## Átekning frá óheftum grannskoðara

Tórshavn, tann 3. mai 2024

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

John Michal Petersen
statsaut. revisor

## Nýttur roknskaparháttur

Ársroknskapurin fyri Ítróttasamband Føroya er greiddur samsvarandi viðtøkunum um uppseting av ársroknskapinum og ársroknskaparlógini fyri feløg í flokki A. Tann nýtti roknskaparhátturin er óbroyttur, í mun til undanfarna ár. Uppseting og notur eru tillagaðar virksemi ÍSF's.

**Alment um innrokning og virðisáseting**

Í rakstrarroknskapinum verða inntøkur innroknaðar, so hvørt tær verða vunnar. Sama er galdandi fyri virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir innroknaðir, herímillum avskrivingar, niðurskrivingar, avsettar skyldur og afturføringar, sum standast av broyttum roknskaparligum metingum av upphæddum, ið áður hava verið innroknaðar í rakstrarroknskapinum.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini geva felagnum fíggjarligar fyrimunir, og virðið á ognini kann ásetast álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá sannlíkt er, at tær í framtíðini taka fíggjarligar fyrimunir úr felagnum, og virðið á skylduni kann ásetast álítandi.

Við fyrstu innrokning verða ognir og skyldur virðisásettar til útveganarvirði. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar, sum greitt er frá niðanfyri um einstøku roknskaparpostarnar.

Við innrokning og virðisáseting verður atlit tikið at væntaðum tapi og váða, ið vísa seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug og sum viðvíkja viðurskiftum, sum vóru til staðar við roknskaparlok.

## Rakstrarroknskapurin

**Inntøkur**

Inntøkan er allur játtaður og útgoldin stuðul og aðrar inntøkur í árinum.

**Kostnaður**

Ítróttasamband Føroya er partvís meirvirðisgjaldsskrásett.

Rakstrarkostnaður fevnir um allan kostnað, sum knýtir seg til høvuðsraksturin hjá Ítróttasambandi Føroya.

**Fyrisitingarkostnaður**

Fyrisitingarkostnaður fevnir um kostnað, sum knýtir seg til umsitingina av Ítróttasambandi Føroya, herundir avskrivingar v.m., sum ikki knýta seg til høvuðsraksturin.

**Aðrir uttanhýsis kostnaðir**

Aðrir uttanhýsis kostnaðir umfata kostnaðir til felagsrakstur, fyrisiting, hølir og tap uppá áogn.

**Starvsfólkakostnaðir**

Starvsfólkakostnaðir umfata løn, íroknað frítíðarløn og eftirløn, umframt onnur sosial gjøld. Í starvsfólkakostnaðum vera móttikin endurgjøld frá almennum myndugleikum trekt frá.

**Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir**

Fíggjarligar inntøkur og kostnaðir verða innroknað í rakstrarroknskapin við teimum upphæddum, sum viðvíkja roknskaparárinum.

## Fíggjarstøðan

**Niðurskriving av støðisogn**

Hvørt ár verður mett um roknskaparligu virðini á kapitalpørtum í assosieraðum fyritøkum fyri at vita, um ábending er um, at tey eru minkað meir í virði enn tað, sum er avskrivað.

Eru ábendingar um virðisminkan, verður ein niðurskrivingarroynd gjørd av hvørji einstakari ogn ella ognarbólki. Niðurskrivað verður til endurvinningarvirðið, um hetta er lægri enn roknskaparliga virðið.

Sum endurvinningarvirði verður hægra virði av nettosøluprísi og kapitalvirði nýtt. Kapitalvirðið verður uppgjørt sum nútíðarvirði av væntaðu nettopengastreymunum frá nýtsluni av ognini ella ognarbólkinum.

Áður innroknaðar niðurskrivingar verða afturførdar, tá ið grundarlagið fyri niðurskrivingini ikki er longur.

**Fíggjarlig støðisogn**

**Onnur virðisbrøv og kapitalpartar**

Onnur virðisbrøv og kapitalpartar, ið ikki eru skrásett á virðisbrævamarknaði, verða innroknað til kostprís. Um endurvinningarvirðið er lægri enn kostprísur, verður niðurskrivað til lægra virði.

**Áogn**

Áogn verður virðisásett til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga svarar til áljóðandi virði. Fyri at standa ímóti møguligum tapi verður niðurskrivað til nettorealisatiónsvirðið.

**Tøkur peningur**

Tøkur peningur umfatar innistandandi í peningastovnum og reiðan pening.

**Skuld**

Onnur skuld verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, sum vanliga er áljóðandi virðið.

## Rakstrarroknskapur 1. januar - 31. desember

| Nota | | 2023<br>kr. | 2022<br>kr. |
|---|---|---|---|
| 1 | Inntøkur | 27.848.205 | 24.511.717 |
| | **Inntøkur tilsamans** | **27.848.205** | **24.511.717** |
| | Ítróttaferðing | -550.433 | -403.391 |
| | Trygging av ítróttafólki | -588.177 | -536.749 |
| 2 | Antidoping | -500.000 | -500.000 |
| 3 | ONF | -706.840 | -931.298 |
| 4 | Felagsútreiðslur | -5.708.106 | -3.166.897 |
| 5 | Umsiting av ÍSF-húsinum | -431.858 | -201.642 |
| 6 | Skrivstovuútreiðslur | -384.407 | -301.704 |
| 7 | Starvsfólkakostnaður | -2.076.132 | -1.829.286 |
| | **Útreiðslur tilsamans** | **-10.945.953** | **-7.870.967** |
| 8 | Stuðul til sersambond | -14.172.000 | -13.722.001 |
| 9 | Stuðul til altjóða kappingar | -3.200.000 | -2.693.684 |
| 10 | Stuðul til Úrvalsítrótt | -800.000 | -800.000 |
| | **Stuðul tilsamans** | **-18.172.000** | **-17.215.685** |
| | Rentuútreiðslur | -10.997 | -88.101 |
| | **Ársúrslit** | **-1.280.745** | **-663.036** |

**Uppskot til býti av úrsliti:**

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| Flutt frá fluttum úrsliti | -1.280.745 | -663.036 |
| **Býtt tilsamans** | **-1.280.745** | **-663.036** |

## Fíggjarstøða 31. desember

**OGN**

| Nota | | 2023 kr. | 2022 kr. |
|---|---|---|---|
| | **Støðisogn** | | |
| | Partabrøv - Sp/f Ítróttavedding (nom. kr. 50.000) | 50.000 | 50.000 |
| | Fíggjarlig støðisogn tilsamans | 50.000 | 50.000 |
| | **Støðisogn tilsamans** | **50.000** | **50.000** |
| | **Ogn í umferð** | | |
| | Vøru- og tænastuáogn | 1.074.528 | 570.612 |
| | Millumrokning við sambond | 803.876 | 1.203.876 |
| | Onnur áogn | 413.195 | 500.000 |
| | Áogn tilsamans | 2.291.599 | 2.274.488 |
| | Tøkur peningur | 12.108.529 | 12.772.316 |
| | **Ogn í umferð tilsamans** | **14.400.128** | **15.046.804** |
| | **OGN TILSAMANS** | **14.450.128** | **15.096.804** |

### SKYLDUR

| Nota | | 2023<br>kr. | 2022<br>kr. |
|---|---|---|---|
| | **Eginogn** | | |
| 11 | Flutt úrslit | 7.511.618 | 8.792.363 |
| | **Eginogn tilsamans** | **7.511.618** | **8.792.363** |
| | **Skuld** | | |
| | Vøru- og tænastuskuld | 570.872 | 199.527 |
| | Skyldugur stuðul | 200.000 | 200.000 |
| 12 | Avsetingar | 6.056.288 | 5.904.914 |
| | Avseting, stuðul til sambond | 111.350 | 0 |
| | Stuttfreistað skuld tilsamans | 6.938.510 | 6.304.441 |
| | **Skuld tilsamans** | **6.938.510** | **6.304.441** |
| | **SKYLDUR TILSAMANS** | **14.450.128** | **15.096.804** |

| | | 2023<br>kr. | 2022<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **1.** | **Inntøkur** | | |
| | Landskassastuðul | 13.100.000 | 11.100.000 |
| | Landskassastuðul til Antidoping Føroyar | 500.000 | 500.000 |
| | Landskassastuðul til altjóða kappingar í Føroyum | 500.000 | 500.000 |
| | Landskassastuðul til Úrvalsítrótt | 800.000 | 800.000 |
| | Stuðul MMR Oyggjaleikir | 250.000 | 0 |
| | Inntøkur, skúlaleikir | 1.004.528 | 718.900 |
| | Ítróttavedding | 8.572.000 | 9.391.000 |
| | ONF | 500.000 | 500.000 |
| | Aðrar inntøkur | 206.665 | 98.000 |
| | Inntøkur Føroyaleikir | 0 | 903.817 |
| | Oyggjaleikir, luttøkugjald | 2.415.012 | 0 |
| | | **27.848.205** | **24.511.717** |
| **2.** | **Antidoping** | | |
| | Dopingroyndir, fundir v.m. | 152.621 | 50.840 |
| | Løn | 246.108 | 170.200 |
| | Avsett, Antidoping | 101.271 | 278.960 |
| | | **500.000** | **500.000** |
| **3.** | **ONF** | | |
| | ONF | 543.361 | 701.298 |
| | Løn | 163.479 | 230.000 |
| | | **706.840** | **931.298** |

| | 2023 kr. | 2022 kr. |
|---|---:|---:|
| **4. Felagsútreiðslur** | | |
| Ferðing og koyring | 2.069 | 2.957 |
| Norðurlandafundir | 58.182 | 41.537 |
| Alheimsfundir | 28.330 | 0 |
| Oyggjaleikir | 2.893.990 | 30.729 |
| Íðkanarnevnd | 73.116 | 28.548 |
| Felagstiltøk | 357.755 | 438.627 |
| Ítróttafagnaður | 801.331 | 399.678 |
| Skeiðsútreiðslur | 72.114 | 17.669 |
| Umboðan | 551 | 5.267 |
| Gávur og graveringar | 93.112 | 21.276 |
| Starvsnevndarfundir | 55.382 | 41.652 |
| Umboðsting og aðalfundir | 114.021 | 166.368 |
| Limagjøld til felagsrakstur | 18.912 | 18.628 |
| Føroyaleikir | 101.583 | 1.239.026 |
| Skúlaleikir | 1.037.658 | 714.935 |
| | **5.708.106** | **3.166.897** |

| | 2023 kr. | 2022 kr. |
|---|---:|---:|

## 5. Umsiting av ÍSF-húsinum

| | 2023 kr. | 2022 kr. |
|---|---:|---:|
| Viðlíkahald | 131.481 | 16.202 |
| Húsaleiga | 124.072 | 93.375 |
| El og hiti | 79.176 | 0 |
| Trygging | 7.108 | 7.575 |
| Reingerð og vask | 90.021 | 84.490 |
| | **431.858** | **201.642** |

## 6. Skrivstovuútreiðslur

| | 2023 kr. | 2022 kr. |
|---|---:|---:|
| Skrivstovuhald | 72.606 | 64.336 |
| Postgjald | 2.757 | 4.152 |
| Lýsingar | 1.777 | 5.272 |
| Tól og innbúgv | 132.864 | 37.367 |
| Telefon og internet | 52.818 | 54.585 |
| Bókhald og roknskaparhjálp | 30.318 | 58.125 |
| Grannskoðan og sakførarakostnaður | 35.800 | 34.375 |
| Konsulenthjálp | 43.750 | 35.000 |
| Heimasíða | 11.717 | 8.492 |
| | **384.407** | **301.704** |

## 7. Starvsfólkakostnaður

| | 2023 kr. | 2022 kr. |
|---|---:|---:|
| Lønarendurgjald, starvsnevnd | 115.261 | 22.500 |
| Løn | 1.474.688 | 1.347.353 |
| Alm gjøld | 135.701 | 125.371 |
| Eftirlønargjøld | 342.717 | 324.326 |
| Trygging av starvsfólki | 7.765 | 9.736 |
| | **2.076.132** | **1.829.286** |

Av lønarkostnaðunum í árinum eru kr. 163.479 fluttar til ONF, kr. 246.108 fluttar til Antidoping, ávíkavist nota 2 og nota 3 og kr. 566.094 til Skúlaleikir og kr. 42.879 til Føroyaleikir, nota 4. Samlaðu lønarkostnaðirnir í árinum eru sostatt kr. 3.094.692.

| | | 2023 kr. | 2022 kr. |
|---|---|---|---|
| **8.** | **Stuðul til sersambond** | | |
| | Fótbóltssambandið | 1.300.000 | 1.300.000 |
| | Hondbóltssambandið | 2.523.716 | 2.346.634 |
| | Flogbóltssambandið | 1.251.781 | 1.271.820 |
| | Róðrarsambandið | 756.241 | 678.423 |
| | Fimleikasambandið | 980.397 | 975.294 |
| | Svimjisambandið | 1.080.082 | 1.042.364 |
| | Judo Føroyar | 540.594 | 558.103 |
| | Parasport | 839.721 | 838.038 |
| | Badmintonsambandið | 769.692 | 837.806 |
| | Borðtennissambandið | 543.687 | 501.615 |
| | Sambandið Fyri Súkkling og Triathlon | 392.978 | 366.984 |
| | Frælsur Ítróttur Føroya | 580.036 | 550.527 |
| | Skjótisambandið | 519.095 | 491.074 |
| | Bogaskjótisambandið | 490.583 | 478.633 |
| | Kurvabóltur | 317.378 | 300.000 |
| | Ríðisambandið | 486.019 | 491.534 |
| | **Tilsamans** | 13.372.000 | 13.028.849 |
| | Stuðul til menningarsambond | | |
| | Boksisamband Føroya | 120.000 | 120.000 |
| | Føroya Seyðahundafelag | 110.000 | 100.000 |
| | Taekwondasamband Føroya | 130.000 | 120.000 |
| | Billiardsamband Føroya | 50.000 | 50.000 |
| | Golfsamband føroya | 70.000 | 10.000 |
| | Styrkisamband Føroya | 116.535 | 80.000 |
| | Tennissamband Føroya | 120.000 | 100.000 |
| | Dartsamband Føroya | 130.000 | 130.000 |
| | Afturført stuðul til ser- og menningarsambond | -46.535 | -16.848 |
| | **Tilsamans** | 800.000 | 693.152 |
| | Útlutaður stuðul tilsamans | 14.172.000 | 13.722.001 |

| | | 2023<br>kr. | 2022<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **9.** | **Stuðul til altjóða kappingar** | | |
| | Dartsambandið | 63.025 | 0 |
| | Hondbóltsambandið | 474.774 | 603.819 |
| | Flogbóltsambandið | 829.860 | 900.000 |
| | Badmintonsambandið | 76.671 | 75.000 |
| | Svimjisambandið | 111.560 | 149.582 |
| | Skjótisambandið | 0 | 185.876 |
| | Taekwondosambandið | 16.990 | 24.683 |
| | Róðrarsambandið | 26.841 | 0 |
| | Seyðahundasambandið | 52.337 | 66.501 |
| | Ríðisambandið | 70.327 | 65.272 |
| | Fimleikasambandið | 127.168 | 0 |
| | Avseting, netto | 1.350.447 | 622.951 |
| | | **3.200.000** | **2.693.684** |

| | | 2023<br>kr. | 2022<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **10.** | **Stuðul til Úrvalsítrótt** | | |
| | Hondbóltsamband Føroya | 700.000 | 450.005 |
| | Svimjisambandið | 200.000 | 227.000 |
| | Parasport | 0 | 150.000 |
| | Bogaskjótisamband Føroya | 80.000 | 100.000 |
| | Frælsur Ítróttur | 0 | 100.000 |
| | Styrkisamband Føroya | 115.000 | 0 |
| | Fimleikasamband Føroya | 190.000 | 380.000 |
| | Flogbóltsamband Føroya | 40.000 | 50.000 |
| | Judo Føroyar | 0 | 50.000 |
| | Taekwondo | 250.000 | 150.000 |
| | Umsitingarkostnaður | 7.434 | 0 |
| | Afturgoldin stuðul | -335.130 | -667.289 |
| | Broytingar í avsetingum | -447.304 | -189.716 |
| | | **800.000** | **800.000** |

| | 31/12 2023<br>kr. | 31/12 2022<br>kr. |
|---|---:|---:|
| **11. Flutt úrslit** | | |
| Flutt úrslit primo | 8.792.363 | 9.455.399 |
| Fluttur vinningur ella hall í árinum | -1.280.745 | -663.036 |
| | **7.511.618** | **8.792.363** |
| | | |
| **12. Avsetingar** | | |
| Avsett Antidoping Føroyar | 380.233 | 278.959 |
| Oyggjaleikir í Føroyum | 147.600 | 147.600 |
| Altjóða kappingar | 2.326.065 | 2.195.120 |
| Stuðul til Úrvalsítrótt | 0 | 34.109 |
| Stuðul til menningarsambond | 134.132 | 180.667 |
| Avseting til nýtt ÍSF hús | 2.818.258 | 2.818.459 |
| Avsett til skúlaleikir | 250.000 | 250.000 |
| | **6.056.288** | **5.904.914** |

## Uppskot til býti, lagt fyri aðalfundin hjá Ítróttasambandi Føroya 4. mai 2024

| | Uppskot 2024 | Býti 2023 | Býti 2022 | Býti 2021 | Býti 2020 | Býti 2019 | Býti 2018 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fótbóltssamband Føroya** | 1.550.000 | 1.300.000 | 1.300.000 | 1.300.000 | 1.300.000 | 1.556.500 | 1.512.500 |
| **Hondbóltssamband Føroya** | 2.674.901 | 2.523.716 | 2.346.634 | 2.346.634 | 2.513.007 | 2.413.022 | 2.277.929 |
| **Flogbóltssamband Føroya** | 1.473.554 | 1.251.781 | 1.271.820 | 1.271.820 | 1.316.037 | 1.271.168 | 1.259.501 |
| **Róðrarsamband Føroya** | 786.168 | 756.241 | 678.423 | 678.423 | 752.067 | 778.953 | 801.699 |
| **Fimleikasamband Føroya** | 974.031 | 980.397 | 975.294 | 975.294 | 1.145.239 | 1.164.575 | 1.121.689 |
| **Svimjisamband Føroya** | 1.067.724 | 1.080.082 | 1.042.364 | 1.042.364 | 1.096.061 | 1.161.386 | 986.002 |
| **Judo Føroyar** | 581.014 | 540.594 | 558.103 | 558.103 | 539.473 | 518.306 | 512.959 |
| **Parasport Føroyar** | 743.066 | 839.721 | 838.038 | 838.038 | 909.612 | 820.447 | 784.815 |
| **Badmintonsamband Føroya** | 724.920 | 769.692 | 837.806 | 837.806 | 868.311 | 864.649 | 863.381 |
| **Borðtennissamband Føroya** | 532.580 | 543.687 | 501.615 | 501.615 | 510.935 | 485.106 | 503.656 |
| **Súkkling og Triathlon** | 468.810 | 392.978 | 366.984 | 366.984 | 83.883 | 467.320 | 525.376 |
| **Frælsur Ítróttur Føroya** | 610.313 | 580.036 | 550.527 | 550.527 | 566.406 | 563.724 | 588.455 |
| **Ríðisamband Føroya** | 535.208 | 486.019 | 491.534 | 491.534 | 522.416 | 517.060 | 502.345 |
| **Skjótisamband Føroya** | 549.078 | 519.095 | 491.074 | 491.074 | 500.876 | 481.541 | 488.790 |
| **Bogaskjótisamband Føroya** | 504.020 | 490.583 | 478.633 | 478.633 | 508.418 | 496.675 | 448.358 |
| **Kurvabóltur í Føroyum** | 335.613 | 317.378 | 300.000 | | | | |
| **Menningarsambond** | 800.000 | 800.000 | 693.152 | 793.152 | 617.258 | 589.567 | 572.544 |
| | **14.911.000** | **14.172.000** | **13.722.001** | **13.522.001** | **13.750.000** | **14.150.000** | **13.750.000** |

Loysnir tel 214452

Ítróttasamband Føroya

Eystara Bryggja 30 / Postsmoga 223 / Tel 31 26 06 / isf@isf.fo / www.isf.fo